Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 2. mars 2021
Mál nr.: 20/02846
Málsviðgjørt: ABD
Eftirkannað: 8. februar 2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin)
(um at seta í gildi broytingar í 8. vinnufelagadirektivinum o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin), sum broytt við § 4 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 28 frá 26. mars 2012 og løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á kapitli 1 verður orðað soleiðis:
"**Øki løgtingslógarinnar og allýsingar**"

2. Sum yvirskrift yvir § 1 verður sett:

"*Øki løgtingslógarinnar*"

3. Í § 1, stk. 3, verður "§ 15, stk. 3, § 20, § 28, §§ 41-44 og § 51, stk. 4, 1. pkt." broytt til: "§ 15, stk. 4, §§ 20, 28, 41-44, § 44 c og § 51, stk. 4, 1. pkt."

4. § 1, stk. 4 og 5 verða strikað.

5. Aftan á § 1 verður í kapittul 1 sett:

"*Allýsingar*

§ 1 a. Eftir hesi løgtingslóg galda hesar allýsingar:
1) Grannskoðari: Persónur, sum er góðkendur sambært §§ 3, 10 og 11, um ikki annað sæst týðiliga.
2) Grannskoðanarvirki: Eitt virki, sum er góðkent sambært § 13, um ikki annað sæst týðiliga.
3) Fyritøkur av almennum áhuga:
   a) fyritøkur, ið hava kapitalpartar, skuldarinstrument ella onnur virðisbrøv, ið verða handlað á einum skipaðum marknaði í einum ES-landi ella einum EBS-landi, og
   b) fíggjarfyritøkur, sbr. § 5, stk. 1, nr. 1, litra a í Bekendtgørelse af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed, tryggingarfeløg, sbr. § 5, stk. 1, nr. 11 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi, tó

undantikið tryggingarmeklaravirksemi, og tryggingarfelag sambært løgtinglóg um P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag.

4) Smáar fyritøkur: Fyritøkur, sum fíggjarjavnadagin tvey fylgjandi roknskaparár ikki fara upp um tvey av hesum støddarmørkum:
   a) ein fíggjarjavna upp á 36 mió. kr.,
   b) ein nettoumsetning upp á 72 mió. kr., og
   c) eitt miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 50.
5) Miðalstórar fyritøkur: Fyritøkur, sum ikki eru smáar fyritøkur, og sum fíggjarjavnadagin tvey fylgjandi roknskaparár ikki fara upp um tvey av hesum støddarmørkum:
   a) ein fíggjarjavna upp á 143 mió. kr.,
   b) ein nettoumsetning upp á 286 mió. kr., og
   c) eitt miðaltal upp á 250 av heiltíðarsettum starvsfólkum gjøgnum roknskaparárið.
6) Stórar fyritøkur: Fyritøkur, sum ikki eru smáar ella miðalstórar fyritøkur.

Stk. 2. Tá støddin á fyritøkuni skal roknast eftir stk. 1, nr. 4 og 5, skal § 7, stk. 3 og 4 í ársroknskaparlógini nýtast, sbr. tó stk. 3.

Stk. 3. Fyri móðurfyritøkur verður fíggjarjavni, nettoumsetningur og miðaltal av heiltíðarsettum í roknskaparárinum, sambært stk. 1, nr. 4 og 5, roknað á tann hátt, at fíggjarjavni, nettoumsetningur og talið av heiltíðarsettum hjá móðurfyritøku og dótturfyritøku verður lagt saman. Tá støddin eftir 1. pkt. verður roknað, er § 110, stk. 2 og 3 í ársroknskaparlógini galdandi."

6. Í heitunum á kapitli 2, kapitli 3, kapitli 9 og kapitli 13 verður "v.m." broytt til: "o.a."

7. Í § 4, stk. 1 verður aftan á "javnt og samt" sett: "dagførir og".

8. Í § 4, stk. 2, 2. pkt. verður "§ 19, stk. 3, nr. 2" broytt til: "§ 1 a, stk. 1, nr. 3".

9. Í § 6, stk. 1, 2. pkt. verður aftan á "§ 8" sett: "og § 8 a, stk. 4, nr. 3".

10. Í § 6, stk. 3, 2. pkt. verður "§ 8, stk. 3" broytt til: "§ 8 a, stk. 1".

11. Yvirskriftin yvir § 8 verður orðað soleiðis:

"*Frátøka o.a.*"

12. § 8, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Harumframt kann Skráseting Føroya taka góðkenningina frá einum grannskoðara, um grannskoðarin noktar at geva seg undir reglurnar um góðskueftirlit, sbr. § 27."

13. § 8, stk. 3 verður strikað.

14. Aftan á § 8, men áðrenn yvirskriftina yvir § 9, verður sett:
"**§ 8 a.** Vantar einum grannskoðara at fullføra alla ella partar av eftirútbúgvingini, sambært § 4, kann Skráseting Føroya áseta eina freist fyri, nær grannskoðarin skal lúka krøvini um eftirútbúgving.
Stk. 2. Um ein grannskoðari ikki kann skjalprógva, at krøvini til eftirútbúgving sambært § 4 eru lokin, kann Skráseting Føroya geva grannskoðaranum boð um at taka lut í eftirútbúgvingartímum eftir nærri ásettum treytum.
Stk. 3. Um Skráseting Føroya í sambandi við eftirlitið við grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum, sambært § 30, stk. 2, nr. 2-4, metir, at ein grannskoðari hevur tørv á meiri

eftirútbúgving innan fyri eitt ávíst avmarkað fakøki, kann Skráseting Føroya geva grannskoðaranum boð um, eftir nærri ásettum treytum, at taka lut í tílíkari eftirútbúgving.
Stk. 4. Uppfyllir ein grannskoðari ikki treytirnar í § 4 um eftirútbúgving ella fylgir ikki boðum eftir stk. 1-3, kann Skráseting Føroya:
1) taka góðkenningina treytað frá grannskoðaranum við áseting um, at viðkomandi í verandi ella komandi eftirútbúgvingarskeiði ikki setur til síðis krøvini um eftirútbúgving á slíkan hátt, at samlaða metingin verður, at góðkenningin skal verða tikin frá viðkomandi,
2) geva grannskoðaranum forboð fyri í verandi ella komandi eftirútbúgvingarskeiði at grannskoða ella hava eftirlit við grannskoðan ella røkja uppgávur í einum grannskoðanarvirki, ella
3) taka góðkenningina frá grannskoðaranum."

15. Í yvirskriftunum yvir §§ 9, 10, 13 og 16 verður "v.m." broytt til: "o.a.".

16. § 9, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Er ein góðkenning sum grannskoðari fallin burtur sambært § 7, frátikin sambært § 8 og § 8 a, stk. 4, nr. 3, ella frádømd sambært § 42, stk. 4 ella § 79 í revsilógini, verður persónurin strikaður úr almennu skránni yvir góðkendar grannskoðarar, og eftir hetta kann viðkomandi ikki longur nýta prógvið fyri góðkenningini ella tað fakliga heitið."

17. § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Skráseting Føroya kann góðkenna ein persón sum løggildan grannskoðara, sum:
1) prógvar, at hava tikið útbúgving uttanlands, ið verður mett at kunna javnsetast við útbúgving eftir § 3, stk. 1 og 3,
2) uttanlands er góðkendur at fremja lógarálagda grannskoðan, og
3) lýkur treytirnar í § 3, stk. 5 og 6."

18. Í § 10 verður aftan á stk. 1 sum nýggj stk. sett:
"*Stk. 2.* Persónur, sum er góðkendur til at gera lógarálagda grannskoðan í einum landi, sum ikki hevur sett í gildi Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 2006/43EF om lovpligtig revision af årsregnskaber og konsoliderede regnskaber, sum broytt við direktivi 2014/56/EU, og sum ES ikki hevur gjørt avtalu við, kann bert verða góðkendur sum grannskoðari sambært stk. 1, um londini geva sínámillum góðkenning. Eftir áheitan frá Skráseting Føroya skal umsøkjari prógva, at tað verða givnar sínámillum góðkenningar.
Stk. 3. Sum treyt fyri góðkenning sum løggildur grannskoðari eftir stk. 1 kann Skráseting Føroya krevja, at persónurin prógvar sín kunnleika til føroyska lóggávu."
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 4 og 5.

19. Í § 13, stk. 1, nr. 1 verður aftan á "stk. 6," sett: "og krøvini í §§ 26 og 26 a um innanhýsis bygnað o.a.,".

20. Í § 13, stk. 1, nr. 2 verður "§ 29" broytt til: "§ 27".

21. Í § 13, stk. 8 verður "sbr. § 42, stk. 4, 3. pkt." broytt til: "sambært § 42, stk. 6, 4. pkt.".

22. Í § 14, stk. 3 verður "§ 42, stk. 4, 3. pkt." broytt til: "§ 42, stk. 6, 4. pkt."

23. Aftan á heitið á kapitli 3, men áðrenn yvirskriftina yvir § 15, verður sett:

"*Góðkenning og framhald av grannskoðanaruppgávu*

§ 14 a. Eitt grannskoðanarvirki skal, áðrenn tað tekur við ella heldur fram

við eini grannskoðanaruppgávu, meta um og skjalprógva:

1) at tað lýkur krøvini um óheftni, sambært § 22,
2) um tað eru hóttanir móti óheftni hjá grannskoðanarvirkinum ella grannskoðaranum, og um so er, hvørji trygdartiltøk eru tikin fyri at ganga hesum hóttanum ímóti,
3) at tað hevur tey neyðugu málsføru starvsfólkini, ta neyðugu tíðina og ta neyðugu orkuna at fremja grannskoðanaruppgávuna lýtaleyst, og
4) at grannskoðarin er góðkendur at geva grannskoðanarátekningina á roknskapin.

Stk. 2. Stk. 1, nr. 3 og 4 eru ikki galdandi fyri grannskoðan av roknskapum hjá smáum fyritøkum.
Stk. 3. Stk. 1, nr. 1 og 2 eru eisini galdandi fyri aðrar váttanir við trygd.
Stk. 4. Stk. 1 er eisini galdandi fyri grannskoðanarvirki, fevnd av artikli 6 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden í sambandi við, at grannskoðan av fyritøku av almennum áhuga verður fyrireikað."

24. Í § 15, stk. 1, 3. pkt. verður aftan á "vísa" sett: "professionelt ivasemi,"

25. Í § 15 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Grannskoðarin skal, tá hann leggur til rættis og ger eina uppgávu eftir § 1, stk. 2 vísa professionelt ivasemi, ásannandi at umstøður kunnu vera, sum kunnu týða upp á skeivar upplýsingar av týdningi í váttanarevninum. Tá grannskoðanin verður framd, skal grannskoðarin serliga vísa professionelt ivasemi í mun til metingina hjá leiðsluni av dagsvirði og niðurskriving av aktivum, burturleggingum og komandi peningastreymum, sum hava týdning fyri møguleikan hjá grannskoðaðu fyritøkuni at halda fram við sínum virksemi."
Stk. 2-4 verða eftir hetta stk. 3-5.

26. Í § 15, stk. 2, sum verður stk. 3, verður "§ 10, stk. 3" broytt til: "10, stk. 4".

27. Í § 15, stk. 4, sum verður stk. 5, verður "um at gera grannskoðanaruppgávur" broytt til: "um at leggja til rættis og gera grannskoðanaruppgávur".

28. § 16 verður orðað soleiðis:
"**§ 16.** Gevur grannskoðari grannskoðanarátekning á ársroknskapir o.a., heldur starv grannskoðarans fram, til nýggjur grannskoðari hevur tikið við, um ikki annað fylgir av lóggávuni ella av viðtøkunum hjá einum virki, ella annað er avtalað. Um grannskoðanin er framd eftir váttanarstandardi, sambært § 135, stk. 1, 2. pkt. í ársroknskaparlógini, og grannskoðarin tí hevur givið eina váttan um víðkaða gjøgnumgongd, er 1. pkt. ikki galdandi.
Stk. 2. Hóast ásetingina í stk. 1, kann grannskoðari til eina og hvørja tíð fara úr starvi, um hetta ikki stríðir ímóti góðum grannskoðanarsiði. Fer grannskoðari frá, skal grannskoðarin, sum tekur við, venda sær til fráfarandi grannskoðara, ið hevur skyldu til at upplýsa orsakirnar til, at hann fer frá. Hevur fráfarandi grannskoðarin ikki givið seinastu váttanina á ársroknskapin o.a., skal grannskoðarin, sum tekur við, eisini venda sær til grannskoðaran, sum hevur givið seinastu váttanina. Bæði grannskoðarin, sum fer frá, og grannskoðarin, sum hevur givið seinastu váttanina, hava skyldu til at geva grannskoðaranum, sum tekur við, atgongd til allar týðandi upplýsingar um tað virkið, ið váttanin hjá grannskoðaranum viðvíkur."

29. Í § 17, stk. 1, 3. pkt. verður "stk. 3" broytt til: "stk. 4".

30. Í § 17 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 3.* Eru fleiri grannskoðarar valdir eftir stk. 2 at geva eina grannskoðanarátekning, skulu hesir grannskoðarar verða samdir um úrslitið av grannskoðanini og geva eina felags grannskoðanarátekning. Semjast grannskoðararnir ikki, skal hvør grannskoðarin gera eina niðurstøðu í einum serligum broti í átekningini um orsøkina til ósemjuna."
Stk. 3 og 4 verða eftir hetta stk. 4 og 5.

31. § 18 verður orðað soleiðis:
"**§ 18.** Í fyritøkum av almennum áhuga skal grannskoðanarprotokollin, sambært artikli 11, stk. 1 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden, eisini verða løgd fyri nevndina ella eftirlitsráðið í grannskoðaðu fyritøkuni."

32. § 19 verður strikað.

33. Í § 20 verður sum stk. 5 sett:
"*Stk. 5.* Stk. 1-4 eru ikki galdandi fyri grannskoðan av ársroknskapum o.ø. hjá eini fyritøku av almennum áhuga, tá grannskoðarin er fevndur av skyldunum í artikli 7 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden."

34. § 21, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Tá móðurfeløg, ið gera samtøkuroknskap, verða grannskoðað, skulu arbeiðsskjølini eisini skjalprógva ta gjøgnumgongd og meting, ið er gjørd í tí grannskoðanararbeiði, sum aðrir grannskoðarar hava gjørt við samtøkugrannskoðan fyri eyga. Arbeiðsskjølini skulu eisini skjalprógva, at hesir grannskoðarar hava játtað, at viðkomandi skjalprógv um grannskoðanararbeiðið verða givin víðari undir samtøkugrannskoðanini."

35. Í § 21 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 3.* Hevur grannskoðarin ikki møguleika at gjøgnumganga og meta um grannskoðanararbeiðið, sum aðrir grannskoðarar hava gjørt sum liður í samtøkugrannskoðanini, sambært stk. 2, 1. pkt., skal grannskoðarin seta hóskandi tiltøk í verk og boða Skráseting Føroya frá."
Stk. 3-5 verða eftir hetta stk. 4-6.

36. Í § 21, stk. 4, sum verður stk. 5, verður "stk. 3" broytt til: "stk. 4".

37. Í § 21, stk. 5, sum verður stk. 6, verður "Stk. 3 og 4" broytt til: "Stk. 4 og 5".

38. § 22, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Grannskoðarar, grannskoðanarvirkir og onnur í grannskoðanarvirkinum, sum eru knýtt at uppgávuni ella hava eftirlit við, at hon verður framd, skulu, tá talan er um uppgávur, ið eru fevndar av § 1, stk. 2, vera óheft av tí virki, sum uppgávan viðvíkur og mugu ikki vera uppií, tá avgerðir verða tiknar í virkinum. Óheftni krevst bæði í uppgávutíðarskeiðinum, og í tí tíðarskeiðinum, sum roknskapurin ella váttanin er galdandi fyri. Uppgávutíðarskeiðið byrjar, tá farið verður undir uppgávuna, og heldur fram til váttanin er givin."

39. § 22, stk. 2, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Ein grannskoðari er ikki óheftur, um tað eru beinleiðis ella óbeinleiðis fíggjarlig áhugamál, handilslig viðurskifti ella setanarlig viðurskifti ella onnur viðurskifti, heruppií latan av veitingum, ið § 1, stk. 2 ikki fevnir um,

millum grannskoðaran og tað virkið, sum ein uppgáva viðvíkur, sum hjá einum vælkunnaðum triðjamanni, kann vekja iva um óheftni grannskoðarans."

40. § 22, stk. 4 verður strikað.
Stk. 5 og 6 verða eftir hetta stk. 4 og 5.

41. § 22, stk. 5, 2. pkt., sum verður stk. 4, 2. pkt., verður strikað.

42. § 22, stk. 6, 1. pkt., sum verður stk. 5, 1. pkt., verður strikað.

43. Í § 22, stk. 6, 2. pkt., sum verður stk. 5, 1. pkt., verður "eisini" strikað.

44. Í § 22 verða sum stk. 6 og 7 sett:
"*Stk. 6.* Fremur ein grannskoðari grannskoðan fyri eina fyritøku, sum í roknskapartíðarskeiðinum verður yvirtikin, løgd saman við ella yvirtekur eina aðra fyritøku, skal grannskoðarin eyðmerkja og meta um øll fyrrverandi og núverandi áhugamál ella samstørv, heruppií latan av møguligum øðrum veitingum enn grannskoðan til fyritøkuna, sum við fyriliti fyri atkomuligum trygdarfyriskipanum, kann hava við sær, at óheftni grannskoðarans og evni til at halda fram við grannskoðanini aftaná samanleggingar- ella yvirtøkudagin kemur í vanda.
Stk. 7. Grannskoðarin skal skjótast gjørligt og í seinasta lagi innan 3 mánaðir taka øll neyðug stig til at enda núverandi áhugamál og samstørv, sum, sambært stk. 6 kunnu hótta óheftni grannskoðarans. Grannskoðarin skal eisini skipa fyri trygdartiltøkum fyri at minka um møguligar hóttanir ímóti sínum óheftni, sum kunnu koma av fyrrverandi og áleikandi áhugamálum og samstørvum."

45. Aftan á § 22 verður sett:
"**§ 22 a.** Uttan mun til artikkul 5, stk. 1 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden kann ein grannskoðari ella grannskoðanarvirki, sum grannskoðar fyritøkur av almennum áhuga, gera hesar uppgávur fyri grannskoðanarkundan og tess móðurfyritøkur og dótturfyritøkur:
1) Skattatænastur, ið snúgva seg um:
   a) at útfylla skattaoyðibløð,
   b) at vísa á almennan stuðul og skattafyrimunir,
   c) at veita hjálp í sambandi við skattaeftirlit, og
   d) at ráðgeva um nýtslu av skattalóggávu.
2) Metingartænastur, heruppií metingar í sambandi við tryggingarveitingar og stuðul í rættarmálum.

Stk. 2. Tað er ein treyt fyri at veita tænastur eftir stk. 1, at:
1) uppgávurnar hvør sær ella saman onga ella týdningarleysa ávirkan hava á grannskoðaða roknskapin
2) metingin av ávirkanini á grannskoðaða roknskapin er skjalprógvað og greidd frá í grannskoðanarprotokollini, ið verður latin grannskoðanarbólkinum og nevndini, sambært artikkul 11 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden, og
3) grannskoðarin og grannskoðanarvirkið lúka treytirnar um óheftni sambært § 22.

§ 22 b. Eftir grundaða umsókn frá grannskoðara ella grannskoðanarvirki kann Skráseting Føroya í hendinga førum og undir heilt serligum umstøðum geva grannskoðaranum ella grannskoðanarvirkinum undantak frá avmarkingini í artikkul 4, stk. 2 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16.

april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden.
Stk. 2. Undantak eftir stk. 1 kann í mesta lagi verða givið fyri 1 roknskaparár.

§ 22 c. Tann ella teir grannskoðarar, sum undirskriva grannskoðararátekningina í einum virki, kunnu ikki taka á seg leiðandi størv ella gerast limir í nevndini ella eftirlitsráðnum ella grannskoðanarbólki í hesum virki fyrr enn 1 ár eftir, at viðkomandi er farin frá sum grannskoðari. 1. pkt. er ikki galdandi, um grannskoðanin er framd eftir váttanarstandardi, sambært § 135, stk. 1, 2. pkt., í ársroknskaparlógini. Viðvíkur grannskoðaraátekningin einari fyritøku av almennum áhuga, er bannið í 1. pkt. galdandi í 2 ár.
Stk. 2. Stk. 1, 1. pkt. er eisini galdandi fyri grannskoðarar, sum eru knýttir at grannskoðanarvirkinum, og sum hava verið beinleiðis knýttir at grannskoðanini."

46. § 23 verður orðað soleiðis:
"**§ 23.** Grannskoðanarvirkið og grannskoðarin skulu tryggja, at tann ella teir grannskoðarar, ið undirskriva grannskoðanarátekningina fyri fyritøkur, sum eru nevndar í stk. 2, í seinasta lagi 7 ár eftir, at teir eru tilnevndir at gera uppgávuna, verða skiftir út í minsta lagi í eitt 3 ára tíðarskeið.
Stk. 2. Fyritøkur, ið ikki eru fevndar av § 1 a, stk. 1, nr. 3, men í 2 fylgjandi roknskaparár fara upp um tvær ella fleiri av hesum treytum, eru fevndar av stk. 1, inntil tær ikki longur lúka hesar treytirnar:
1) Starvsfólkahóp upp á 2.500 persónar.
2) Ein fíggjarjavna upp á 5 mia. kr.
3) Ein nettoumsetning upp á 5 mia. kr."

47. § 24, stk. 1 verður strikað.
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 1 og 2.

48. Í § 24, stk. 3, sum verður stk. 2, verður "í stk. 2" broytt til: "í stk. 1".

49. Kapittul 5 verður strikaður.

50. Heitið á kapitli 6 verður orðað soleiðis:
"**Innanhýsis skipan, góðskustýring og góðskueftirlit**"

51. § 26 verður orðað soleiðis:
"**§ 26.** Grannskoðanarvirkir skulu hava eina innanhýsis skipan, heruppií eina góðskustýringarskipan, ið skal forða fyri møguligum hóttanum ímóti óheftni og partloysi hjá grannskoðanarvirkinum og grannskoðaranum og somuleiðis tryggja góðsku, integritet og nærlagni í sambandi við váttanaruppgávur. Grannskoðanarvirkið skal, fyri at fylgja 1. pkt., taka hædd fyri støddd og rakstrareyðkenni virkisins, og um tað er við í einum netverki.
Stk. 2. Grannskoðanarvirkir skulu kunna skjalprógva, at krøvini í stk. 1 eru lokin, heruppií at góðskustýringarskipanin verður nýtt.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um krøvini til innanhýsis skipanina og um innihaldið av góðskustýringarskipanini og um skjalprógvið fyri nýtsluna av henni."

52. Aftan á § 26 verður sett:
"**§ 26 a.** Grannskoðanarvirkir skulu sum liður í góðskustýringarskipanini hava eina serliga skipan, sum gevur starvsfólki teirra møguleika at fráboða brot og møgulig brot á lóggávu um grannskoðan. Fráboðanirnar skulu kunna vera dulnevndar.
Stk. 2. Starvsfólkið skal ikki vera fyri ólagaligari viðferð ella ólagaligum fylgjum, tí tað hevur boðað frá broti ella møguligum broti á lóggávuna um grannskoðan, sambært stk. 1.

Stk. 3. Stk. 1 er ikki galdandi fyri grannskoðanarvirkir, sum bert hava ein grannskoðara knýttan at sær ella grannskoðanarvirkir, sum bara fáast við aðrar uppgávur enn at grannskoða roknskapir."

53. Í § 27, stk. 2, verður "sbr. § 26" broytt til: "sambært §§ 26 og 26 a".

54. § 27, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Í grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða roknskap hjá miðalstórum og stórum fyritøkum, skal góðskueftirlitið fara fram við í mesta lagi 6 ára millumbilum. Í øðrum grannskoðanarvirkjum, sum geva váttanir eftir § 1, stk. 2, skal góðskueftirlitið verða grundað á eina váðameting. 1. pkt. er ikki galdandi fyri góðskueftirlit, sum er fevnt av artikli 26, nr. 2 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden."

55. Í § 28, stk. 1, 1. pkt. verður "154-157" broytt til: "155-157".

56. § 29 verður orðað soleiðis:
"**§ 29.** Fyritøkur av almennum áhuga skulu seta ein grannskoðanarbólk, sbr. tó stk. 4, 5, 7 og 8. Í grannskoðanarbólkinum skulu vera persónar, sum eru limir í eftirlitsráðnum ella í nevndini, sum ikki samstundis eru í stjórnini, ella persónar, sum aðalfundurin ella samsvarandi myndugleiki hevur valt at vera í bólkinum. Meirilutin av grannskoðanarbólkinum, heruppií formaðurin, skal vera óheftur, uttan so at einans limir í nevndini ella eftirlitsráðnum eru í bólkinum. Í minsta lagi ein limur í grannskoðanarbólkinum skal hava førleikar innan roknskap ella grannskoðan. Limirnir í grannskoðanarbólkinum skulu sum heild hava førleikar, ið eru viðkomandi fyri virkisøkið hjá fyritøkuni.
Stk. 2. Persónur, sum aðalfundurin ella samsvarandi myndugleiki hevur valt at vera limur í grannskoðanarbólkinum, er í hesum starvi fevndur av somu reglum, sum limir í grannskoðanarbólkinum, ið eisini eru limir í nevndini ella eftirlitsráðnum.
Stk. 3. Uppgávurnar hjá grannskoðanarbólkinum skulu í minsta lagi vera:
1) at geva samlaðu evstu leiðsluni boð um niðurstøðuna av lógarásettu grannskoðanini, heruppií mannagongdini fyri roknskapargreiðslu,
2) at hava eftirlit við mannagongdini fyri roknskapargreiðslu og seta fram tilmæli ella uppskot fyri at tryggja integritetin,
3) at hava eftirlit við, at innanhýsis eftirlitsskipanin hjá fyritøkuni, møgulig innanhýsis grannskoðan og skipanin fyri váðastýring virka á fullgóðan hátt í sambandi við roknskapargreiðsluna, uttan at bróta óheftnið hjá fyritøkuni,
4) at hava eftirlit við lógarásettu grannskoðanini av ársroknskapinum o.ø., við atliti at niðurstøðuni frá seinasta góðskueftirlitinum,
5) at hava eftirlit við og kanna óheftnið hjá grannskoðaranum sambært §§ 22-22c og artikkul 6 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden og góðkenna, at grannskoðari veitir aðrar tænastur enn grannskoðan sambært artikli 5 í somu fyriskipan, og
6) at vera ábyrgdari fyri mannagongdini fyri vali og tilnevning av grannskoðara til val sambært artikli 16 í Europa-

Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden.

Stk. 4. Fyritøkur, sum stk. 1, 1. pkt. fevnir um, kunnu tó velja at lata samlaðu evstu leiðsluna útinna virksemið hjá grannskoðanarbólkinum. Hetta er tó treytað av, at eingin nevndarlimur samstundis er limur í stjórnini, og í minsta lagi ein limur í evstu leiðsluni bæði er óheftur av fyritøkuni og hevur førleikar innan roknskap ella grannskoðan.

Stk. 5. Ein fyritøka, hvørs nevndarformaður ikki er limur í stjórnini, kann velja at lata samlaðu evstu leiðsluna útinna uppgávurnar hjá grannskoðanarbólkinum, um fyritøkan seinastu trý kalendaraárini hevur havt eitt marknaðarvirði upp á í miðal undir 100 mió. evrur grundað á kursvirðið við ársenda, ella fyritøkan fíggjarjavnadagin tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvær av hesum treytum:

1) 250 heiltíðarsett starvsfólk,
2) ein javna upp á 43 mió. evrur, og
3) ein nettoumsetning upp á 50 mió. evrur.

Stk. 6. Í fyritøkum, har tann samlaða evstu leiðslan fremur virksemið hjá grannskoðanarbólkinum, sambært stk. 4 og 5, skal hetta standa í ársfrágreiðingini.

Stk. 7. Hesar fyritøkur hava ikki skyldu at hava ein grannskoðanarbólk, sambært stk. 1-6:

1) Dótturfeløg, um móðurfelagið er fevnt av krøvunum um at hava grannskoðanarbólk,
2) Íløgufeløg,
3) Alternativir íløgugrunnar sum nágreinað í artikkul 4, stk. 1, litra a, í Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 2011/61/EU af 8. juni 2011 om forvaltere af alternative investeringsfonde,
4) Fyritøkur, hvørs einasta endamál er at geva út virðisbrøv við trygd í aktivum, sum nágreinað í artikkul 2, nr. 5 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EF) nr. 809/2004 om oplysninger i prospekter, og
5) Fíggjarfyritøkur fevndar av § 5, stk. 1, litra a, í bekendtgørelse af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed, hvørs ognarlutir ikki verða handlaðir á einum skipaðum marknaði í einum ES- ella EBS-landi, og fíggjarfyritøkur, sum leypandi hava givið út lánsbrøv ella ferð eftir ferð hava givið út lánsbrøv, ið verða handlað á einum skipaðum marknaði, undir teirri fyritreyt at samlaða nominella virðið á slíkum lánsbrøvum er undir 100 mio. EUR, og tær nevndu fyritøkurnar ikki hava almannakunngjørt nakað prospekt sambært Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 2003/71/EF af 4. november 2003 um tað prospektið, sum skal almannakunngerast, tá virðisbrøv verða boðin út fyri almenninginum ella sett til sølu.

Stk. 8. Ein fyritøka, sum sambært stk. 7, nr. 4 tekur avgerð um ikki at skipa ein grannskoðanarbólk, skal í síni ársfrásøgn greiða frá orsøkunum til, at hon ikki metir tað skynsamt at hava ein grannskoðanarbólk, eina nevnd ella eitt eftirlitsráð við ábyrgd av at útinna leiklutin hjá einum grannskoðanarbólki."

57. § 30 verður orðað soleiðis:

"**§ 30.** Skráseting Føroya hevur ábyrgdina av eftirlitinum við grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum.

Stk. 2. Skráseting Føroya hevur heruppií ábyrgdina av eftirlitinum við:

1) prógvtøku, sambært § 31, og eftirútbúgving, sambært § 4,
2) góðskueftirliti, sambært §§ 32-34,

3) kanningum, sambært §§ 35-40,
4) dissiplinermálum, sambært §§ 41-44, og
5) samstarvi við og flytan av upplýsingum til málsførar myndugleikar í øðrum londum, sambært §§ 48 og 49.

Stk. 3. Skráseting Føroya hevur eisini ábyrgdina av:

1) eftirlitinum við, at limir í evstu leiðslu, stjórn ella grannskoðanarbólki í eini fyritøku av almennum áhuga halda tær skyldur, sum eru í hesi løgtingslóg, í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden og í reglum, sum gjøgnumføra ásetingarnar í artikli 37 og 38 í Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 2006/43EF om lovpligtig revision af årsregnskaber og konsoliderede regnskaber, sum broytt við direktivi 2014/56/EU, og
2) umsjón og meting av gongdini á marknaðinum fyri lógarásettar grannskoðanartænastur til fyritøkur av almennum áhuga.

Stk. 4. Skráseting Føroya kann í sambandi við sítt virksemi sambært stk. 1-3 útvega sær upplýsingar frá øðrum føroyskum og útlendskum málsførum myndugleikum og krevja neyðugar upplýsingar frá grannskoðaranum og grannskoðanarvirkjum, heruppií latan av arbeiðsskjølum og øðrum skjølum viðvíkjandi uppgávum, framdar sambært § 1, stk. 2, og frá møguligum feløgum, sum hava uppgávur eftir stk. 2. Fyri at fremja sítt virksemi eftir stk. 3 kann Skráseting Føroya eisini útvega sær neyðugar upplýsingar frá fyritøkum av almennum áhuga.

Stk. 5. Fíggjareftirlitið ella Tryggingareftirlitið hava eftirlit eftir stk. 3, nr. 1 við teimum fyritøkum av almennum áhuga, sum longu eru undir eftirliti av ávíkavist Fíggjareftirlitinum ella Tryggingareftirlitinum. Fíggjareftirlitið ella Tryggingareftirlitið kunnu í tí sambandi nýta tær heimildir, sum eru nevndar í stk. 4.

Stk. 6. Fyritøkurnar av almennum áhuga bera útreiðslurnar av eftirlitinum sambært stk. 3, nr. 1. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um gjald fyri eftirlitið."

58. § 31, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Avtala kann gerast við Erhvervsstyrelsen og við Foreningen for Statsautoriserede Revisorer um samstarv í sambandi við próvtøkuhald og próvtøkudøming."

59. § 32, stk. 1, 3. pkt. verður orðað soleiðis:
"Grannskoðaraeftirlitið hevur 1 formann og 4 aðrar limir, harav 2 limir skulu hava hóskandi útbúgving og viðkomandi royndir innan grannskoðan og roknskapargreiðslu, og 2 limir skulu umboða roknskaparbrúkararnar."

60. § 32, stk. 1, 5. pkt. verður orðað soleiðis:
"Hvørki formaðurin ella limirnir kunnu vera góðkendir grannskoðarar ella vera í starvi hjá ella reka grannskoðanarvirki saman við góðkendum grannskoðarum."

61. § 32, stk. 3, 3. pkt. verður orðað soleiðis:
"Landsstýrismaðurin kann tá áseta serligar reglur um góðskueftirlit við grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga."

62. § 32, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Tær í stk. 1 nevndu reglur um fremjan av góðskueftirliti skulu m.a. hava reglur um:
1) Hvør kann fremja eftirlitið.

2) Val av góðskueftirlitsfólkum, ið skulu fremja góðskueftirlitið, sbr. § 33.
3) Val av grannskoðanarvirkjum, har góðskueftirlit skal fara fram.
4) Vavið á og fremjan av góðskueftirlitinum.
5) Almannakunngering av úrslitinum av einum góðskueftirliti, sbr. § 33 a."

63. § 33, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Tá góðskueftirlitið er endað, ger góðskueftirlitsfólkið eina frágreiðing, ið verður send Grannskoðaraeftirlitinum. Í frágreiðingini skal vera ein lýsing av, hvat er kannað, slagið og vavið á kanningini, ein meting av góðskustýringarskipanini, umframt fremjanini av og óheftni í sambandi við uppgávur sambært § 1, stk. 2."

64. Í § 33, stk. 5, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Grannskoðaraeftirlitið hevur góðskueftirlit á grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga."

65. § 33, stk. 6 og 7 verða orðað soleiðis:
"*Stk. 6.* Góðskueftirlitið endar við, at Grannskoðaraeftirlitið ger eina frágreiðing til kannaða virkið. Í frágreiðingini skulu vera tær mest týðandi niðurstøðurnar frá góðskueftirlitinum umframt møgulig tilmæli um, at kannaða virkið ger ávísar batar, ið eru eyðmerktir. Grannskoðaraeftirlitið tekur við støði í góðskueftirlitinum støðu til, um góðskueftirlitið hjá tí kannaða gevur orsøk til:
1) at eftirlitið verður endað uttan onnur tiltøk, ella
2) at góðskueftirlit verður aftur, har tað skal staðfestast, um tilmæli í sambandi við undanfarna eftirlitið eru komin í rættlag.

Stk. 7. Eftir tilmæli frá Grannskoðaraeftirlitinum ger kannaða virkið eina virkisætlan, ið verður grundarlag undir næsta góðskueftirlitinum. Grannskoðaraeftirlitið skal góðkenna virkisætlanina."

66. Í § 33, stk. 9 verður "Revisortilsynet" tríggja staðni broytt til:
"Erhvervsstyrelsen".

67. Aftan á § 33 verður sett:
"**§ 33 a.** Grannskoðaraeftirlitið kann almannakunngera úrslitið av góðskueftirlitinum, um tað í sambandi við eitt eftirlit sambært § 33, stk. 6, nr. 2 verður staðfest, at tilmæli frá fyrra góðskueftirlitinum ikki eru fylgd. Grannskoðaraeftirlitið kann harafturat almannakunngera úrslitið av góðskueftirlitinum á grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða roknskapir hjá fyritøkum av almennum áhuga. Grannskoðaraeftirlitið tekur avgerð um, á hvønn hátt almannakunngeringin skal gerast. Almannakunngjørt verður á heimasíðuni hjá eftirlitinum."

68. § 35 verður orðað soleiðis:
"**§ 35.** Um Skráseting Føroya metir, at vandi er fyri, at ein grannskoðari, eitt grannskoðanarvirki, ein fyritøka av almennum áhuga ella ein limur í evstu leiðslu ella grannskoðanarbólki í eini fyritøku av almennum áhuga hevur brotið ella fer at bróta eina skyldu í ella sambært hesi løgtingslóg ella Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden, kann Skráseting Føroya seta í verk og fremja eina kanning við tí fyri eyga at staðfesta, rætta ella forða einum slíkum broti. Hetta er ikki galdandi fyri eina váttan sambært § 1, stk. 3. Skrásetingin kann eisini seta í verk eina kanning, um hon

verður biðin um tað av einum málsførum útlendskum myndugleika, sbr. § 30, stk. 2, nr. 5.
Stk. 2. Skráseting Føroya kann eisini seta í verk og fremja eina kanning, sambært stk. 1, um Skrásetingin metir, at vandi er fyri, at ein fyritøka av almennum áhuga ella ein limur í evstu leiðslu ella grannskoðanarbólki í einari slíkari fyritøku hevur brotið ella fer at bróta reglur, sum seta í gildi ásetingarnar í artikli 37 og 38 í Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 2006/43EF om lovpligtig revision af årsregnskaber og konsoliderede regnskaber, sum broytt við direktivi 2014/56/EU.
Stk. 3. Skráseting Føroya kann harafturat seta í verk og fremja eina kanning sambært stk. 1, um tað í sambandi við eitt góðskueftirlit er staðfestur vandi fyri, at ein grannskoðari, eitt grannskoðanarvirki ella ein fyritøka av almennum áhuga ella ein limur í evstu leiðslu ella grannskoðanarbólki í slíkari fyritøku hevur brotið ásetingar, sum víst er til í stk. 1 og 2.
Stk. 4. Skráseting Føroya kann taka avgerð um at nýta uttanhýsis hjálp í sambandi við eina kanning sambært stk. 1-3.
Stk. 5. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um íverksetan og fremjan av kanningum sambært stk. 1-3."

69. Í § 36 verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Í sambandi við kanningar, sum hava við fyritøkur av almennum áhuga at gera, kann Skráseting Føroya krevja somu upplýsingar frá persónum, ið eru við í ella hava samband við grannskoðaran ella grannskoðanarvirkið, og frá øðrum pørtum, sum grannskoðari ella grannskoðanarvirki hava latið uppgávur upp í hendi."

70. § 38 verður orðað soleiðis:

"**§ 38.** Tá kanning er endað, tekur Skráseting Føroya støðu til, um úrslitið av kanningini gevur høvi til:
1) at kanningin verður endað uttan viðmerkingar,
2) at geva eina átalu,
3) at krevja, at brot skulu steðga,
4) at leggja grannskoðaran, grannskoðanarvirkið ella bæði fyri Grannskoðaranevndina, sambært § 41, ella
5) at leggja lim í evstu leiðslu ella grannskoðanarbólki í fyritøku av almennum áhuga, eina fyritøku av almennum áhuga ella bæði fyri Grannskoðaranevndina, sambært § 42 a.

Stk. 2. Skráseting Føroya almannakunngerð avgerðir eftir stk. 1, nr. 3, sambært § 44 a."

71. § 39 verður strikað.

72. Í § 40, stk. 1 verður aftan á "grannskoðarum" sett: "og limum í evstu leiðslu ella grannskoðanarbólki í eini fyritøku av almennum áhuga".

73. § 41, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Skráseting Føroya setur eina grannskoðaranevnd.
Grannskoðaranevndin hevur ein formann, ið skal vera løgfrøðingur, og í minsta lagi 4 aðrar limir, harav 2 limir skulu vera góðkendir grannskoðarar, og 2 limir skulu umboða roknskaparbrúkararnar.
Í minsta lagi ein av limunum, sum umboðar roknskaparbrúkararnar, skal hava leiðsluroyndir frá einari fyritøku av almennum áhuga. Fyri hvønn lim verður valdur ein varalimur.
Formaðurin, limirnir og varalimirnir verða tilnevndir av Skráseting Føroya, ið somuleiðis kann tilnevna ein ella fleiri løgfrøðingar sum næstformenn.
Formansskapurin og limirnir verða tilnevndir fyri eitt tíðarskeið, sum kann vera upp til 4 ár."

74. § 41, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Tá Grannskoðaranevndin viðger mál, sum viðvíkja løggildum grannskoðarum, skal, umframt formannin ella næstformannin, í minsta lagi luttaka 1 løggildur grannskoðari og 1 umboð fyri roknskaparbrúkararnar. Tá nevndin viðger mál viðvíkjandi skrásettum grannskoðarum, skal umframt formannin ella næstformannin í minsta lagi luttaka 1 skrásettur grannskoðari og 1 umboð fyri roknskaparbrúkararnar. Luttaka fleiri limir, skal talið av grannskoðarum samsvara við talið av umboðum fyri roknskaparbrúkararnar. Í málum, har rættindafrádøming, sbr. § 42, stk. 4 og 6, forboð, sbr. § 42, stk. 3, ella treytað frádøming, sbr. § 44, stk. 2, kann koma upp á tal, skulu umframt formannin, altíð vera í minsta lagi 2 løggildir grannskoðarar ávikavist 2 skrásettir grannskoðarar og eitt samsvarandi tal av limum, umboðandi rokskaparbrúkararnar, við í viðgerðini. Tá ið mál er til viðgerðar, har rættindafrádøming kann koma upp á tal, verða varalimirnir bidnir um at vera við í viðgerðini.
Grannskoðaranevndin kann bert taka avgerð um rættindafrádøming, forboð ella treytaða frádøming, um kærari í sambandi við málið hevur eina slíka revsing sum málkrav."

75. Í § 41, stk. 3, 2. pkt. verður "42, stk. 2, 2. pkt." broytt til: "§ 42, stk. 4, 2. pkt."

76. Í § 41, stk. 4 verður "§ 42, stk. 4, 3. pkt." broytt til: "§ 42, stk. 6, 4. pkt."

77. § 41, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Grannskoðaraeftirlitið ella Skráseting Føroya kann skjóta eitt grannskoðanarvirki inn fyri Grannskoðaranevndina, um tað í sambandi við ávikavist góðskueftirlit, sambært § 27, ella eina kanning, sambært § 35, eru funnir skeivleikar ella manglar hjá virkinum, sum verða mettir at geva orsøk til, at málið verður lagt fyri nevndina, herundir skyldur virkisins, sbr. § 14 a, stk. 1 og 4 og § 22, stk. 5, ikki hevur eina góðskustýringarkipan, sbr. §§ 26 og 26 a, ella tað annars í sambandi við eitt grannskoðaraeftirlit ella eina kanning eru funnir feilir ella manglar hjá fyritøkuni, sum verða mettir at geva orsøk til, at málið verður lagt fyri nevndina. Grannskoðaranevndin kann viðgera eina kæru, sum er skotin inn fyri nevndina eftir 1. pkt. ella eftir stk. 4 uttan mun til, um grannskoðanarvirkið enn hevur góðkenningina sambært § 13, tá kæran verður latin inn."

78. Í § 41, stk. 6, 2. pkt. verður ", Felagið fyri skrásettar grannskoðarar" strikað.

79. Í § 41, stk. 6 verður aftan á 3. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Umframt at nokta at viðgera eina kæru eftir 1. pkt. kann Grannskoðaranevndin ella formaðurin nokta at viðgera eina kæru, ið ikki er fevnd av málsføri nevndarinnar, ella er latin inn ov seint."

80. § 41, stk. 7 verður strikað.
Stk. 8 verður eftir hetta stk. 7.

81. Í § 42, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Setur ein grannskoðari til síðis tær skyldur, ið fylgja við starvinum, og verður hetta gjørt serliga grovt, kann Grannskoðaranevndin hækka sektina til upp í 600.000 kr."

82. Í § 42 verður aftan á stk. 1 sum nýggj stk. sett:
"*Stk. 2.* Um ein grannskoðari er sekur í grovum ella ofta endurtakandi vansketni í sambandi við útinnan av sínum virksemi, kann Grannskoðaranevndin frádøma góðkenningina sum grannskoðari

treytað. Frádømingin verður treytað av, at viðkomandi í eini royndartíð upp á 5 ár frá tí, at Grannskoðaranevndin tekur avgerðina, ikki setur til síðis góðan grannskoðanarsið undir slíkum umstøðum, at viðkomandi eftir eini heildarmeting skal verða frádømdur góðkenningina. Leggur grannskoðarin, í seinasta lagi 4 vikur eftir avgerð Grannskoðaranevndarinnar, avgerðina fyri rættin, og verður treytaða frádømingin staðfest, verður royndartíðin roknað frá endaligum dómi. Við einari treytaðari frádøming verður ásetingin av frádømingartíðini útsett. Kann grannskoðarin av nýggjum í royndartíðini frádømast góðkenningina, ásetur Grannskoðaranevndin eina felags frádøming í hesum nýggja málinum og fyrr avgjørda málinum.
Stk. 3. Um ein grannskoðari er sekur í grovum ella ofta endurtakandi vansketni í sambandi við eina grannskoðan ella í starvi í einum grannskoðanarvirki, kann Grannskoðaranevndin geva forboð fyri, at viðkomandi í upp í 3 ár fremur ella røkir eina ella fleiri av hesum uppgávum:
1) fremur ella hevur eftirlit við grannskoðan,
2) røkir uppgávur í einum grannskoðanarvirki, og
3) røkir uppgávur í eini fyritøku av almennum áhuga."

Stk. 2-7 verða eftir hetta stk. 4-9.

83. § 42, stk. 2, 3. pkt., sum verður stk. 4, 3. pkt., verður orðað soleiðis:
"Í avgerðini leggur Grannskoðaranevndin avgerandi dent á, at grannskoðarin, sbr. § 15, stk. 1, er álitisumboð hjá almenninginum."

84. Í § 42, stk. 4, sum verður stk. 6, verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Er ábyrgd grannskoðanarvirkisins eftir § 41, stk. 5, ella medábyrgdin fyri, at grannskoðarin ikki hevur hildið sínar skyldur, sambært stk. 1, av serliga grovum slagi, kann Grannskoðaranevndin hækka sektina upp í 1.500.000 kr."

85. § 42, stk. 4, 4. pkt., sum verður stk. 6, 5. pkt., verður strikað.

86. § 42, stk. 6, sum verður stk. 8, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 8.* Avgerðir hjá Grannskoðaranevndini verða almannakunngjørdar, sambært § 44 c."

87. Í § 42, stk. 7, sum verður stk. 9, verður "stk. 1 og 4" broytt til: "stk. 1 og 6".

88. Í § 42 verður sum stk. 10 sett:
"*Stk. 10.* Í avgerðum eftir stk. 3 og 4 og stk. 6, 4. pkt. skal upplýsast, at avgerðin, sambært § 49, kann verða løgd fyri rættin og um freistina fyri hesum."

89. Aftan á § 42 verður sett:
"**§ 42 a.** Grannskoðaranevndin viðger klagur um brot á skyldurnar sambært hesi løgtingslóg ella Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden, ið áliggja fyritøkum av almennum áhuga, ella limum í evstu leiðsluni ella grannskoðanarbólkinum í slíkum fyritøkum. Á sama hátt viðger Grannskoðaranevndin klagur um brot á skyldurnar, ið áliggja fyritøkum av almennum áhuga, ella limum í evstu leiðsluni ella grannskoðanarbólkinum í slíkum fyritøkum sambært reglum, sum seta í gildi art. 38 í Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 2006/43EF om lovpligtig revision af årsregnskaber og konsoliderede regnskaber, sum broytt við direktivi 2014/56/EU.
Stk. 2. Tá Grannskoðaranevndin viðger mál, ið eru fevnd av stk. 1, skal, umframt formannin ella

næstformannin, eisini luttaka í minsta lagi 1 løggildur grannskoðari og 1 umboð fyri roknskaparbrúkararnar, ið hevur leiðsluroyndir frá fyritøku av almennum áhuga. Um fleiri limir luttaka skal talið av grannskoðarum svara til talið av umboðum fyri roknskaparbrúkararnar. Í málum, har talan kann gerast um at geva forboð, sbr. § 42 b, stk. 2, skulu umframt formannin ella næstformannin eisini í minsta lagi 2 løggildir grannskoðarar luttaka. Grannskoðaranevndin kann einans taka avgerð um at geva forboð, um klagarin í sambandi við viðgerðina av málinum hevur sum málskrav, at henda revsingin verður nýtt.
Stk. 3. Klagurætt hava Grannskoðaraeftirlitið, Skráseting Føroya, Tryggingareftirlitið, Fíggjareftirlitið ella tann, sum hevur rættarligan áhuga í teimum viðurskiftum, sum klagan viðvíkur. Hevur klagari ikki ein rættarligan áhuga, ella verður ein klaga frammanundan mett ógrundað, kann Grannskoðaranevndin ella formaðurin vísa klaguna frá sær. Tað sama er galdandi fyri klagur, sum ikki eru innan málsræði nevndarinnar ella eru latnar inn ov seint. Hevur Skráseting Føroya ella annar almennur myndugleiki latið klaguna inn, skal nevndin viðgera klaguna, uttan so, at klagan ikki er fevnd av málsræði nevndarinnar, ella er latin inn ov seint.

§ 42 b. Grannskoðaranevndin kann geva einari fyritøku av almennum áhuga ella einum limi í evstu leiðsluni ella grannskoðanarbólkinum í eini fyritøku, sum hevur framt brot á skyldur sambært hesi løgtingslóg ella Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden, eina ávaring ella geva eina sekt upp á í mesta lagi 300.000 kr. Tað sama er galdandi fyri brot á skyldurnar sambært reglum, sum seta í gildi art. 38 í Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 2006/43EF om lovpligtig revision af årsregnskaber og konsoliderede regnskaber, sum broytt við direktivi 2014/56/EU.
Stk. 2. Er ein persónur, sum er fevndur av stk. 1, funnin sekur í grovliga ella ferð eftir ferð at hava sett til síðis tær skyldur, sum eru nevndar í stk. 1, kann Grannskoðaranevndin geva forboð fyri, at viðkomandi í upp í 3 ár kann vera limur í einum ella fleiri av hesum liðum í eini fyritøku av almennum áhuga:
1) evstu leiðsluni,
2) stjórnini, ella
3) grannskoðanarbólkinum.

Stk. 3. Í eini avgerð sambært stk. 2 skulu upplýsingar vera um møguleikan fyri at krevja, at málið eftir § 49 verður lagt fyri rættin og um freistina í hesum sambandi.
Stk. 4. Bøtur, ið verða álagdar sambært stk. 1, kunnu heintast inn við panting."

90. § 43 verður orðað soleiðis:
"**§ 43.** Grannskoðaranevndin kann til eina og hvørja tíð eftir umsókn seta úr gildi eitt forboð sambært § 42, stk. 3, eina frádøming sambært § 42, stk. 4, ella eitt forboð sambært § 42 b, stk. 2.
Stk. 2. Er ein frádøming gjørd, til annað verður avgjørt, og sýtir nevndin eini umsókn sambært stk. 1 um úrgildissetan av frádømingini, kann grannskoðarin ávikavist grannskoðanarvirkið krevja, at avgerðin verður roynd í rættinum, um farin eru 5 ár eftir frádømingina og í minsta lagi 2 ár eftir, at góðkenningin seinast er noktað við dómi. § 42, stk. 10 og § 50 verða at nýta samsvarandi."

91. Aftan á § 43 verður sett:

"**§ 43 a.** Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri Grannskoðaranevndina, heruppií reglur

um rindan av gjaldi fyri at lata inn kæru, um fyrireiking av málunum, um at áseta fund, um luttøku partanna, viðurskifti, sum skulu hava týdning, tá revsing verður ásett umframt almannakunngering av avgerðum nevndarinnar. Gjald verður ikki kravt fyri kærur, sum Skráseting Føroya ella annar almennur myndugleiki leggur fyri nevndina eftir § 41, stk. 6, 2. og 3. pkt, ella eftir § 42 a, stk. 3."

92. Aftan á § 44, men áðrenn yvirskriftina yvir § 45, verður sett:

"*Almannakunngering*

§ 44 a. Skráseting Føroya almannakunnger á síni heimasíðu avgerðir, tiknar eftir § 38, stk. 1, nr. 3. Avgerðir um likamligar persónar verða anonymiseraðar innan almannakunngering.
Stk. 2. Skráseting Føroya almannakunnger á síni heimasíðu avgerðir, tiknar eftir § 8 a, stk. 4, nr. 2 og 3. Ein avgerð verður anonymiserað, tá hon ikki longur hevur virknað.
Stk. 3. Avgerðir um løgfrøðiligar persónar verða almannakunngjørdar við upplýsing um samleikan hjá løgfrøðiliga persóninum uttan so, at almannakunngering er ein álvarsom hóttan ímóti støðufesti á fíggjarligu markaðunum ella eini revsirættarligari kanning, sum er í gongd, ella almannakunngering hevur við sær ósamsvarandi stóran skaða.
Stk. 4. Samleikin hjá løgfrøðiligum persóni verður anonymiseraður 2 ár eftir, at avgerðin varð almannakunngjørd.
Stk. 5. Verður ein avgerð almannakunngjørd, áðrenn kærufreistin í § 48, stk. 1 er farin, ella verður avgerðin kærd til Vinnukærunevndina, skal í eini almannakunngerð, sambært stk. 1, 1. pkt., verða upplýst um støðuna og um úrslitið av kæruni til Vinnukærunevndina.

§ 44 b. Skráseting Føroya kann, tá tað verður mett hóskandi, almannakunngera, at ein kanning sambært § 35 verður ella er sett í gongd. Skráseting Føroya kann eisini almannakunngera úrslitið av eini kanning sambært § 38.
Stk. 2. Skráseting Føroya ger av, hvussu tað verður almannakunngjørt, sambært stk. 1. Almannakunngering fer fram á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya.

§ 44 c. Grannskoðaranevndin almannakunnger avgerðir, tiknar eftir § 42, stk. 1-4 og 6 og § 42 b, stk. 1 og 2.
Stk. 2. Avgerðir um likamligar persónar verða anonymiseraðar innan almannakunngering, tó undantikið í avgerðum um forboð sambært § 42, stk. 3 ella § 42 b, stk. 2, ella frádøming av góðkenning sambært § 42, stk. 4. Avgerðir sambært § 42, stk. 3 og 4, og § 42 b, stk. 2 verða anonymiseraðar, tá tíðin, revsitiltøkini skulu hava virknað, er farin, tó í seinasta lagi 5 ár eftir almannakunngeringina.
Stk. 3. Fyri avgerðir um løgfrøðiligar persónar verða § 44 a, stk. 3 og 4 nýttar samsvarandi. Avgerðir eftir § 42, stk. 6, 4. pkt., verða tó anonymiseraðar, tá tíðin, revsitiltakið skal hava virknað, er farið, tó í seinasta lagi 5 ár eftir almannakunngeringina.
Stk. 4. Verður avgerðin almannakunngjørd innan freistirnar í § 49, stk. 5 og § 49 a eru farnar, ella verður avgerðin løgd fyri rættin, skal almannakunngering, sambært stk. 1, innihalda upplýsing um støðu og úrslitið av rættarviðgerðini."

93. § 45, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Starvsfólk hjá Skráseting Føroya hava undir ábyrgd eftir §§ 152-152 e í revsilógini skyldu til at halda loyniligar trúnaðarupplýsingar, sum tey fáa kunnleika til í sínum eftirlitsarbeiði. Tagnarskyldan fevnir harumframt um

persónar, ið gera tænastuuppgávur fyri Skráseting Føroya, persónar, sum starvast við, og sum verða tiknir við í góðskueftirlitið, serkøn, ið virka vegna Skráseting Føroya, og persónar, ið eru við Skráseting Føroya, tá kanning verður gjørd, sambært § 37, stk. 4. Hetta er eisini galdandi eftir, at setanarviðurskiftini ella sáttmálaviðurskiftini eru hildin uppat."

94. § 45, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Hóast stk. 1 og 3, kunnu trúnaðarupplýsingar og skjøl latast víðari til:
1) Grannskoðaraeftirlitið og Grannskoðaranevndina, so hesi kunnu røkja sínar uppgávur sambært hesi løgtingslóg.
2) Fíggjareftirlitið og Tryggingareftirlitið, so hesi kunnu røkja sínar uppgávur sambært fíggjarlóggávuni og ársroknskaparlógini.
3) Aðrar almennar myndugleikar, heruppií ákæruvaldið og løgregluna, so hesi kunnu røkja sínar lógarásettu uppgávur.
4) Eftirlitsmyndugleikar fyri grannskoðarar og grannskoðanarvirkir í londum, sum Føroyar hava gjørt sínamillum avtalu við, ið hava ábyrgdina av eftirliti við góðkenning, skráseting, góðskueftirliti, kanningum og at reglur verða hildnar, við teirri treyt, at móttakararnir av upplýsingunum einans nýta hesar til tess at røkja sínar uppgávur.
5) Eftirlitsmyndugleikar fyri grannskoðarar og grannskoðanarvirkir í øðrum londum enn teimum, ið eru nevnd í nr. 4, til tess at røkja uppgávur innan alment eftirlit ella góðskueftirlit ella í samband við eina kanning, sbr. tó stk. 5 og 6."

95. § 45, stk. 7 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 7.* Hóast stk. 4 kunnu upplýsingar, sum Skráseting Føroya hevur fingið frá einum útlendskum málsførum myndugleika, einans latast víðari til Grannskoðaraeftirlitið, Grannskoðaranevndina og ákæruvaldið, uttan so at tann útlendski málsføri myndugleikin hevur játtað, at upplýsingarnar verða latnar øðrum."

96. Í § 45 verða sum stk. 8 og 9 sett:
"*Stk. 8.* Øll, sum fáa upplýsingar frá Skráseting Føroya sambært stk. 4, nr. 1-3 hava tagnarskyldu eftir stk. 1 í mun til hesar upplýsingar.
Stk. 9. Tað er ikki loyvt starvsfólki hjá Skráseting Føroya at geva upplýsingar víðari um ein persón, sum hevur fráboðað, at ein fyritøka ella ein persónur hevur ella møguliga hevur framt brot á grannskoðaralóggávuna ella Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden."

97. Í § 47, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Gjaldið fyri góðskueftirlit kann verða ásett serstakt fyri ávikavist grannskoðarar, sum eru knýttir at grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga, og grannskoðarar, sum eru knýttir at øðrum grannskoðanarvirkjum."

98. § 48, stk. 1 og 2 verður orðað soleiðis:
"Avgerðir, sum Skráseting Føroya hevur tikið sambært løgtingslógini ella reglum, givnum við heimild í løgtingslógini, ella sambært Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden, kunnu verða lagdar fyri Vinnukærunevndina í seinasta lagi 4

vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.
Stk. 2. Avgerðir, tiknar sambært §§ 35-37, 44 a, stk. 3 og 44 b, stk. 1 og 2, kunnu tó ikki verða lagdar fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika."

99. Í § 49, stk. 1, 1. pkt. verður "§ 8, stk. 1, og § 42, stk. 2 og stk. 4, 3. pkt." broytt til: "§ 8, stk. 1, § 42, stk. 3 og 4 og stk. 6, 4. pkt. og § 42 b, stk. 2".

100. Í § 49 verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 4.* Áheitan um, at avgerð sambært § 42, stk. 3 verður løgd fyri rættin, hevur steðgandi virknað, men rætturin kann við úrskurði gera av, at viðkomandi, meðan málið verður viðgjørt, ikki kann grannskoða, røkja uppgávur í einum grannskoðanarvirki ella røkja uppgávur í eini fyritøku av almennum áhuga. Verður avgerðin hjá Grannskoðaranevndini við dóminum mett lóglig, kann í hesum verða ásett, at kæra ikki hevur steðgandi virknað."
Stk. 4 verður eftir hetta stk. 5.

101. Í § 49, stk. 4, 1. pkt., sum verður § 49, stk. 5, 1. pkt. verður "§ 42, stk. 2 og stk. 4, 3. pkt." broytt til: "§ 42, stk. 4 og stk. 6, 4. pkt."

102. Í § 49 verður sum stk. 6 sett:
"*Stk. 6.* Áheitan um, at avgerð sambært § 42 b, stk. 2 verður løgd fyri rættin hevur steðgandi virknað, men rætturin kann við úrskurði gera av, at viðkomandi, meðan málið verður viðgjørt, ikki kann vera nevndarlimur, vera í stjórnini ella í grannskoðanarbólkinum í eini fyritøku av almennum áhuga. Verður avgerðin hjá Grannskoðaranevndini við dóminum mett lóglig, kann í hesum verða ásett, at kæra ikki hevur steðgandi virknað."

103. Aftan á § 49 verður í kapittul 10 sett:
"**§ 49 a.** Avgerðir frá Grannskoðaranevndini skulu verða lagdar fyri rættin í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina. Rætturin kann í hendinga føri loyva, at avgerð verður løgd fyri rættin aftan á, at freistin er farin, um umsókn verður latin inn innan 6 mánaðir eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina. Verður loyvi givið eftir 2. pkt., skal avgerðin verða løgd fyri rættin innan 4 vikur eftir, at loyvið er givið.
Stk. 2. Stk. 1 er ikki galdandi fyri avgerðir um forboð ella frádøming sambært § 42, stk. 3 og 4 ella stk. 6, 4. pkt. ella § 42 b, stk. 2."

104. § 51, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður brot á § 5, § 9, stk. 1, § 11, stk. 1 og 2, 1. pkt., §§ 18, 20-22, 22 c, 24 og § 29, stk. 1, 1. pkt., stk. 4 og 6 revsað við sekt. Á sama hátt verður tann revsaður, sum fremur brot á artikkul 4, stk. 1 og 2, artikkul 5, stk. 1, artikkul 11, stk. 1 og 2, artikkul 15, stk. 1 og artikkul 17, stk. 7 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden."

105. Í § 51, stk. 2 og stk. 5 verður "bót" broytt til: "sekt".

106. Í § 51, stk. 4, 1. pkt. verður "bót, hefti ella fongsli í upp til 4 mánaðir" broytt til: "sekt ella fongsli upp í 4 mánaðir".

107. Í § 51 verða sum stk. 7 og 8 sett:
"*Stk. 7.* Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu verður ein persónur, sum ger ímóti einum forboði, sum er givið sambært § 8 a, stk. 4, nr. 2, § 42, stk. 3, ella § 42 b, stk. 2, revsaður við sekt.

Stk. 8. Fyrningarfreistin fyri brot á løgtingslógina ella fyriskipanir, ásettar sambært løgtingslógini, er 5 ár.”

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi tann 1. juli 2021, sbr. tó stk. 2.
Stk. 2. § 1, nr. 51 og nr. 52 koma í gildi 1. januar 2022.
Stk. 3. § 1, nr. 31 og 32 eru galdandi fyri grannskoðan av ársroknskapum o.a., hvørs roknskaparár byrjar 1. juli 2021 ella eftir hetta, um talan er um grannskoðan av ársroknskapum o.ø. hjá eini fyritøku av almennum áhuga, sbr. § 1, nr. 5.
Stk. 4. § 1, nr. 34 og nr. 35 eru galdandi fyri uppgávur, sum byrja 1. juli 2021 ella eftir hetta.
Stk. 5. Ásetingin í § 29, stk. 1, 5. pkt., sum ásett í § 1, nr. 56, er galdandi frá fyrstkomandi vanliga aðalfundinum ella øðrum samsvarandi fundi, sum verður hildin eftir 31. desember 2021.
Stk. 6. Ásetingin í § 8 a, stk. 3, sum ásett í § 1, nr. 14, er ikki galdandi fyri váttanir sambært § 1, stk. 2 í grannskoðaralógini, sum eru givnar innan 1. juli 2021. Fyri hesar váttanirnar eru higartil galdandi reglur galdandi.
Stk. 7. Ásetingarnar í § 42, stk. 1, 2. pkt., § 42, stk. 2-4, § 42, stk. 6, 2. pkt., sum ásett í § 1, nr. 81-84 eru galdandi fyri brot, sum verða framd eftir gildiskomu løgtingslógarinnar.
Stk. 8. § 1, nr. 107 er galdandi fyri brot á lóggávuna, sum er farið fram, áðrenn løgtingslógin kemur í gildi uttan so, at málið eftir higartil galdandi reglum er fyrnað, tá løgtingslógin kemur í gildi.
Stk. 9. Eitt grannskoðanarvirki, sum grannskoðar ársroknskapir o.a. fyri fyritøkur, ið eru fevndar av § 1 a, stk. 1, nr. 3, sambært § 1, nr. 5 í uppskotinum, skal fyri roknskaparár, sum byrja áðrenn 1. juli 2021, innan 3 mánaðir eftir, at roknskaparárið er endað, almannakunngera eina árliga frágreiðing um gjøgnumskygni á heimasíðu virkisins. Leiðslan við evstu ábyrgd av grannskoðanarvirkinum hevur ábyrgd av innihaldinum í frágreiðingini, sum skal innihalda:

1) Eina lýsing av løgfrøðiliga bygnaðinum og ognarviðurskiftunum.
2) Eina lýsing av leiðslubygnaðinum í grannskoðanarvirkinum.
3) Um grannskoðanarvirkið er partur av einum netverki, skal ein lýsing gerast av netverkinum og rættarligu og bygnaðarligu avtalunum millum grannskoðanarvirkið og netverkið.
4) Upplýsingar um grundarlagið fyri samsýningini til partnarar.
5) Eina lýsing av innanhýsis góðskustýringarskipanini hjá grannskoðanarvirkinum, herundir um politikk fyri ávíkavist óheftni og eftirútbúgving.
6) Tilskila, nær seinasta góðskueftirlitið varð gjørt, sbr. § 27 í grannskoðaralógini.
7) Eina váttan frá evstu leiðsluni í grannskoðanarvirkinum um, hvørt góðskueftirlitsskipanin virkar nóg væl og politikkurin um óheftni verður yvirhildin.
8) Roknskaparupplýsingar, sum vísa støddina á grannskoðanarvirkinum, herundir samlaða umsetningin býttur sundur á samsýningar fyri grannskoðan av roknskapum, samsýningar fyri aðrar váttanaruppgávur við trygd, skattaráðgeving og aðrar veitingar.
9) Eitt yvirlit yvir fyritøkur, fevndar av grannskoðaralógarinnar § 1 a, stk. 1, nr. 3, sum ásett í § 1, nr. 5 í uppskotinum, sum grannskoðanarvirkið í undanfarna roknskaparári hevur útint uppgávur fyri eftir § 1, stk. 2 í grannskoðaralógini.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsøkir til uppskotið

Grannskoðaraøkið er undir tættari altjóða regulering og regulering í ES. Lóggávan í Føroyum og í grannalondunum á hesum øki er tí rættiliga eins. Føroyska grannskoðaralógin er grundað á donsku grannskoðaralógina, sum aftur er grundað á ES-lóggávu, herundir 8. vinnufelagadirektivið hjá ES um lógarálagda grannskoðan av ársroknskapum og konsolideraðum roknskapum.

Altjóðagerðin førir við sær, at føroyska lóggávan á grannskoðaraøkinum má fylgja altjóða gongdini, um føroyskir grannskoðarar framhaldandi skulu kunna átaka sær uppgávur fyri føroyskar fyritøkur, sum virka á altjóða stigi (t.e. fíggjarfyritøkur og fyritøkur, skrásettar á virðisbrævaskálum).

Síðan 2015 eru ongar broytingar gjørdar í føroysku grannskoðaralógini, og tí verður føroyska lóggávan á grannskoðaraøkinum nú dagførd, so hon er á støði við lóggávuna í ES, heruppií Danmark.

Í sambandi við fíggjarkreppuna síðst í 00'unum varð m.a. spurningur settur við, um óheftni hjá grannskoðarum var nóg væl tryggjað, og um grannskoðaraváttanir høvdu nóg nógvar og rættar upplýsingar. Við støði í hesum setti ES-kommissiónin í 2010 í verk eina endurskoðan av reglunum á grannskoðaraøkinum, sum kundi styrkja leiklutin hjá grannskoðaranum sum álitisumboðið hjá almenninginum.

Arbeiðið við endurskoðanini og nýtímansgerðini av ES-grannskoðaralóggávuni snúði seg serstakliga um: Leiklut grannskoðarans, óheftni, økt eftirlit og økta kapping á grannskoðanarmarknaðinum.

ES-kommissiónin legði tann 30. november 2011 fram uppskot til broytingar í 8. vinnufelagadirektivinum um lógarálagda grannskoðan av ársroknskapum og konsolideraðum roknskapum. ES-kommissiónin legði samstundis fram eitt nýtt uppskot til fyriskipan um serstøk krøv til lógaráløgdu grannskoðanina av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyritøkum).

Høvuðsgrundgevingarnar fyri at leggja hesi uppskot fram vóru: Betri grannskoðan, meiri upplýsandi grannskoðanarfrágreiðingar umframt størri óheftni, ið skal styrkja álitið á roknskapirnar hjá fyritøkunum.

Tann 16. apríl 2014 samtykti ES-tingið og Ráðið broytingarnar í 8. vinnufelagadirektivinum og ES-fyriskipanina. Talan er um direktiv 2006/43/EF frá Europa-tinginum og Ráðnum um lógarálagda grannskoðan av ársroknskapum og konsolideraðum roknskapum, sum broytt við direktivi 2014/56/EU t.e. 8. vinnufelagadirektivið hjá ES, og fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga.

Limalondini í ES fóru hereftir undir at seta broytingarnar í 8. vinnufelagadirektivinum í gildi. Í direktivinum eru reglur um innanhýsis organisatiónina í grannskoðanarvirkjum, fyrireikingarnar hjá grannskoðarum av grannskoðanini og um at leggja grannskoðanararbeiðið til rættis. Harafturat eru ásetingar um at styrkja óheftni í almenna eftirlitinum við grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum, t.d. kunnu góðkendir

grannskoðarar nú ikki luttaka í leiðsluni av almenna eftirlitinum. Eisini eru nú ásetingar um, at góðskueftirlitið við grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum í størri mun byggir á váðametingar, og er krav sett um varskógvaraskipan á grannskoðanarvirkjum og í almenna eftirlitinum.

Í ES-fyriskipanini, sum kom í gildi beinleiðis í limalondunum, og tí ikki skal setast í gildi við nationalari lóggávu í ES-londunum, eru serstakar ásetingar um óheftni í sambandi við grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyritøkum). Í ES-fyriskipanini eru avmarkingar ásettar fyri, hvørjar aðrar tænastur enn grannskoðan, grannskoðarar kunnu veita. Krav verður sett um, at PIE-fyritøkur skulu útbjóða í sambandi við grannskoðaraskifti og skulu skifta grannskoðanarvirki, tá ávíst tíðarskeið er runnið.

Við hesum uppskoti verður skotið upp at broyta grannskoðaralógina soleiðis, at hon verður í samsvari við 8. vinnufelagadirektivið, og samstundis verður lagt fram eitt lógaruppskot um at seta í gildi nevndu fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (grannskoðaralógin) kom í gildi tann 1. juli 2009. Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið (løgtingsmál 148/2008) stendur m.a., at uppskotið hevur til endamáls at tryggja, at tann førleiki, sum eyðkennir føroyskar grannskoðarar, verður varðveittur og mentur, og á allan hátt nøktar tey krøv, sum fara at verða sett á bæði ES-stigi og á altjóða stigi. Lógaruppskotið er einsljóðandi og danska grannskoðaralógin, t.e. lov nr. 468 frá 17. juni 2008 om godkendte revisorer og revisionsvirksomheder (revisorloven) við seinni broytingum.

Síðani 2009 er grannskoðaralógin broytt tríggjar ferðir - í 2011, 2012 og 2015. Grannskoðaralógin byggir framhaldandi á donsku grannskoðaralógina.

Tá grannskoðaralógin kom í gildi í 2009 var eitt av endamálunum at betra góðskuna á arbeiðinum hjá grannskoðarum. Eitt nú varð ásett krav um, at allir grannskoðarar skulu luttaka í eftirútbúgving og reglur vórðu ásettar um størri upplýsingarskyldu millum fráfarandi og nýggja grannskoðaran. Eisini varð almenna eftirlitsskipanin við grannskoðarum styrkt, og reglur vórðu ásettar um, at børsskrásettar fyritøkur og fíggjarfyritøkur skuldu hava ein grannskoðanarbólk. Krøvini til óheftni grannskoðarans vórðu eisini herd, og heimild varð ásett til at seta reglur í gildi um “selvrevision” og egin áhugamál í sambandi við grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga, m.a. forboð móti at veita ávísar ikki-grannskoðanartænastur til hetta slagið av viðskiftafólkum. Reglurnar um góðskueftirlit við grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga, vórðu eisini herdar m.a. við at krevja títtari eftirlit.

Í 2015 vórðu týðandi broytingar gjørdar í grannskoðaralógini, tá ásetingarnar um góðskueftirlit við grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga, vórðu broyttar. Endamálið var at herða krøvini til óheftni í sambandi við eftirlit á hesum grannskoðanarvirkjunum soleiðis, at lóggávan kundi liva upp til krøv frá ES. Skráseting Føroya fekk heimild til at gera avtalu við danska Erhvervsstyrelsen um samstarv soleiðis, at góðskueftirlitsfólk hjá Erhvervsstyrelsen kundu virka sum eftirlitsfólk á føroyskum grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga. Talan er um eftirlitsfólk, sum starvast í Erhvervsstyrelsen, ið gera eftirlitið vegna Grannskoðaraeftirlitið. Á

tann hátt varð tryggjað, at eftirlitsfólkini eru púra óheft av føroysku grannskoðaravinnuni, og at skipan av góðskueftirlitinum er í samsvari við áltjóða reglur og standardar. Eftirlitið verður gjørt vegna Grannskoðaraeftirlitið, og tað er Grannskoðaraeftirlitið, sum tekur avgerð, tá úrslitið av eftirlitinum fyriliggur.

Við broytingunum í lógini í 2015 fór eisini fram ein nútímansgerð av grannskoðaraútbúgvingini. Harafturat varð sett í gildi ein skipan, har grannskoðarar, sum ynskja at grannskoða fíggjarfyritøkur, skulu hava serstaka góðkenning fyri at útinna hetta arbeiðið. Krav varð sett um, at grannskoðarin hevur nakað av royndum við og vitan um ávísa slagið av fíggjarfyritøku, tí hetta verður mett at betra um góðskuna á grannskoðanini í fíggjarfyritøkunum.

Harafturat varð ásetingin í lógini, sum nágreinar hugtakið "fyritøkur av almennum áhuga" broytt. Tað eru bert tey sløgini av fyritøkum, sum sambært ES hoyra undir hetta hugtakið, t.e. børsskrásettar fyritøkur og fyritøkur, ið eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum og Tryggingareftirlitinum. Kommunur og almenn partafeløg, sum upprunaliga eisini vóru fevnd av hugtakinum í grannskoðaralógini, vórðu nú strikað úr ásetingini.

Sostatt er grannskoðaralóggávan leypandi broytt í mun til tær avbjóðingar, sum gjøgnum tíðina hava víst seg bæði her í landinum, í ES og altjóða.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at tryggja, at føroysk lóggáva á grannskoðaraøkinum er á støði við lóggávuna í londum, sum vit vanliga samanbera okkum við og í samsvari við ES-reglur.

Við hesum uppskoti verður fyrst av øllum skotið upp at dagføra føroysku grannskoðaralóggávuna, so hon verður í samsvari við í direktiv 2006/43/EF frá Europa-tinginum og Ráðnum um lógarálagda grannskoðan av ársroknskapum og konsolideraðum roknskapum (8. vinnufelagadirektivið), sum broytt við direktivi 2014/56/EU.

Harafturat er endamálið at tillaga grannskoðaralógina soleiðis, at hon er í samsvari við fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga.

Samstundis sum hetta uppskotið verður lagt fyri Løgtingið, verður eisini uppskot um at seta fyriskipan nr. 537/2014/EU frá 16. apríl 2014 í gildi í Føroyum lagt fyri Løgtingið. Lagt verður upp til, at ávísar reglur um grannskoðan t.e. reglur, sum snúgva seg um grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyritøkum), frameftir partvís verða at finna í ES-fyriskipanini og partvís í grannskoðaralógini.

Ansað verður eftir, at tað ikki verða settar reglur í gildi í Føroyum, sum eru meiri tyngjandi enn ES-reglur leggja upp til. Skotið verður upp, at ávísar reglur, sum í dag eru meiri tyngjandi fyri vinnuna enn neyðugt, verða settar úr gildi.

Tað verður samanumtikið mett, at uppskotið hevur við sær, at grannskoðanin verður betri, grannskoðarafrágreiðingarnar verða meiri upplýsandi og álitið hjá almenninginum á grannskoðaraváttanirnar verður betri, samstundis sum reglur, sum eru óneyðuga avmarkandi og tyngjandi, verða strikaðar.

Uppskotið er gjørt við fyrimynd í:

- Forslag til lov om ændring av revisorloven og forskellige andre love LF 146/2015 (Lov nr. 631 af 08/06/2016) og betænkning til lovforslag BTL 2015/146.
- § 13 í forslag til lov om finansiel virksomhed og forskellige andre love LF 39/2016.
- § 2 í forslag til lov om ændring af årsregnskabsloven, revisorloven m.v. LF 99/2018.

Í serligu viðmerkingunum til hetta uppskotið verður víst til serligu viðmerkingarnar í LF 146/2015 í teimum førunum, har ásetingarnar í hesum uppskoti samsvara við ásetingarnar í LF 146/2015. Hetta uppskotið er tí viðlagt sum fylgiskjal 2.

1.3.1 Ítøkiliga um innihaldið í uppskotinum

1.3.1.1 Fyritøkur av almennum áhuga (PIE-fyritøkur)
Ásett er í § 19, stk. 3 í galdandi grannskoðaralóg, hvørjar fyritøkur er fevndar av hugtakinum "fyritøka av almennum áhuga" (PIE-fyritøka). Sambært ásetingini eru serstøk krøv galdandi viðvíkjandi upplýsingum í grannskoðanarprotokollini hjá PIE-fyritøkum. Har tað í lógini eru ásettar serstakar skyldur o.a. viðvíkjandi grannskoðan av PIE-fyritøkum er ásett, at skyldan viðvíkur fyritøkum sambært § 19, stk. 3.

Ásetingin í § 19, stk. 3 varð broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015 soleiðis, at fyritøkur, sum ikki eru fevndar av hugtakinum "PIE-fyritøka" í 8. vinnufelagadirektivinum hjá ES, vórðu strikaðar úr ásetingini. Á tann hátt er tryggjað, at tað í føroyskari lóggávu ikki verða ásettar strangari reglur fyri føroysk grannskoðanarvirkir og viðskiftafólkini hjá føroyskum grannkoðanarvirkjum enn ES-reglurnar áseta.

Sambært ásetingini í § 19, stk. 3 í galdandi grannskoðaralóg eru hesar fyritøkur PIE-fyritøkur:

- Virkir, ið hava virðisbrøv, ið verða handlað á einum skipaðum marknaði í einum ES-landi ella einum EBS-landi, og
- virkir, ið eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum ella Tryggingareftirlitinum, tó ikki virkir, ið fáast við tryggingarmeklaravirksemi sambært § 42 í lógini um tryggingarvirksemi og reglum, settar í gildi við heimild í hesi, og virkir, ið eru fevnd av kapitli 20 a (íløguráðgevar) í fyriskipan om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed.

Ásetingin er harvið í samsvari við nágreiningina av hugtakinum "PIE-fyritøka" í 8. vinnufelagadirektivinum hjá ES, har hesar fyritøkur eru fevndar av hugtakinum "PIE-fyritøka": Børsskrásettar fyritøkur, kreditinstitutt, tryggingarfeløg og fyritøkur, sum einstøku londini nágreina sum PIE-fyritøkur.

Skotið verður nú upp at strika § 19 úr grannskoðaralógini, tí við uppskoti, sum verður lagt fram samstundis sum hetta lógaruppskot, verður skotið upp, at ES-fyriskipan nr. 537/2014/EU verður sett í gildi í Føroyum. Av tí, at hugtakið "PIE-fyritøka" er nágreinað í nevndu ES-fyriskipan, sum snýr seg um grannskoðan av hesum fyritøkum, er eingin orsøk til at hava eina nágreining, sum hana í galdandi § 19 í grannskoðaralógini longur.

Orsakað av ES-fyriskipan nr. 537/2014/EU og broytingunum i 8. vinnufelagadirektivinum, sum vórðu gjørdar í 2014, verða fleiri skyldur nú álagdar í ES í sambandi við grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyritøkum).

Um ein fyritøka er fevnd av hugtakinum "fyritøka av almennum áhuga" í 8. vinnufelagadirektivinum er øll ES-fyriskipan nr. 537/2014/EU galdandi fyri grannskoðan av fyritøkuni. Krøvini í fyriskipanini viðføra munandi strangari reglur fyri PIE-fyritøkur og fyri grannskoðan av fyritøkunum, sum eru fevndar av hugtakinum "PIE-fyritøka". Lagt verður upp til, at sama skipan verður galdandi í Føroyum.

Verður ES-fyriskipanin sett í gildi í Føroyum merkir hetta, at herd krøv verða sett í gildi viðvíkjandi óheftni hjá grannskoðarum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga, herundir krav um tvungna rotatión av grannskoðanarvirkjum, reglur um ráðgevingartænastur útyvir grannskoðan, og eitt mark fyri nøgdini av ráðgevingartænastum til grannskoðanarkundar.

Eftir uppskotinum verða ávísar reglur, sum bert viðvíkja grannskoðan av PIE-fyritøkum, strikaðar úr grannskoðararlógini, tí hesar eru nú í ES-fyriskipanini m.a. kravið um frágreiðing um gjøgnumskygni og rotatión.

1.3.1.2 Góðkenning, fyrireiking og framhald av eini uppgávu
Í galdandi grannskoðaralóg eru, umframt ásetingarnar um støðutakan til óheftni, ongar neyvar ásetingar um fyrireiking ella góðkenning grannskoðarans ella grannskoðanarvirkisins av eini grannskoðan ella um framhald av eini grannskoðanaruppgávu. Tó eru ásetingar í lógini um m.a. meting av hóttanum móti óheftni ella viðurskiftum viðvíkjandi skipan av arbeiðinum sum t.d. krøv til skjalfestan av váttanum grannskoðarans.

Við nýggju ásetingini í § 14 a í uppskotinum verður skotið upp at áseta krøv til góðkenning og framhald av eini grannskoðanaruppgávu. Krøvini til, hvussu arbeiðið skal skipast, verða ásett í kunngerð.

Í serligu viðmerkingunum í uppskotinum verður greitt frá teimum tiltøkum, sum grannskoðanarvirkið skal gera, áðrenn virkið góðkennir ella heldur fram við eini lógarálagdari grannskoðan, her undir serstakliga viðvíkjandi hóttanum móti óheftni og teimum trygdarfyriskipanum, sum eru gjørdar fyri at svara hesum hóttanum aftur.

Eitt grannskoðanarvirki skal, áðrenn tað tekur á seg ella heldur fram við eini grannskoðanaruppgávu, meta um og skjalprógva, at virkið ikki átekur sær eina uppgávu, um tað ikki hevur neyðugu tíðina, arbeiðsmegina ella skikkað starvsfólk til at útinna uppgávuna rætt. Afturat hesum verður ásett eitt krav um, at grannskoðanarvirkið skal tryggja, at grannskoðarin er góðkendur til at veita eina grannskoðanarátekning á roknskapin.

Skotið verður upp, at hesar reglurnar í § 14 a einans verða galdandi fyri lógarálagda grannskoðan, og ikki fyri aðrar váttanir við trygd - eitt nú víðkaða gjøgnumgongd, vinnufelagarættarligar váttanir o.a. Tó verða reglurnar um óheftni, her undir um hóttanir móti óheftni grannskoðarans og grannskoðanarvirksins, eins og higartil eisini galdandi fyri aðrar váttanaruppgávur við trygd.

Sambært 8. vinnufelagadirektivinum kunnu meiri einføld krøv verða sett í gildi fyri góðkenning og framhald av grannskoðanaruppgávum í smærri fyritøkum. Sambært ES-

direktivinum kunnu reglur verða ásettar um fyrireiking av eini grannskoðanaruppgávu, har grannskoðanarstandardar verða nýttir meiri lutfalsliga.

Í galdandi áseting í § 15 í grannskoðaralógini er heimild til, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um etikk, um at gera grannskoðanaruppgávur og grannskoðarans veitan av váttanum, heruppií ummælir frá grannskoðara um leiðslufrágreiðingar sambært ársroknskaparlógini, og um at gera váttanaruppgávur við trygd og aðrar váttanir við trygd.

Landsstýrismaðurin hevur ásett nærri reglur við kunngerð nr. 123 frá 26. juli 2019 um grannskoðaraváttanir o.a. Í kunngerðini eru ásettar reglur um grannskoðanarátekningar, her undir úttalilsi um leiðslufrágreiðingar og um veitan av øðrum váttanum við trygd. Harafturat eru ásettar reglur um váttanarstandard fyri smærri virkir.

Skotið verður nú upp at gera eina nágreining í ásetingini soleiðis, at landsstýrismaðurin, umframt at seta í gildi nationalar reglur og standardar um etikk, fremjan og veitan av grannskoðanarátekningum v.m. og seta í gildi altjóða standardar, undir hesum lutfalsliga nýtslu av standardum í sambandi við grannskoðan av smærri virkjum, eisini kann áseta krøv og standardar viðvíkjandi fyrireiking og fremjan av grannskoðanaruppgávum.

Eftir uppskotinum verða linari krøv galdandi fyri grannskoðan av smærri virkjum t.d. í sambandi við góðkenning og framhald av eini grannskoðanaruppgávu. Tá reglur verða ásettar um eitt nú skyldir grannskoðarans at skráseta brot, her undir um átøk, sum eru gjørd í sambandi við hesi brot og viðvíkjandi broytingum í góðskustýringsskipanini, verða linari reglur ásettar fyri grannskoðanarvirki, ið grannskoða smærri fyritøkur.

Persónskarin verður víðkaður, sum grannskoðarin, ið tekur við, hevur skyldu til at venda sær til. Nágreinað verður, at grannskoðarin, sum tekur við, hevur skyldu til at venda sær til grannskoðaran, sum fer frá. Um grannskoðarin, sum fer frá, ikki er tann grannskoðarin, sum hevur givið ta seinastu váttanina á ársroknskapin v.m., skal grannskoðarin, sum tekur við, eisini venda sær til tann grannskoðaran, sum hevur givið ta seinastu váttanina.

Skotið verður upp, at tað verða gjørdar nakrar nágreiningar og nýggj krøv fyri grannskoðarar í samtøkum, heruppií at arbeiðsskjølini hjá einum samtaksgrannskoðara skulu skjalprógva, at aðrir grannskoðarar hava givið sítt samtykki til, at viðkomandi skjalprógv fyri grannskoðanini kunnu latast víðari. Nágreiningarnar eru samsvarandi nýggju reglunum í ES-direktivinum.

1.3.1.4 Frágreiðingar grannskoðarans
Sambært grannskoðaralógini hava grannskoðarar í sambandi við virksemið eina røð av rapporteringsskyldum. Sambært § 17 í galdandi lóg skal grannskoðarin geva eina grannskoðanarátekning á roknskapin, tá grannskoðarin er liðugur við grannskoðanina. Nærri reglur um innihaldið í grannskoðanarátekningini eru ásettar í váttanarkunngerðini t.e. kunngerð nr. 123 frá 26. juli 2019 um grannskoðaraváttanir o.a.

Krøvini til grannskoðanarátekningina og innihaldið í henni eru ásett samsvarandi 8. vinnufelagadirektivinum hjá ES og eftir roknskapardirektivum frá ES.

Sambært § 18 í galdandi lóg skal grannskoðarin føra eina grannskoðanarprotokoll, tá grannskoðað verður. Kravið um grannskoðanarprotokoll er ikki eitt krav sambært ES-reglum ella altjóða reglum.

Harafturat eru í galdandi lóg reglur um skyldu grannskoðarans at fráboða løgregluni, tá illgruni er um brotsverk av fíggjarligum slag. Fráboðanarskyldan um fíggjarlig brotsverk varð ásett sum eitt ískoyti til lóggávuna um hvítvask soleiðis, at eisini onnur sløg av fíggjarligum brotsverkum, sum grannskoðarin verður varugur við, eru fevnd av fráboðanarskyldu grannskoðarans.

Nýggju ES-reglurnar seta broytt krøv og nýggj krøv til rapporteringsskyldu grannskoðarans. Kravt verður nú, at tað verður gjørd ein felags grannskoðanarátekning í teimum førum, har fleiri grannskoðarar eru valdir at grannskoða, eins og krav eisini verður sett um, at tað altíð skal verða upplýst um møguliga týðandi óvissu um framhaldandi rakstur (going concern). Sambært ES-fyriskipanini, sum er til viðgerðar, samstundis sum hetta uppskotið, verður harumframt kravd ein røð av upplýsingum í grannskoðanarátekningini, um talan er um grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyritøkur).

Kravið um at geva felags grannskoðanarátekning verður nú ásett í grannskoðaralógini, meðan tey neyvari ásettu krøvini til innihaldið í grannskoðanarátekningini verða sum higartil ásett í váttanarkunngerðini.

Í sambandi við broyting av váttanarkunngerðini verður skotið upp, at kunngerðin verður rættað samsvarandi altjóða grannskoðanarstandardunum. Á tann hátt verður tað gjørdur ein karmur, sum ger tað møguligt at liva upp til krøvini til upplýsingar, sum eru galdandi í sambandi við grannskoðan av PIE-fyritøkum.

Skotið verður upp at seta úr gildi kravið í § 18 í lógini um at føra grannskoðanarprotokoll fyri tær fyritøkur, sum ikki eru PIE-fyritøkur, tí eftir ES-reglum er hetta kravið einans galdandi fyri PIE-fyritøkur. Verður kravið um grannskoðanarprotokoll sett úr gildi merkir tað ikki, at leiðslan í fyritøkuni ikki longur fær upplýsingarnar í grannskoðanarprotokollini. Teir altjóða grannskoðanarstandardarnir áleggja grannskoðaranum at geva leiðsluni í grannskoðaðu fyritøkuni eina røð av upplýsingum, og einki forðar fyri, at leiðslan í fyritøkuni avtalar við grannskoðaran, at tað framhaldandi skal gerast ein grannskoðanarprotokoll. Alt eftir, hvat hóskar best til ta einstøku fyritøkuna, verður nú møguleiki hjá fyritøku og grannskoðara at avtala, um grannskoðanarprotokoll skal gerast ella ikki.

1.3.1.5 Etikkur og óheftni
Grannskoðarin er álitisumboðið hjá almenninginum, tá hann ger grannskoðanaruppgávur og aðrar váttanaruppgávur við trygd, og skal hann útinna uppgávurnar í samsvari við góðan grannskoðanarsið, heruppií vísa tann neyvleika og tað umhugsni, sum einstaka uppgávan krevur.

Góður grannskoðanarsiður merkir eisini, at grannskoðarin skal vísa integritet, partloysi, trúnað, yrkisliga framferð, yrkisførleika og neyðugt nærlagni, tá uppgávurnar verða framdar.

Góður grannskoðanarsiður mennist leypandi í sambandi við, at broytingar henda í samfelagnum og í sjálvari grannskoðaravinnuni, og verður sjónligur og mennist serstakliga gjøgnum dómar, avgerðir í grannskoðaranevndini, frágreiðingar/álit, grannskoðanarstandardar og –vegleiðingar umframt praksis.

Ásetingin í § 22 í grannskoðaralógini um óheftni er ein karmur fyri, hvat liggur í hugtakinum “óheftni”, og inniheldur tey yvirskipaðu og grundleggjandi krøvini til óheftni. Í ásetingini er eisini eitt forboð fyri, at tann ella teir grannskoðarar, sum undirskriva

grannskoðanarátekningina fyri eina fyritøku av almennum áhuga (PIE-fyritøku), kunnu átaka sær eitt leiðandi starv í hesi fyritøkuni, áðrenn 2 ár eru liðin, síðani viðkomandi fór frá sum grannskoðari. Nærri reglur um óheftni eru ásettar í kunngerð nr. 5 frá 17. februar 2010 um óheftni grannskoðarans og grannskoðanarvirkisins.

Tað er eisini eitt krav sambært § 23 í galdandi lóg, at tann ella teir grannskoðarar, sum undirskriva grannskoðanarátekningina í ársfrágreiðingini hjá einari PIE-fyritøku, skulu skiftast út í seinasta lagi 7 ár eftir, at teir eru tilnevndir at gera uppgávuna (partnerrotation). Viðkomandi grannskoðari kann hereftir í fyrsta lagi átaka sær uppgávuna, tá tvey ár eru gingin, síðani viðkomandi fór frá sum grannskoðari.

Eftir § 24, stk. 1 í galdandi lóg kann ein grannskoðanarfyritøka í 5 fylgjandi roknskaparár ikki hava ein størri part enn 20% av sínum umsetningi hjá sama kunda.

Í 8. vinnufelagadirektivinum hjá ES eru meginreglurnar ásettar fyri yrkisligan etikk, heruppií grannskoðarans leiklut í áhugamálunum hjá almenninginum, integritet grannskoðarans og partloysi umframt yrkisførleika og nærlagni. Ein av broytingunum í direktivinum er, at tað nágreiniliga verður sett sum krav, at grannskoðarin skal vísa professionelt ivasemi í sambandi við grannskoðanina.

Tí verður nú skotið upp, at krøvini til góðan grannskoðanarsið verða nágreinað soleiðis, at kravið eisini fer at fevna um professionelt ivasemi. Kravið um professionelt ivasemi verður eisini galdandi fyri aðrar uppgávur enn grannskoðan, og fylgir hetta sostatt breiða nýtsluøki lógarinnar.

Nýggju ES-reglurnar herða generelt krøvini til óheftni grannskoðarans. Eftir ES-fyriskipanini verða krøvini til óheftni hjá grannskoðarum, sum grannskoða PIE-fyritøkur, herd enn meira, heruppií krøvini til útskifting av grannskoðara (partnerrotation).

Skotið verður upp, at ásetingarnar í § 22 um óheftni grannskoðarans verða broyttar soleiðis, at tað verður nágreinað, í hvørjum tíðarskeiði óheftniskrøvini eru galdandi. Harafturat verður ásett, hvussu grannskoðarin skal fyrihalda seg til sítt óheftni, um tann grannskoðaða fyritøkan í roknskapartíðarskeiðnum verður yvirtikin, verður løgd saman við ella yvirtekur eina aðra fyritøku.

Sambært nýggju ES-reglunum verður forboðið móti at fara í starv hjá einum grannskoðanarkunda víðkað til eisini at galda fyri grannskoðarar, ið grannskoða aðrar fyritøkur enn PIE-fyritøkur, eins og forboðið eisini verður víðkað til aðrar grannskoðarar, sum hava luttikið í grannskoðanini. Skotið verður upp, at ásetingarnar verða savnaðar í nýggju lógargreinini § 22 c í uppskotinum.

Tey meira nágreiniligu krøvini til óheftni verða sum higartil ásett í kunngerðini um óheftni.

ES-fyriskipanin setur eina røð av krøvum til óheftni grannskoðarans, tá hann grannskoðar PIE-fyritøkur. Tó er eftir fyriskipanini ein røð av møguleikum fyri, at londini, fyri at lætta um, kunnu seta linari reglur í gildi. Lagt verður upp til, at hesin møguleiki verður nýttur.

Sambært ES-fyriskipanini er ein røð av veitingum, sum grannskoðari ikki kann veita PIE-fyritøkum, sum viðkomandi grannskoðar. Eftir fyriskipanini er møguleiki fyri, at grannskoðari ger ávísar uppgávur viðvíkjandi skatti og metingum, um vanligu krøvini til óheftni verða yvirhildin, og uppgávurnar hvør sær ella samanumtikið ikki hava nakran ella lítlan týdning fyri grannskoðaðu fyritøkuna. Skotið verður upp, at hesin møguleiki sambært

fyriskipanini verður nýttur, og reglur um hetta verða ásettar í nýggju lógargreinini § 22 a í uppskotinum.

Sambært fyriskipanini eru avmarkingar fyri, hvussu stórur partur av samsýning grannskoðarans frá einari PIE-fyritøku kann viðvíkja øðrum veitingum enn grannskoðan. Avmarkingin er 70% av samsýningini hjá grannskoðaranum. Møguleiki er sambært fyriskipanini at áseta, at avvarðandi myndugleiki eftir áheitan frá grannskoðaranum í undantaksføri kann verða undantikin frá kravinum í eitt tíðarskeið. Skotið verður í § 22 b í uppskotinum upp, at hesin møguleiki verður nýttur samsvarandi fyriskipanini soleiðis, at tað kann verða givið undantak frá kravinum í eitt roknskaparár.

Galdandi áseting um at skifta grannskoðaran út ("partnerrotation") er flutt frá direktivinum og í fyriskipanina. Reglurnar um at skifta grannskoðaran út verða tí, tá tað snýr seg um grannskoðan av PIE-fyritøkum, frameftir at finna í ES-fyriskipanini. Reglur um at skifta grannskoðaran út verða framvegis í grannskoðaralógini, men eru hesar reglur einans galdandi fyri grannskoðan av fyritøkum, sum eru omanfyri ávísa stødd.

Í fyriskipanini eru eisini reglur um, hvussu stórur partur av umsetningi grannskoðarans kann koma frá somu PIE-fyritøku. Um samsýningin frá sama kunda í trý fylgjandi roknskaparár er omanfyri 15% skal grannskoðarin umrøða hesi viðurskiftini við grannskoðanarbólkin. Um grannskoðanarsamsýningin framvegis er omanfyri 15%, skal grannskoðanarbólkurin taka avgerð um, hvørt grannskoðarin kann halda fram við grannskoðanaruppgávuni í eitt tíðarskeið, sum ikki kann fara upp um 2 ár.

Tað ikki er nakað samsvarandi krav í ES-reglunum til grannskoðan av fyritøkum, sum ikki eru PIE-fyritøkur. Tí verður skotið upp, at galdandi áseting í § 24, stk. 1 í grannskoðaralógini um, at grannskoðari í fimm fylgjandi roknskaparár í mesta lagi kann fáa 20% av umsetninginum frá sama kunda, verður sett úr gildi.

Grannskoðarin skal tó framvegis vera óheftur í sínum virksemi, og grannskoðarin skal tí framhaldandi meta um hóttanir móti óheftni sum avleiðing av einum stórum umsetningi frá sama kunda og nýta trygdarfyriskipanir fyri at minka um hóttanir, so tær eru á einum støði, sum kann góðtakast.

1.3.1.6 Innanhýsis bygnaður og góðskustýringarskipan umframt góðskueftirlit

Í grannskoðaralógini eru ongar ásetingar um, hvussu innanhýsis bygnaðurin á grannskoðanarvirkjum skal vera, uttan kravið um, at grannskoðanarvirkir skulu hava eina góðskustýringarskipan, sum skal skjalprógvast.

Tær altjóða galdandi meginreglurnar, her undir meginreglan um góðskustýringarskipan á grannskoðanarvirkjum, útfylla hugtakið góður grannskoðanar- og góðskustýringarsiður og innihalda ásetingar um innanhýsis bygnað á grannskoðanarvirkjum og um góðskustýringarskipanina.

Eftir galdandi lóg hevur landsstýrismaðurin heimild til í kunngerð at áseta nærri reglur um innihaldið í góðskustýringarskipanini og um skjalprógv fyri nýtslu av skipanini. Henda heimild er enn ikki brúkt. Lógarálagda góðskueftirlitið verður í dag gjørt við støði í teimum altjóða meginreglunum um góðskustýring á grannskoðanarvirkjum, ISQC1.

Í sambandi við lógarálagda góðskueftirlitið verður kannað, um grannskoðanarvirkið hevur skipað, sett í verk og nýtt eina góðskustýringarskipan.

Skyldan at hava góðskueftirlit er galdandi fyri øll góðkend grannskoðanarvirkir og góðkendar grannskoðarar. Tað lógarálagda góðskueftirlitið skal í minsta lagi vera 6. hvørt ár, og í minsta lagi 3. hvørt ár á grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga.

Nýggju ES-reglunar seta krøv til innanhýsis bygnaðin í grannskoðanarvirkjum og seta minstu krøv til innihaldið í góðskustýringarskipanini.

Skotið verður tí upp, at heimildin hjá landsstýrismanninum til at áseta reglur um innihaldið í góðskustýringarskipanini verður víðkað til eisini at fevna um krøv til innanhýsis bygnaðin á einum grannskoðanarvirki. Skotið verður upp, at krøvini til innanhýsis bygnaðin, her undir góðskustýringarskipanina, verða ásett í kunngerð og eisini verða galdandi fyri aðrar váttanir við trygd.

Tað verða ásett krøv til grannskoðanarvirkir um, at tey sum liður í teirra góðskustýringarskipan skulu hava eina hóskandi skipan, har tey starvssettu kunnu fráboða um brot ella møgulig brot á grannskoðaralóggávuna ella ES-fyriskipanina.

Lógarálagda góðskueftirlitið verður framt við útgangsstøði í krøvunum til góðskustýringarskipaninar á grannskoðanarvirkjunum, men tær altjóða meginreglurnar, her undir ISCQ1, útfylla framvegis hugtakið góður grannskoðanar- og góðskustýringarsiður og verður hetta eins og higartil ein partur í metingini, hvørt grannskoðanarvirkið hevur skipað, sett í verk og brúkt eina góðskustýringarskipan.

Í ES-direktivinum eru nýggjar reglur um, hvussu ofta lógarálagda góðskueftirlitið skal vera á teimum grannskoðanarvirkjunum, sum einans grannskoða fyritøkur, sum ikki eru fyritøkur av almennum áhuga, her undir at eftirlitið skal byggja á váðametingar. Skotið verður tí upp, at eftirlitið við grannaskoðanarvirkjum, sum bert grannskoða smáar fyritøkur, fer frá at vera 6. hvørt ár til, at grannskoðanarvirkini verða vald út til eftirlit útfrá eini váðagreining, og at grannskoðanarvirkir, sum grannskoða miðal stórar og stórar fyritøkur koma undir eftirlit í minsta lagi hvørt 6. ár. Væntað verður, at henda broyting hevur við sær, at tað verða færri lógaráløgd eftirlit

Lógarálagda góðskueftirlitið á virkjum, sum grannskoða PIE-fyritøkur, verður nú regulerað í ES-fyriskipanini, og er har ásett, at eftirlitið skal vera í minsta lagi 3. hvørt ár. Á granskoðanarvirkjum, sum bert grannskoða smáar ella miðalstórar PIE-fyritøkur, skal eftirlitið, sum í dag er 3. hvørt ár, sambært ES-fyriskipanini einans verða 6. hvørt ár.

1.3.1.7 Grannskoðanarbólkur

Sambært galdandi lóg skulu børsskrásettar fyritøkur skipa ein grannskoðanarbólk. Sambært galdandi reglum er ásett, undir hvørjum treytum fyritøkan kann velja at lata evstu leiðsluna útinna uppgávurnar hjá grannskoðanarbólkinum og um førleikarnar hjá limunum.

Uppgávan hjá grannskoðanarbólkinum er at hava eftirlit við tilgongdini við roknskaparframløguni og við innanhýsis eftirlitsskipanini hjá fyritøkuni, og at møgulig innanhýsis grannskoðan og váðastýringarskipan er munagóð, og at hava umsjón við tí lógaráløgdu grannskoðanini av ársroknskapinum v.m. Grannskoðanarbólkurin skal eisini hava eftirlit við og kanna óheftni grannskoðarans, her undir serstakliga um aðrar tænastur verða veittar fyritøkuni. Harafturat skal uppskotið hjá evstu leiðsluni um val av grannskoðara byggja á eitt tilmæli frá grannskoðanarbólkinum.

Krøvini til grannskoðanarbólkin og uppgávur hansara eru ásett í 8. vinnufelagadirektivinum hjá ES.

Í nýggju ES-reglunum eru nýggj/broytt krøv til grannskoðanarbólkar, her undir skipan, uppgávur o.a.

Við hesum uppskoti verður lagt upp til, at broytingarnar í direktivinum, sum áseta, at allar PIE-fyritøkur skulu hava ein grannskoðanarbólk, verða settar í gildi. Sambært núgaldandi lóg verður kravt, at í minsta lagi ein limur í bólkinum skal vera óheftur og hava førleikar innanfyri roknskap og/ella grannskoðan. Hetta verður við hesum uppskotinum broytt til, at í minsta lagi ein limur í bólkinum skal hava førleikar innanfyri roknskap og/ella grannskoðan, og at limirnir í grannskoðanarbólkinum tilsamans skulu hava førleikar, sum eru viðkomandi fyri grannskoðaðu fyritøkuna.

Eftir uppskotinum hava fyritøkur av almennum áhuga, sum í útgangsstøði hava skyldu til at skipa ein grannskoðanarbólk, møguleika til at lata formannin í bólkinum og aðrar limir í bólkinum velja beinleiðis á aðalfundinum hjá fyritøkuni, tí tað verður ikki longur sett sum krav, at limirnir í bólkinum samstundis skulu vera limir í evstu leiðsluni í fyritøkuni. Á tann hátt verður tað ein meira smidlig skipan í sambandi við skipan av grannskoðanarbólki, og at persónar við serligum innliti í grannskoðan og roknskaparviðurskifti ikki óneyðugt taka eitt pláss í nevndini í fyritøkuni.

Í uppskotinum er heimildin at lata nevndina taka sær av uppgávunum hjá grannskoðanarbólkinum varðveitt. Á tann hátt verður tryggjað, at fyritøkurnar á smidligan hátt kunnu skipa nevndararbeiðið soleiðis, sum einstaka fyritøkan metir tað mest skynsamt.

Skotið verður upp at áseta eina heimild til, at tað kann verða givið undantak viðvíkjandi skylduni at skipa ein grannskoðanarbólk í tí, sum sambært direktivinum eru alternativ íløgufeløg umframt ávís feløg, hvørs einasta endamál er at útgeva virðisbrøv við trygd í ávísum nágreinaðum aktivum.

Harafturat verður framvegis møguligt at geva lættar samsvarandi broytingunum í direktivinum í mun til smærri PIE-fyritøkur.

Uppgávurnar hjá grannskoðanarbólkinum verða víðkaðar soleiðis, at bólkurin nú skal boða nevndini/eftirlitsnevndini í fyritøkuni frá um úrslitið av grannskoðanini, her undir greiða frá, hvussu grannskoðanin hevur givið íkast til integritetin í roknskaparframløguni og um leiklutin hjá grannskoðanarbólkinum í tilgongdini. Grannskoðanarbólkurin skal framvegis hava eftirlit við mannagongdunum í sambandi við roknskapartilgongdina, men skal harafturat koma við tilmælum ella uppskotum, sum skulu tryggja integritetin.

Í fyriskipanini er harumframt ein røð av uppgávum og skyldum hjá grannskoðanarbólkinum, t.d. tá útboð er í sambandi við val av grannskoðara.

1.3.1.8 Um skipan og fyrireiking av almenna eftirlitinum

Endamálið við almenna eftirlitinum við grannskoðanarvirkjum og grannskoðarum er at tryggja og hækka góðskuna á váttanaruppgávum við trygd, sum grannskoðarin ger, og harvið viðvirka til at økja um álitið á roknskapirnar hjá fyritøkunum.

Sambært galdandi grannskoðaralóg hevur Skráseting Føroya ábyrgd av eftirlitinum við grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum, herundir

- prógtøku og eftirútbúgving,

- góðskueftirliti

- kanningum

- dissiplinermálum, og

- samstarvi við og flytan av upplýsingum til málsførar myndugleikar í øðrum londum.

Grannskoðaraeftirlitið hevur ábyrgdina av, at góðskueftirlitið verður framt, og Grannskoðaranevndin hevur ábyrgdina av dissiplinermálum.

Í báðum nevndunum er minnilutin av limunum starvandi grannskoðarar. Grannskoðaravinnan ber útreiðslurnar av góðskueftirlitinum, kanningum og dissiplinerskipanini.

Viðvíkjandi prógvtøkuni til at gerast góðkendur grannskoðari er skipanin í dag tann, at ein prógvtøkunevnd, sum Skráseting Føroya setur, skipar fyri prógvtøkuni til at gerast løggildur grannskoðari. Í nevndini sita 1 løggildur grannskoðari og 4 aðrir limir, ið ikki eru løggildir grannskoðarar, men eru kønir í handilsviðurskiftum, skattarætti, skiftirætti og tjóðarbúskapi. Sambært grannskoðaralógini skal prógvtøkan, herundir reglurnar um innstilling til prógvtøku, prógvtøkukrøvini, prógvtøkuhald og –døming, lúka neyðug krøv til at vera góðkend í einum ES- ella EBS-landi. Nærri reglur um prógvtøkuna eru ásettar í kunngerð nr. 4 frá 4. februar 2016 um prógvtøku fyri løggildar grannskoðarar.

Prógvtøkunevndin hevur við heimild í grannskoðaralógini møguleika til at gera avtalu við myndugleikar í øðrum londum um at veita hjálp í sambandi við prógvtøkuhald og prógvtøkudøming. Prógvtøkunevndin og Skráseting Føroya hava gjørt avtalu við danska Erhvervsstyrelsen um samstarv í sambandi við prógvtøkuhald. Í praksis er skipanin hon, at grannskoðarar, sum søkja um at sleppa til prógvtøku í Føroyum, skulu standa eina prógvtøku í føroyskum skattarætti og eina skrivliga roynd, ið er tann sama uppgávan, sum danskir grannskoðarar fara upp í. Hendan loysnin er vald, tí viðkomandi føroyskar lógir og reglur á økinum er so at siga eins við galdandi lógir og reglur í Danmark. Tað er serliga á skattaøkinum, at lóggávan er ein onnur í Føroyum, og tí verður skipað ein serstøk prógvtøku í skattarætti í Føroyum. Prógvtøkunevndin prógvdømir uppgávurnar hjá teimum, sum fara til prógvtøku í Føroyum. Hendan prógvtøkuskipanin varð sett í verk fyri nøkrum árum síðani, og góðkendi grannskoðaravinnan hendan leistin, áðrenn hann varð settur í verk.

Í nýggju ES-reglunum verður lagt upp til, at broytingar verða gjørdar viðvíkjandi almenna eftirlitinum við grannskoðanarvirkjum og grannskoðarum, og hevur tað við sær, at neyðugt er at endurskoða galdandi reglur hesum viðvíkjandi. Skotið verður nú upp at áseta reglur, sum eru í samsvari við ES-reglurnar um almenna eftirlitið.

Nýggju ES-reglurnar loyva ikki, at góðkendir grannskoðarar luttaka í viðgerðini av eftirlitsmálum og eru við til at taka avgerðirnar. Hetta hevur við sær, at Grannskoðaraeftirlitið ikki kann halda fram við verandi bygnaði, har tveir av 5 limum eru góðkendir grannskoðarar.

Í dag er Grannskoðaraeftirlitið mannað við 5 limum, harav eru 1 formaður, 2 góðkendir grannskoðarar og 2 umboð fyri roknskaparbrúkararnar. Hvørki formaðurin ella umboðini fyri roknskaparbrúkararnar kunnu vera góðkendir grannskoðarar, vera í starvi á einum grannskoðanarvirki ella reka grannskoðanarvirki saman við góðkendum grannskoðarum. Uppgávan hjá nevndini er at tryggja, at góðskueftirlitið á virkjunum fer fram sambært lógini. Grannskoðaraeftirlitið góðkennir góðskueftirlitsfólkini, sum skulu út á virkini at gera eftirlit. Tá góðskueftirlitið er endað sendur góðskueftirlitsfólkið eina frágreiðing til Grannskoðaraeftirlitið soleiðis, at eftirlitið kann meta um og taka støðu til, um eftirlitið skal enda uttan viðmerkingar, um átala skal gevast, uppfylgjandi eftirlitsvitjan skal gerast, ella málið skal leggjast fyri Grannskoðaranevndina (dissiplinernevndina).

Í ES-direktivi 2014/56/EU og ES-fyriskipan nr. 537/2014/EU er greitt ásett, at eftirlitið skal virka óheft av grannskoðaravinnuni, og harafturat er ásett, at eftirlitið skal hava neyðugan førleika, serfrøði og arbeiðsorku til uppgávuna.

Skotið verður upp, at Grannskoðaraeftirlitið heldur fram við somu uppgávum, men nevndin verður skipað uttan limir, sum starvast sum góðkendir grannskoðarar. Lagt verður upp til, at teir báðir sessirnir í eftirlitinum, sum í dag eru mannaðir við góðkendum grannskoðarum, frameftir verða mannaðir við tveimum limum, sum skulu hava hóskandi útbúgving og viðkomandi royndir innan grannskoðan og roknskapargreiðslu.

Endamálið við góðskueftirlitinum er at hækka góðskuna á grannskoðanini og hjá grannskoðarum. Góðskueftirlitið fer tí í framtíðini at hava høvuðsdentin á at koma við tilmælum um batar og at fylgja upp í eftirlitsmálum. Lagt verður upp til, at smærri mál í framtíðini í størri mun kunnu verða endað við einum boðum ella eini átálu heldur enn sum nú, har lógin í størri mun leggur upp til, at málini verða løgd fyri Grannskoðaranevndina og kunnu føra við sær revsing við sekt. Samstundis verður skotið upp at áseta nýggjar møguleikar fyri revsing í málum, har talan er um grov brot soleiðis, at tað í slíkum málum verða tikin munagóð stig. Viðmerkjast skal, at tað higartil sjáldan er komið fyri, at Grannskoðaraeftirlitið hevur lagt mál fyri Grannskoðaranevndina.

Í Danmark vórðu reglurnar viðvíkjandi prógvtøku fyri grannskoðarar broyttar í 2016 soleiðis, at skipanin nú líkist skipanini fyri advokatar, har *Advokatsamfundet* skipar fyri prógvtøkuni. Í Danmark verður prógvtøkan fyri grannskoðarar nú skipað á tann hátt, at *Foreningen af Statsautoriserede Revisorer* (FSR) stendur fyri prógvtøkuni. Henda nýggja prógvtøkuskipanin er skipað við virðing fyri ymisku leiklutunum sum Erhvervsstyrelsen og FSR hava sum ávikavist myndugleiki og vinnugreinafelag soleiðis, at uppgávurnar verða loystar munadygt við teimum fyrimunum sum eru við myndugleikaheimildunum og við vinnuliga innlitinum hjá FSR. Henda skipanin er mett at vera til fyrimuns fyri grannskoðaravinnuna og fyri samfelagið. Aftaná ráðførðslu við Felagið fyri Føroyskar Grannskoðarar verður ein heimild til at nýta uppgávur hjá FSR í sambandi við prógvtøkuhaldi ásett í grannskoðaralógina. Ætlanin er, at tað framhaldandi verður sett sum krav, at grannskoðarar, sum fara til prógvtøku í Føroyum, umframt donsku uppgávuna eisini skulu standa føroyskan skattarætt, og Prógvtøkunevndin tekur sær av prógvdømingini.

Grannskoðaranevndin verður varðveitt, men uppgávurnar verða broyttar soleiðis, at nevndin frameftir einans skal viðgera meira álvarsom brot á grannskoðarans skyldur umframt á skyldur leiðslunnar sambært teimum nýggju ES-reglunum. Samstundis verður skotið upp, at nevndin fær tær neyðugu heimildirnar til at revsa dissiplinert, tá talan er um álvarslig brot, herundir møguleika fyri treytaðari frádøming, fyribils forboð fyri at grannskoðari átekur sær ávís størv og møguleika fyri at tvífalda støddina á sektini.

Skráseting Føroya fær sambært uppskotinum nýggjar uppgávur orsakað av ES-reglunum. Talan er um hesar uppgávurnar:

- Skipan av einari varskógvaraskipan og uppfylging av upplýsingum, sum verða móttiknar.
- Umsjón við broytingum á marknaðinum fyri grannskoðan av PIE-fyritøkum og fyrireiking av eini frágreiðing um hetta 3. hvørt ár.
- Eftirlit við, at limir í leiðsluni í PIE-fyritøkum halda tær skyldur, sum eru álagdar sambært fyriskipanini, og teimum ásetingum, sum eru ein fylgja av broytingum í direktivinum.

1.3.1.9 Revsing og almannakunngerð

Í galdandi løgtingslóg eru ásetingar um dissiplinera revsing fyri grannskoðarar og grannskoðanarvirkir. Ein grannskoðari, sum setur til síðis sínar skyldur í sambandi við, at hann veitir eina váttan, kann fáa eina ávaring ella fáa eina sekt frá Grannskoðaranevndini. Sektin kann í mesta lagi vera 300.000 kr. Á sama hátt kann eitt grannskoðanarvirki, sum setur til síðis sínar skyldir, fáa eina sekt á í mesta lagi 750.000 kr. Grannskoðaranevndin kann harafturat frádøma grannskoðara góðkenningina í eitt avmarkað tíðarskeið ella inntil annað verður avgjørt, um grannskoðarin er sekur í grovum ella ofta endurtakandi vansketni í útinnan av virksemi sínum.

Harafturat hevur Grannskoðaranevndin skyldu til at almannakunngera sínar avgerðir. Í útgangsstøði verða avgerðir almannakunngjørdar við upplýsingum um navnið á tí klagaða. Navnið verður strikað, tá fyrsta heila álmanakkaárið er runnið eftir, at avgerðin er tikin.

Skráseting Føroya kann almannakunngera úrslitið av einari kanning. Úrslitið verður bert almannakunngjørt við upplýsingum um samleikan hjá fysiska og juridiska persóninum í málum av prinsipiellum slag.

Grannskoðaraeftirlitið almannakunnger ikki sínar avgerðir.

Almennir myndugleikar, herundir Grannskoðaraeftirlitið og privat, kunnu leggja mál fyri Grannskoðaranevndina.

Í 8. vinnufelagadirektivinum er ásett, at londini skulu tryggja munagóða revsing, men í nýggju ES-reglunum eru eisini nágreinilig krøv til revsingina.

Uppskotið er fyrireikað samsvarandi nýggju ES-reglunum, og merkir hetta, at ein grannskoðari í eitt tíðarskeið á upp til 3 ár kann fáa forboð fyri at útinna lógarálagda grannskoðan, virksemi í einum grannskoðanarvirki ella í eini fyritøku av almennum áhuga. Viðvíkjandi støddd á sektum í dissiplinermálum verður skotið upp, at sektin í serliga grovum førum kann verða hækkað upp í 600.000 kr. fyri ein grannskoðara og upp í 1.500.000 kr. fyri eitt grannskoðanarvirki. Bøtur í hesari støddini verða mettar at vera á einum nóg høgum støði.

Sum nakað nýtt verður skotið upp at seta í gildi eina heimild til at geva eina treytaða frádøming av góðkenningini hjá grannskoðaranum.

Tað verður greitt ásett, at Grannskoðaranevndin í sambandi við metingina, hvørt grundarlag er fyri frádøming, í størri mun skal leggja dent á, at grannskoðarin er umboðið hjá almenninginum. Tí er eitt hert metingargrundarlag galdandi í mun til tað, sum er galdandi m.a. fyri sakførarar/advokatar.

Tá ein grannskoðari ella grannskoðanarvirki fremur smærri brot, og talan ikki er um endurtøku, er tað mangan ikki tørvur á at leggja málið fyri Grannskoðaranevndina. Skotið verður tí upp at broyta reglurnar viðvíkjandi smærri brotum soleiðis, at Grannskoðaraeftirlitið kann enda mál um smærri brot við einari átalu ella einum boðum. Hetta verður mett at føra við sær, at færri mál verða løgd fyri Grannskoðaranevndina. Tó verða mál frameftir løgd fyri Grannskoðaranevndina, tá talan er um endurtøku av broti. Grannskoðaranevndin skal nýta sama metingargrundarlag, tá talan er um mál, sum privat leggja fyri nevndina.

Tað hevur týdning í sambandi við metingina, hvørt talan er um eitt smærri brot, í hvønn mun brotið verður mett at hava ella at fáa fyri viðurskiftini hjá viðkomandi viðskiftafólki ella fyri avgerðir hjá triðjamanni um eitt nú at veita kreditt ella gera avtalu um handilssamstarv. Hetta eru vanliga mál, sum í dag kunnu hava við sær sekt á upp til 25.000 kr. Grannskoðaraeftirlitið og Skráseting Føroya meta ítøkiliga um, hvørt eitt brot kann metast at vera minni álvarsligt.

Sambært nýggju reglunum frá ES skulu myndugleikarnir almannakunngera ta revsing, sum teir áleggja í sambandi við, at góðskueftirlit og kanningar eru gjørdar og staðfest eru brot á lóggávuna.

Skotið verður upp, at upplýsingar um einstaklingar bert verða almannakunngjørdar í teimum førum, har góðkenningin verður frátikin, fyribils forboð verður givið at reka virksemið sum grannskoðari ella at útinna ávís størv í einari PIE-fyritøku. Hetta verður mett neyðugt fyri at verja ella ávara roknskaparbrúkararnar og almenningin. Burtursæð frá hesum nevndu førunum verða tað bert upplýsingar um samleikan hjá grannskoðanarvirkjum, sum verða almannakunngjørdar.

Eftir uppskotinum verður møguleiki fyri, at Grannskoðaraeftirlitið kann almannakunngera úrslitið av einum góðskueftirliti, um áheitanir ikki verða fylgdar. Grannskoðaraeftirlitið kann eisini almannakunngera, at ein kanning er ella verður gjørd. Hesin møguleiki er serliga ætlaður til tey føri, har nógv almenn umrøða er av einum máli.

Upplýsingar um, at fysiskir persónar hava framt brot á lóggávuna, kunnu vera fevndar av persónsupplýsingarlógini. Almannakunngerð av, at góðkenningin er tikin frá einum persóni, ella at hann fyribils hevur fingið forboð fyri at virka sum grannskoðari, er tó innanfyri karmarnar av persónsupplýsingarlógini. Tað skyldast, at almannakunngerð av hesum upplýsingum er neyðug við atliti til eina uppgávu, sum verður útint í samfelagsins áhuga, og tí tað er tørvur á at upplýsa roknskaparbrúkararnar um hetta.

Almannakunngerð av upplýsingum um revsing av einum løgfrøðiligum persóni skal vera við samleikanum hjá løgfrøðiliga persóninum, uttan so, at almannakunngerð vil vera ein hóttan móti støðufestinum á fíggjarligu marknaðunum ella einari revsirættarligari kanning, sum er í gongd, ella ein almannakunngerð førir við sær órímiliga stóran skaða, eitt nú fyri løgfrøðiliga persónin, íleggjarar ella onnur. Upplýsingarnar eiga bert at vera almennar so leingi, sum tað verður mett neyðugt sæð í mun til samfelagsligu atlitini fyri at almannakunngera upplýsingarnar. Tí er ásett í uppskotinum, at samleikin hjá løgfrøðiligum persónum ikki skal vera almennur longur, tá tvey ár eru gingin frá tí, at upplýsingarnar vórðu almannakunngjørdar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður grannskoðaralógin dagført, so hon verður í samsvari við 8. vinnufelagadirektivið hjá ES. Eisini verður grannskoðaralógin broytt soleiðis, at hon er í samsvari við fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga. Samstundis, sum hetta uppskotið verður lagt fyri Løgtingið, verður eisini uppskot um at seta nevndu ES-fyriskipan í gildi í Føroyum lagt fyri Løgtingið. Harvið verða ávísar reglur um grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyritøkur), frameftir ikki at finna í grannskoðaralógini, men bert at finna í nevndu ES-fyriskipan.

Tað verður samanumtikið mett, at uppskotið hevur við sær, at grannskoðanin verður betri, grannskoðarafrágreiðingarnar verða meiri upplýsandi og álitið hjá almenninginum á grannskoðaraváttanirnar verður betri, samstundis sum reglur, sum eru óneyðuga avmarkandi og tyngjandi, verða strikaðar.

Í stuttum verða við uppskotinum m.a. gjørdar hesar broytingar í lógini:

- At hækka góðskuna á grannskoðanini við m.a. at leggja størri dent á grannskoðarans professionella ivasemi, at herða krøvini til óheftni grannskoðarans og til innanhýsis bygnaðin og góðskustýringina í grannskoðanarvirkjunum. Hetta verður mett at føra við sær, at álitið hjá almenninginum á teir grannskoðaðu roknskapirnar verður styrkt.

- At reglur um grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyritøkum) frameftir partvís verða at finna í ávikavist grannskoðaralógini og í ES-fyriskipanini. M.a. verða reglurnar um at skifta grannskoðaran út og reglurnar um samsýning fyri grannskoðan av PIE-fyritøkum at finna í ES-fyriskipanini.

- At broyta samansetingina av limum í Grannskoðaraeftirlitinum soleiðis, at eftirlitið samsvarandi 8. vinnufelagadirektivinum hjá ES virkar óheft av grannskoðaravinnuni. Góðkendir grannskoðarar skulu frameftir ikki vera við til at taka avgerð í eftirlitsmálum, og tí verður skotið upp at broyta samansetingina av limum í Grannskoðaraeftirlitinum soleiðis, at góðkendir grannskoðarar ikki longur sita í nevndini. Ístaðin verður nevndin mannað við øðrum skikkaðum persónum enn góðkendum grannskoðarum.

- At broyta skipanina við góðskueftirliti soleiðis, at eftirlitið við grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða smærri fyritøkur, byggir meiri á váðametingar soleiðis, at tað eru teir grannskoðarar og tey grannskoðanarvirki, har tað ítøkiliga verður mett at vera sannlíkindi fyri feilum, ið koma undir eftirlit. Í dag eru øll grannskoðanarvirkir undir regluligum eftirliti, sum í mesta lagi er við 3 ella 6 ára millumbili. Fyri grannskoðanarvirkir, sum grannskoða stórar fyritøkur av almennum áhuga verður eftirlitið framvegis í minsta lagi 3. hvørt ár, meðan eftirlitið við grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða smáar ella miðalstórar PIE-fyritøkur verður 6. hvørt ár.

- At færri mál frameftir verða løgd fyri Grannskoðaranevndina, tí dentur heldur skal leggjast á vegleiðing og fyribyrging, tá minni týðandi brot koma fyri fyrstu ferð. Fyrsta brotið verður lagaligari revsað, og tey grovu brotini verða revsað harðari. Lagt verður upp til nýggj sløg av revsing fyri grov brot, herundir frádøming av rættinum at reka grannskoðanarvirki, fyribils avmarkingar í møguleikanum at útinna sítt yrki, og møguleiki fyri í sambandi við serliga grov brot at revsa við sekt, ið er munandi hægri enn í dag.

- At virkisøkið hjá Grannskoðaranevndini verður víðkað soleiðis, at nevndin eisini tekur avgerð í dissiplinermálum móti leiðslunum í PIE-fyritøkunum og grannskoðanarbólkinum viðvíkjandi ábyrgd teirra í sambandi við lóggávuna um grannskoðan.

- Skráseting Føroya fær sambært uppskotinum nýggjar uppgávur. Talan er um hesar uppgávurnar:

    - Skipan av einari varskógvaraskipan og uppfylging av upplýsingum, sum verða móttiknar.

    - Umsjón við broytingum á marknaðinum fyri grannskoðan av PIE-fyritøkum og fyrireiking av eini frágreiðing um hetta 3. hvørt ár.

    - Eftirlit við, at limir í evstu leiðsluni, stjórnini og grannskoðanarbólkinum í PIE-fyritøkum halda tær skyldur, sum eru álagdar sambært fyriskipanini, og teimum ásetingum, sum eru ein fylgja av broytingum í direktivinum, tó ikki teimum fyritøkum, sum eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum og Tryggingareftirlitinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Vinnuhúsinum, Felagnum Peningastovnar, Grannskoðaraeftirlitinum, Tryggingareftirlitinum og Fíggjarmálaráðnum. Uppskotið hevur eisini ligið frammi á heimasíðu Umhvørvis- og vinnumálaráðsins.

- Felagið Føroyskir Grannskoðarar
- Januar, løggilt grannskoðanarvirki
- Numo, løggilt grannskoðanarvirki
- Spekt, løggilt grannskoðanarvirki
- Grannskoðaraeftirlitið
- Tryggingareftirlitið
- Eftirlønargrunnur FA's

Føroya Arbeiðsgevarafelag, Betri Trygging og Betri Pensjón boðaðu frá, at feløgini ongar viðmerkingar høvdu til uppskotini.

Eitt hoyringarnotat er lagt við sum fylgiskjal 4.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

Broytingarnar í uppskotinum hava við sær ávirkan á virksemið hjá Skráseting Føroya og virksemið hjá Grannskoðaraeftirlitinum og Grannskoðaranevndini.

Væntast kann, at tað frameftir verða gjørd færri góðskueftirlit, og kann tað hava við sær, at Skráseting Føroya og Grannskoðaraeftirlitið fara at hava minni at gera hesum viðvíkjandi. Hinvegin kann tað hugsast, at tá eftirlitið frameftir verður gjørt út frá váðametingum, fara tað at verða funnir fleiri feilir og manglar í sambandi við eftirlitið, og harvið kann eftirlitið fáa meira at gera. Tað ber ikki til heilt greitt at siga, hvat umsitingarliga og fíggjarliga avleiðingin verður av hesum.

Sambært uppskotinum verða fleiri og nýggjar eftirlitsuppgávur lagdar til Skráseting Føroya í mun til tær uppgávur, sum stovnurin í dag hevur sambært grannskoðaralógini.
Nýggjar uppgávur eru t.d.

- Skipan av einari varskógvaraskipan og uppfylging av upplýsingum, sum verða móttiknar.
- Umsjón við broytingum á marknaðinum fyri grannskoðan av PIE-fyritøkum og fyrireiking av eini frágreiðing um hetta 3. hvørt ár.
- Eftirlit við at limir í leiðsluni í PIE-fyritøkum halda tær skyldur, sum eru álagdar sambært fyriskipanini og teimum ásetingum, sum eru ein fylgja av broytingum í direktivinum.
- At hava eftirlit við og gera kanning, hvørt ovasta leiðsla, stjórn og grannskoðanarbólkur í PIE-fyritøkum halda tær skyldur, sum eru ásettar í ES-

fyriskipan nr. 537/2014/EU frá 16. apríl 2014 og í reglum sambært art. 37 og 38 í 8. vinnufelagadirektivinum frá ES, tó ikki teimum PIE-fyritøkum, sum eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum og Tryggingareftirlitinum. Lagt verður upp til, at tað verða PIE-fyritøkurnar, sum sjálvar skulu bera útreiðslurnar av hesum eftirlitinum.

Mett verður, at tørvur er á eini játtan upp á uml. 200.000 kr. fyri tær nevndu uppgávurnar, sum koma aftrat. Tað er natúrligt, at tað krevur eyka orku, tá nýggjar lógarásetingar koma í gildi, og tískil er tørvur á at upprøðfesta grannskoðaraøkið.

Í dag verður virksemið hjá Skráseting Føroya, Grannskoðaraeftirlitinum, Grannskoðaranevndini og Prótøkunevndini fíggjað við gjøldum, sum grannskoðaravinnan rindar. Gjøldini eru ásett í kunngerð nr. 113 frá 7. september 2009 um fígging av Grannskoðaraeftirlitinum og kanningar- og dissiplinerskipanini.

Møguleiki er fyri at hækka gjøldini, sum grannskoðaravinnan rindar, ella at biðja um hægri játtan úr landskassanum til øktu útreiðslurnar. Hetta verður tikið upp í sambandi við komandi fíggjarlógararbeiði.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri Skráseting Føroya, Grannskoðaraeftirlitið og Grannskoðaranevndina.

Væntað verður, at tað frameftir verða gjørd færri góðskueftirlit, og kann tað hava við sær, at Skráseting Føroya og Grannskoðaraeftirlitið fara at hava minni at gera hesum viðvíkjandi. Hinvegin kann tað hugsast, at tá eftirlitið framyvir verður gjørt út frá váðametingum, fara tað at verða funnir fleiri feilir og manglar í sambandi við eftirlitið, og harvið kann eftirlitið fáa meira at gera. Tað ber ikki til neyvt at siga, hvat umsitingarliga avleiðingin verður.

Eftir uppskotinum verða fleiri uppgávur lagdar til Skráseting Føroya í mun til tær uppgávur, sum stovnurin í dag hevur sambært grannskoðaralógini. Nýggjar uppgávur eru t.d.

- Skipan av einari varskógvaraskipan og uppfylging av upplýsingum, sum verða móttiknar.
- Umsjón við broytingum á marknaðinum fyri grannskoðan av PIE-fyritøkum og fyrireiking av eini frágreiðing um hetta 3. hvørt ár.
- Eftirlit við at limir í leiðsluni í PIE-fyritøkum halda tær skyldir, sum eru álagdar sambært fyriskipanini og teimum ásetingum, sum eru ein fylgja av broytingum í direktivinum.
- At hava eftirlit við og gera kanning, hvørt ovasta leiðsla, stjórn og grannskoðanarbólkur í PIE-fyritøkum halda tær skyldur, sum eru ásettar í ES-fyriskipan nr. 537/2014/EU frá 16. apríl 2014 og í reglum sambært art. 37 og 38 í 8. vinnufelagadirektivinum frá ES, tó ikki teimum PIE-fyritøkum, sum eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum og Tryggingareftirlitinum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur bæði umsitingarligar lættar og umsitingarligar byrðar við sær fyri vinnuna.

Flestu lógarbroytingarnar hava ikki umsitingarligar avleiðingar við sær fyri vinnuna, tí vinnan livir longu í dag upp til krøvini, t.d. orsakað av teimum grannskoðanarstandardum, sum vinnan fylgir, og teirri eftirlitsskipan, sum er í gildi.

Mett verður, at uppskotið við tíðini fer at hava við sær umsitingarligar og fíggjarligar lættar fyri vinnuna. Serstakliga fer vinnan at merkja lættar í mun til góðskueftirlit. Tann størsta fíggjarliga byrðan, sum hevur við eftirlit at gera, er útreiðslan til góðskueftirlitið og ta innanhýsis arbeiðsorkuna, sum skal setast av í sambandi við eitt eftirlit. Tá eftirlitini nú kunnu væntast at gerast færri, væntast byrðarnar av eftirliti eisini at gerast minni.

Broytingar sambært uppskotinum krevja, at grannskoðanarvirkini gera umsitingarligar umskipanir. Tað snýr seg fyri tað fyrsta um, hvussu virkini skipa og gera váttanaruppgávurnar. Harnæst snýr tað seg um skylduna at gera eina varskógvaraskipan og fyri tað triðja at seta í verk altjóða grannskoðanarstandardar.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Lógaruppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Lógaruppskotið er ikki í ósamsvari við ásetingar í Evropeiska mannarættindasáttmálanum, EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Lógaruppskotið er ikki í ósamsvari við ásetingar í Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Sambært galdandi lóg kann ein grannskoðari, sum setur til síðis sínar skyldur í sambandi við at hann veitir eina váttan, fáa eina ávaring ella fáa eina sekt, sum liggur upp á í mesta lagi 300.000 kr. Á sama hátt kann eitt grannskoðanarvirki, sum setur til síðis sínar skyldur, fáa eina sekt upp á í mesta lagi 750.000 kr. Grannskoðaranevndin kann harafturat frádøma grannskoðara góðkenningina í eitt avmarkað tíðarskeið ella fyribils.

Í 8. vinnufelagadirektivinum er ásett, at londini skulu tryggja munagóða revsing, men í nýggju ES-reglunum, sum uppskotið er fyrireikað við støði í, eru eisini nágreinilig krøv til revsingina.

Við hesum uppskotinum verður lagt upp til, at færri mál frameftir verða løgd fyri Grannskoðaranevndina, tí dentur skal leggjast á vegleiðing og fyribyrging, tá minni týðandi brot koma fyri fyrstu ferð. Grannskoðaraeftirlitið kann enda mál um smærri brot við einari átalu ella einum boðum. Tó verða mál frameftir løgd fyri Grannskoðaranevndina, tá talan er um endurtøku av broti. Fyrsta brotið verður lagaligari revsað, og tey grovu brotini verða revsað harðari. Tað hevur týdning í sambandi við metingina, hvørt talan er um eitt smærri brot, í hvønn mun brotið verður mett at hava ella at fáa fyri viðurskiftini hjá viðkomandi viðskiftafólki ella fyri avgerðir hjá triðjamanni um eitt nú at veita kreditt ella gera avtalu um handilssamstarv. Hetta eru vanliga mál, sum í dag kunnu hava við sær sekt á upp til 25.000 kr. Grannskoðaraeftirlitið og Skráseting Føroya meta ítøkiliga um, hvørt eitt brot kann metast at vera minni álvarsligt.

Lagt verður upp til nýggj sløg av revsing fyri grov brot, herundir frádøming av rættinum at reka grannskoðanarvirki, møguleiki fyri treytaðari frádøming og møguleiki fyri í sambandi við serliga grov brot at revsa við sekt, ið er munandi hægri enn í dag.

Grannskoðaranevndin skal í sambandi við metingina, hvørt grundarlag er fyri frádøming, í størri mun leggja dent á, at grannskoðarin er umboðið hjá almenninginum.

Viðvíkjandi støddd á sektum í dissiplinermálum verður skotið upp, at sektin í serliga grovum førum kann verða hækkað upp í 600.000 kr. fyri ein grannskoðara og upp í 1.500.000 kr. fyri eitt grannskoðanarvirki. Bøtur í hesari støddini verða mettar at vera á einum nóg høgum støði.

Virkisøkið hjá Grannskoðaranevndini verður víðkað til eisini at kunna viðgera klagur, sum snúgva seg um brot á tær skyldur, sum PIE-fyritøkur, limir í evstu leiðsluni í hesum fyritøkum ella grannskoðanarbólkurin í hesum fyritøkum hava sambært ES-fyriskipan 537/2014/EU frá 16. apríl 2014. Støddirnar á sektum eru tær somu, sum grannskoðarar og grannskoðanarvirkir kunnu fáa.

2.11. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Sambært grannskoðaralóggávuni er grannskoðaravinnan neyvt regulerað og neyvar reglur eru um virksemið hjá almenna eftirlitinum við grannskoðaravinnuni. Við hesum uppskoti verða broytingar gjørdar í reglum, sum hava við skyldurnar hjá góðkendum grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum at gera, eitt nú viðvíkjandi arbeiðsgongdum, arbeiðsskjølum, meting av óheftni, eftirútbúgving o.a.

Reglurnar um almannakunngering av úrslitum av kanningum, sum Skráseting Føroya ger, reglurnar um tagnarskyldu fyri starvsfólk á Skráseting Føroya og um víðarilatan av upplýsingum verða broyttar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Eftir galdandi grannskoðaralóg hevur landsstýrismaðurin fleiri heimildir til at áseta nærri reglur. Hesar heimildir hevur landsstýrismaðurin nýtt og eru í løtuni 12 kunngerðir, sum hava heimild í lógini.

Lógaruppskotið inniheldur ikki heilt nýggjar heimildir til landsstýrismannin, men heimildin í § 26, stk. 3 í uppskotinum, fyrrverandi § 26, stk. 2, verður víðkað. Landsstýrismanninum verður nú heimilað, umframt at áseta nærri reglur um innihaldið av góðskustýringarskipanini og um skjalprógvið fyri nýtsluna av henni, at áseta nærri reglur um krøvini til innanhýsis skipanina.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Skráseting Føroya hevur sambært § 37, stk. 1 í grannskoðaralógini heimild til, til eina og hvørja tíð, við hóskandi samleikaprógvi og uttan rættarúrskurð rætt til at fáa atgongd til eitt grannskoðanarvirki og til skrásetingar, skjøl o.a., heruppií eisini tilfar, ið verður varðveitt elektroniskt. Endamálið er at fáa til vegar upplýsingar, ið eru neyðugar í sambandi við, at Skráseting Føroya kannar møgulig brot á lógina, sbrt. § 35. Skráseting Føroya hevur sostatt, um treytirnar í § 37 er loknar, longu atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

Í hesum lógaruppskoti er lagt upp til, at § 35 í grannskoðaralógini verður broytt, soleiðis at Skráseting Føroya eisini kann kanna møgulig brot á reglur í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga og á reglur, sum gjøgnumføra artikkul 37 og 38 í direktivi 2006/43/EF frá Europa-tinginum og Ráðnum um lógarálagda grannskoðan av ársroknskapum og konsolideraðum roknskapum (8. vinnufelagadirektivið), sum broytt við direktivi 2014/56/EU.

Broytingin hevur við sær, at heimildin í grannskoðaralógini hjá Skráseting Føroya til at fáa atgongd til privata ogn verður víðkað til eisini at fevna um fyritøkur av almennum áhuga.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

avtalur og reglur					
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Niðanfyri í serligu viðmerkingunum til einstøku ásetingarnar verður stutt greitt frá høvuðsinnihaldinum í ásetingunum, og verður annars víst til viðmerkingarnar í LF 146/2015 Forslag til lov om ændring af revisorloven og forskellige andre love, og til L 2015/146 Betænkning over Forslag til lov om ændring af revisorloven og forskellige andre love, sum eru viðløgd sum ávikavist fylgiskjal 2 og fylgiskjal 3 til uppskotið, umframt at tað verða gjørdar aðrar serligar viðmerkingar, har tørvur er á tí. Serligu viðmerkingarnar til einstøku ásetingarnar í uppskotinum til donsku revisorloven, sum víst verður til, eru sostatt eisini viðmerkingar og tulkingaríkast til einstøku ásetingarnar í hesum uppskotinum.

Til § 1

Nr. 1
Heitið á kapitli 1 er "Øki lógarinnar". Lagt verður upp til, at heitið á kapitli 1 verður broytt til "Øki lógarinnar og allýsingar", tí ein nýggj áseting við allýsingum verður sett í kapittul 1. Ein fylgja av hesi broyting er, at heitið á kapitli 1 verður broytt, so heitið eisini fevnir um hesa nýggju ásetingina, sum er ásett í § 1, nr. 5 í uppskotinum.

Nr. 2
Skotið verður upp, at heitið "Øki løgtings" verður sett frammanfyri § 1 í lógini.

Nr. 3
Broytingarnar eru fylgibroytingar av øðrum broytingum í lógaruppskotinum, og hava onga innihaldsliga broyting við sær.

Nr. 4
Í § 1, stk. 4 og 5 verða hugtøkini grannskoðari og grannskoðanarvirkir allýst.

Lagt verður upp til, at § 1, stk. 4 og 5 verða strikað úr § 1, tí skotið verður upp, at allýsingarnar av hugtøkunum "grannskoðari" og "grannskoðanarvirki" frameftir verða í nýggju § 1a, sum inniheldur allýsingar av m.a. hesum hugtøkunum. Víst verður til viðmerkingina til § 1, nr. 5 í uppskotinum.

Nr. 5
Umframt § 1, stk. 4 og 5, sum allýsa hugtøkini "grannskoðari" og "grannskoðanarvirki" hevur grannskoðaralógin ikki nakra serstaka áseting, har hugtøk verða allýst.

Lagt verður upp til, at ein nýggj grein við allýsingum verður sett í lógina.

Allýsingarnar í § 1 a, stk. 1, nr. 1 av grannskoðara og nr. 2 av grannskoðanarvirkjum verða fluttar frá § 1, stk. 4 og 5, sbr. broyting í § 1, nr. 3, og verða innihaldsliga ikki broyttar.

Í § 1a, stk. 1, nr. 1 verður víst til §§ 3, 10 og 11. Í hesum ásetingum verður bert løggildur grannskoðari nevndur. Grannskoðaralógin varð broytt í 2015 soleiðis, at tað frá 2018 ikki skuldi verða møguleiki fyri at gerast skrásettur grannskoðari longur. Í § 2, stk. 2 í gildiskomu- og skiftisreglunum í løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015 um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir er ásett, at skrásettir grannskoðarar eru fevndir av § 1, stk. 4 í grannskoðaralógini, sum í galdandi lóg inniheldur allýsingina av einum

grannskoðara. Harvið er skrásettur grannskoðari framvegis fevndur av allýsingini av hugtakinum “grannskoðari”, hóast hugtakið “skrásettur grannskoðari” ikki er nevnt í §§ 3, 10 og 11.

Í § 19, stk. 1 og 2 í grannskoðaralógini eru ásett serstøk krøv í sambandi við grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga. Talan er um sonevndu PIE-fyritøkurnar. Talan er um fyritøkur, sum hava virðisbrøv, ið verða handlað á einum skipaðum marknaði í einum ES-landi ella einum EBS-landi, og fyritøkur, sum eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum ella Tryggingareftirlitinum, tó ikki virkir, ið fáast við tryggingarmeklaravirksemi sambært § 42 í lógini um tryggingarvirksemi og reglum, settar í gildi við heimild í hesi, og virkir, ið eru fevnd av kapitli 20 a (íløguráðgevar) í fyriskipan om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed. Hesar fyritøkur hava verið nevndar “fyritøkur av almennum áhuga”.

Í § 1 a, stk. 1, nr. 3 verður lagt upp til at áseta eina allýsing av fyritøkum av almennum áhuga. Fyritøkur av almennum áhuga er ikki eitt nýtt hugtak í grannskoðaralóggávuni, men hetta er fyrstu ferð, at hetta hugtak verður allýst.

Fyritøkur, sum eru fevndar av nýggju allýsingini, verða fevndar av serligu reglunum, sum eru galdandi fyri hesar fyritøkur, heruppií fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga, sum lagt verður upp til, skal verða sett í gildi í Føroyum, sbrt. lógaruppskoti, sum verður lagt fram samstundis sum hetta lógaruppskotið.

Sambært § 1, stk. 1, nr. 3, litra a verða fyritøkur, ið hava kapitalpartar, skuldarinstrument ella onnur virðisbrøv, ið eru upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES-landi ella einum EBS-landi, fevndar av allýsingini. Innihaldsliga fevnir hetta um somu fyritøkur, sum eftir galdandi áseting í § 19, stk. 3, nr. 1 í grannskoðaralógini, sum við hesum uppskoti verður strikað. Málsliga verða gjørdar tillagingar, m.a. so at ásetingin nýtir somu orðingar, sum verða nýttar í ársroknskaparlógini, men innihaldsliga er ikki lagt upp til nakra broyting.

Sambært § 1, stk. 1, nr. 3, litra b fevnir allýsingin av “fyritøkur av almennum áhuga” um fíggjarfyritøkur t.e. peningastovnar, tryggingarfeløg, og tryggingarfelag sambært løgtinglóg nr. 53 frá 12. mai 2015 um P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag.

Hetta er ein broyting í mun til § 19, stk. 3, nr. 2 í grannskoðaralógini, og kemst av, at donsku reglurnar, sum hetta lógaruppskotið leggur seg uppat, eru broyttar. Eisini er tað ein broyting í mun til galdandi reglur, at tryggingarfelag sambært løgtinglóg nr. 53 frá 12. mai 2015 um P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag nú eisini kemur undir allýsingina av “fyritøku av almennum áhuga”.

Einans tær fyritøkur, sum eftir ES-reglunum eru “fyritøkur av almennum áhuga” verða sambært ásetingini fevndar av allýsingini, og merkir tað, at vit í Føroyum ikki seta strangari reglur í gildi enn ES-fyriskipanin ásetur hesum viðvíkjandi. Við uppskotinum verða føroysk og donsk lóggáva eins.

Tey flestu krøvini viðvíkjandi grannskoðan av PIE-fyritøkum, sum eru í grannskoðaralógini í dag, verða nú í ES-fyriskipanini um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga, sum verður sett í gildi í Føroyum. Ásetingarnar um grannskoðanarbólk vera framhaldandi í grannskoðaralógini, sbr. § 29 í grannskoðarlógini, eins og forboðið móti, at grannskoðari tekur við starvi hjá einari PIE-fyritøku, verður í grannskoðaralógini, sbr. uppskotið til § 22 c í hesum uppskoti (§ 1, nr. 45 í uppskotinum). Har ES-fyriskipanin gevur

møguleika fyri, at aðrar reglur verða ásettar, verða hesar ásettar í grannskoðaralógini (m.a. heimildin sambært § 22 a í uppskotinum til at veita ávísar tænastur/loysa ávísar uppgávur), og í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (m.a. um tíðarskeiðið fyri val av grannskoðara).

Í uppskotinum til § 1 a, stk. 1, nr. 4, 5 og 6 er lagt upp til at allýsa smáar fyritøkur, miðalstórar fyritøkur og stórar fyritøkur. Hesar allýsingar hava við sær, at tað er møguligt at gera mun á teimum krøvum, sum verða sett viðvíkjandi grannskoðan av ymsu fyritøkunum. Lógaruppskotið leggur í samsvari við ES-lóggávuna, sum uppskotið er grundað á, upp til, at lagaligari treytir verða settar smáum fyritøkum enn stórum fyritøkum.

Allýsingarnar av smáum, miðal og stórum fyritøkum samsvara við allýsingarnar í ársroknskaparlógini.

Tað hevur týdning, at smáar, miðal og stórar fyritøkur verða allýstar í grannskoðaralógini, tí í lógaruppskotinum eru fleiri ásetingar, sum áseta lagaligari krøv til grannskoðan av smærri fyritøkum.

Í uppskotinum til § 1 a, stk. 1, nr. 4 verður skotið upp, at støddarmørkini samsvara við mørkini í § 7, stk. 2, nr. 1 í ársroknskaparlógini. Allýsingin av smáum fyritøkum hevur týdning fyri krøvini til góðkenning og framhald av eini uppgávu, sbr. § 1, nr. 23 í uppskotinum, til innanhýsis skipan og góðskustýring, sbr. § 1, nr. 51 í uppskotinum, og fyri títtleikan av lógarálagda góðskueftirlitinum, sbr. § 1, nr. 54.

Í uppskotinum til § 1 a, stk. 1, nr. 5 verður skotið upp, at miðalstórar fyritøkur verða allýstar samsvarandi § 7, stk. 2, nr. 2 í ársroknskaparlógini. Allýsingin hevur m.a. týdning fyri, nær góðskueftirlit skal verða á einum grannskoðanarvirki, sbr. § 1, nr. 54 í uppskotinum.

Í § 1 a, stk. 1, nr. 6 verða stórar fyritøkur allýstar sum fyritøkur, ið ikki eru smáar ella miðalstórar fyritøkur. Harvið er talan um stóra fyritøku, um støddarmørkini eru omanfyri tey í § 7, stk. 2, nr. 2 í ársroknskaparlógini fyri miðalstórar fyritøkur. Hetta merkir, at talan er um allar fyritøkur størri enn tær í § 1 a, stk. 1, nr. 5 nevndu.

Uppskotið til § 1 a, stk. 2 og 3 ásetur, hvussu støddin av fyritøkuni skal roknast. Víst verður til § 7, stk. 3 og 4 í ársroknskaparlógini.

Skotið verður í § 1 a, stk. 3, 1. pkt. upp, at í móðurfyritøkum skal fíggjarjavni, nettoumsetningur og miðaltal av heiltíðarsettum í roknskaparárinum, sbr. § 1 a, stk. 1, nr. 4 og 5, verða roknað við at leggja saman fíggjarjavna, nettoumsetning og heiltíðarsett hjá móðurfyritøku og dótturfyritøku. Harafturat verður skotið upp, at § 110, stk. 2 og 3 í ársroknskaparlógini eru galdandi, tá støddin skal roknast.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar til § 1 a í § 1, nr. 6 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015).

Nr. 6
Í rundskrivi um lógarsmíð frá januar 2019 frá Løgmansskrivsstovuni pkt. 1.1.5. stendur, at styttingin "v.m." ikki eigur at verða brúkt, og at mælt verður til heldur at nýta "og annað", stytt "o.a.". Í samsvari við hetta verður styttingin "v.m." broytt til "o.a." í kapittulheitum og yvirskriftum.

Innihaldsliga er eingin broyting.

Nr. 7
Í galdandi § 4 í grannskoðaralógini er ásett, at tað er ein treyt fyri at varðveita góðkenningina sum grannskoðari, at grannskoðarin yvirheldur ásettu krøvini til eftirútbúgving. Skotið verður upp at gera eina broyting í § 4, stk. 1 í lógini soleiðis, at tað umframt at krevja, at grannskoðari javnt og samt heldur við líka sín ástøðiliga kunnleika, fakligu vitan og sín kunnleika um krøvini til álitisumboðið hjá almenninginum, eisini verður sett sum krav, at hann harafturat skal *dagføra* hesa vitan sína.

Eftirútbúgving er ein týðandi partur, ið skal vera við til at tryggja, at góðkendir grannskoðarar gjøgnum alla sína virkistíð halda við líka og møguliga víðka um teir førleikar, sum teir hava fingið gjøgnum ástøðiligu og praktisku útbúgvingargongdina. Endamálið er at tryggja, at tann høga góðskan í arbeiði grannskoðarans verður varðveitt. Fyri allar grannskoðarar er eitt krav um áhaldandi eftirútbúgving galdandi.

Sambært § 4, stk. 2 ásetur landsstýrismaðurin nærri reglur um eftirútbúgving og eftirlit við hesi. Í løtuni er kunngerð nr. 97 frá 23. september 2016 um kravda eftirútbúgving fyri góðkendar grannskoðarar galdandi.

Nr. 8
Uppskotið til broyting í § 4, stk. 2, 2. pkt. er ein fylgibroyting av, at nýggja greinin § 1 a verður sett í grannskoðaralógina.

Í grannskoðaralógini verður víst til, at kravið um meiri eftirútbúgving kann verða sett grannskoðarum, sum grannskoða fyritøkur, fevndar av § 19, stk. 3, nr. 2 í grannskoðaralógini. Lagt verður upp til, at kravið um meira eftirútbúgving frameftir kann verða sett grannskoðarum, sum grannskoða allar fyritøkur av almennum áhuga, t.e. bæði fyritøkur fevndar av § 1 a, stk. 1, nr. 2, litra a og litra b.

Nr. 9
Talan er um fylgibroytingar í § 6, stk. 1, 2. pkt. orsakað av nýggju § 8 a, stk. 4, nr. 3 og § 42, stk. 4, sbr. ávikavist § 1, nr. 14 og nr. 83 í uppskotinum.

Nr. 10
Ein fylgibroyting, sum kemst av, at góðkenning kann eisini verða tikin frá grannskoðara sambært nýggju § 8a, stk. 4, nr. 3, sbr. § 1, nr. 14 í uppskotinum.

Nr. 11
Lagt verður upp til, at yvirskriftin verður broytt, so at “o.a.” verður sett inn, av tí at § 8 og § 8 a, sum yvirskriftin umfatar, ikki einans snúgva seg um frátøku. Broytingin hevur einans frágreiðandi týdning.

Nr. 12
Sambært galdandi § 8, stk. 2 kann Skráseting Føroya taka góðkenningina frá einum grannskoðara, um grannskoðarin ikki gevur seg undir reglurnar um góðskueftirlit, ella ikki lýkur krøvini um eftirútbúgving. Skotið verður upp at broyta ásetingina í § 8, stk. 2. Broytingin er ein avleiðing av, at tað nú verður ásett í § 8 a í grannskoðaralógini, sbr. § 1, nr. 14 í uppskotinum, hvørjar avleiðingarnar eru av, at reglurnar um eftirútbúgving ikki eru hildnar. Skotið verður upp at broyta § 8, stk. 2 soleiðis, at ásetingin einans snýr seg um at

taka góðkenningina frá einum grannskoðara, sum ikki gevur seg undir reglurnar um góðskueftirlit. Reglurnar um at taka góðkenningina aftur, tí grannskoðarin ikki hevur hildið reglurnar um eftirútbúgving, verða frameftir í § 8 a í lógini.

Nr. 13
Skotið verður upp at strika ásetingina, tí sama áseting verður nú at finna í nýggju § 8 a, stk. 1, tó við nøkrum málsligum tillagingum. Talan er sostatt um eina fylgibroyting, sum kemst av nýggju § 8 a. Sí viðmerkingar undir § 1, nr. 14.

Nr. 14
Sambært § 8, stk. 2, nr. 2 í galdandi lóg kann Skráseting Føroya taka góðkenningina frá einum grannskoðara, um grannskoðarin ikki lýkur krøvini um eftirútbúgving. Um grannskoðara bert vantar at fullføra ein lítlan part av eftirútbúgvingini, kann Skráseting Føroya sambært § 8, stk. 3 í lógini áseta eina freist fyri, nær grannskoðarin skal lúka krøvini um eftirútbúgving. Í útgangsstøði verður § 8, stk. 3 nýtt í teimum førum, har grannskoðarin manglar 1/3 ella minni av eftirútbúgvingini.

§ 8 a, stk. 1 førir í ávísan mun § 8, stk. 2, nr. 2 í galdandi lóg víðari, tí ásetingin gevur Skráseting Føroya møguleika til at seta eina freist fyri, nær ein grannskoðari, ið ikki hevur fullført alla ella partar av eftirútbúgvingini, skal lúka krøvini. Freistin eigur at vera somikið long, at grannskoðarin hevur møguleikar fyri at fullføra eftirútbúgvingina, sum manglar fyri at lúka krøvini, samstundis sum hann røkir sítt starv. Eini boð sambært § 8 a, stk. 1 kunnu nýtast í teimum førum, har grannskoðarin bert manglar at lúka ein minni part av eftirútbúgvingarkrøvunum. Talan er tí um eitt framhald av galdandi praksis t.e. 1/3 ella minni av eftirútbúgvingini. Um grannskoðarin ikki lýkur krøvini innan freistina, sum er sett, kann Skráseting Føroya taka avgerð um treytaða frátøku av góðkenningini ella geva forboð fyri, at grannskoðarin kann útinna ávísar uppgávur, og kann Skráseting Føroya eisini taka góðkenningina frá grannskoðaranum, sbrt. stk. 4, nr. 1-3.

Í § 8 a, stk. 2 verður lagt upp til, at um ein grannskoðari ikki kann skjalprógva, at krøvini um eftirútbúgving eru lokin, kann Skráseting Føroya geva boð um, at hann skal taka lut í eftirútbúgvingartímum undir nærri ásettum treytum. Við ásetingini verður lagt upp til, at tað kann verða álagt einum grannskoðara at taka lut í ávísum læru- og menningarvirksemi, har ein møguleiki kann vera, at grannskoðarin skal prógva, at hann hevur fingið nakað burturúr hesum. Verður ikki gjørt eftir boðunum kann tað eins og eftir stk. 1 hava við sær treytaða frádøming, forboð fyri at útinna ávísar uppgávur ella frátøku av góðkenningini, sbrt. stk. 4, nr. 1-3.

Sambært § 8 a, stk. 3 kann Skráseting Føroya geva grannskoðara boð um, at grannskoðari undir nærri ásettum treytum skal taka lut í eftirútbúgving, um Skráseting Føroya í sambandi við eftirlit, sbrt. § 30, stk. 2, nr. 2-4, metir, at ein grannskoðari hevur tørv á meiri eftirútbúgving innan fyri ávíst fakøki. Henda grein kann verða nýtt í teimum førum, har Skráseting Føroya metir, at grannskoðarin ikki hevur neyðugu førleikarnar á einum øki, sum hevur týdning fyri grannskoðanina.

Lagt verður upp til, at Skráseting Føroya í teimum førum, har grannskoðarin ikki lýkur treytirnar um eftirútbúgving í § 4 ella ikki ger eftir boðum eftir § 8 a, stk. 1-3, hevur tríggjar møguleikar.

Skráseting Føroya kann sambært stk. 4, nr. 1 taka góðkenningin frá grannskoðaranum treytað. Tað merkir, at viðkomandi í verandi ella komandi eftirútbúgvingarskeiði ikki má seta til síðis krøvini um eftirútbúgving á slíkan hátt, at samlaða metingin verður, at góðkenningin skal verða tikin frá viðkomandi. Treytaða frátøkan kann verða nýtt í teimum førum, har tað útfrá einari ítøkiligari meting av umstøðunum í málinum ikki verður mett proportionalt at taka góðkenningina frá grannskoðaranum, m.a. tí, at tað útfrá umstøðunum í málinum er ósannlíkt ella ikki kann staðfestast, at grannskoðarin framhaldandi ikki fer at lúka treytirnar um eftirútbúgving. Avleiðingin av einari treytaðari frátøku er, at grannskoðarin fær eina ávaring (eitt gult kort), og at góðkenningin kann verða tikin frá grannskoðaranum, um hann ikki lýkur treytirnar viðvíkjandi eftirútbúgving í verandi ella komandi eftirútbúgvingarskeiði. Tá ein góðkenning verður tikin frá einum grannskoðara treytað, kann ein freist verða sett fyri, nær grannskoðarin skal lúka treytirnar, sbr. stk. 1.

Skráseting Føroya kann sambært stk. 4 nr. 2 geva grannskoðaranum eitt fyribils forboð fyri at fremja ávísar uppgávur. Skráseting Føroya kann sostatt geva grannskoðaranum forboð fyri í verandi ella komandi eftirútbúgvingarskeiði at grannskoða ella hava eftirlit við grannskoðan ella røkja uppgávur á einum grannskoðanarvirki.

Eitt forboð fyri, at grannskoðarin í verandi ella komandi eftirútbúgvingarskeiði fremur ella hevur eftirlit við grannskoðan hevur við sær, at grannskoðarin ikki kann hava ábyrgdina av eini grannskoðan og sostatt ikki kann geva eina grannskoðanarátekning. Grannskoðarin kann tó verða við í einum grannskoðaratoymi, sum fremur eina grannskoðan, um so er, at ein annar (grannskoðari) hevur ábyrgdina av og eftirlitið við grannskoðanarátekningini. Um forboð verður givið fyri, at grannskoðarin í verandi ella komandi eftirútbúgvingarskeiði røkir uppgávur í einum grannskoðanarvirki, hevur hetta m.a. við sær, at grannskoðarin ikki kann verða nevndarlimur, stjóri el.líkn.

Eitt forboð, sbrt. § 8 a, stk. 4, nr. 2 er ikki til hindurs fyri, at viðkomandi heldur fram sum grannskoðari og framhaldandi kann nýta heitini ávikavist skrásettur og løggildur grannskoðari. Talan er ikki um eina veruliga frátøku av góðkenningini, og harvið møguleikan at nýta heitið løggildur ella skrásettur grannskoðari. Viðkomandi kann tí geva aðrar váttarnir við trygd eftir § 1, stk. 2 ella váttanir eftir § 1, stk. 3. Eins og treytaða frátøkan sambært § 8 a, stk. 4, nr. 1 kann fyribils forboðið verða givið við eini freist at gjøgnumføra partar av eftirútbúgvingini, sbr. stk. 1. Verður forboðið ikki yvirhildið, kann tað føra til revsing við sekt.

Skráseting Føroya kann sambært § 8 a, stk. 4, nr. 3 taka góðkenningina frá einum grannskoðara. Henda áseting samsvarar við galdandi áseting í § 8, stk. 2, nr. 2.

Avgerðir tiknar eftir § 8 a, stk. 4, nr. 1-3 kunnu verða lagdar fyri Vinnukærunevndina, sbrt. § 49, stk. 1.

Lagt verður upp til, at avgerðir tiknar eftir § 8 a, stk. 4, nr. 2 og 3 verða almannakunngjørdar, sbrt. § 1, nr. 93 í hesum lógaruppskoti.

Nr. 15
Innihaldsliga er eingin broyting ætlað. Í rundskrivi um lógarsmíð frá januar 2019 frá Løgmansskrivsstovuni pkt. 1.1.5. stendur, at styttingin “v.m.” ikki eigur at verða brúkt, og at mælt verður til heldur at nýta “og annað”, stytt “o.a.”. Í samsvari við hetta verður styttingin “v.m.” broytt til “o.a.” í kapittulheitum og yvirskriftum.

Nr. 16
Talan er um tvær fylgibroytingar í § 9, stk. 1. Broytingarnar eru, at góðkenning eisini kann verða tikin frá grannskoðara sambært nýggju § 8 a, stk. 4, nr. 3, og frádøming verða gjørd eftir § 42, stk. 4. Umframt hetta er ikki talan um nakra innihaldsliga broyting.

Nr. 17
§ 10 ásetir undir hvørjum treytum Skráseting Føroya kann góðkenna persónar sum grannskoðarar, sum hava tikið útbúgving uttanlands.

Eftir galdandi reglum kann grannskoðari, sum hevur tikið útbúgving uttanlands, fáa góðkenning sum grannskoðari frá Skráseting Føroya, um viðkomandi prógvar at hava eina útbúgving, sum kann javnmetast við útbúgving sambært § 3 í grannskoðaralógini og lýkur aðrar treytir sambært § 3. Harafturat skal viðkomandi prógva sín kunnleika til føroyska lóggávu.

Lagt verður upp til at broyta § 10, stk. 1, so ásetingin verður greiðari, samstundis sum tað afturat galdandi krøvum verður sett sum krav, at viðkomandi uttanlands er góðkendur at fremja lógarálagda grannskoðan. Sambært uppskotinum kann Skráseting Føroya sostatt góðkenna ein persón sum løggildan grannskoðara, sum prógvar at hava tikið útbúgving uttanlands, ið verður mett at kunna javnmetast við útbúgving eftir § 3, stk. 1 og 3. Harafturat skal persónurin uttanlands vera góðkendur at fremja lógarálagda grannskoðan og annars lúka treytirnar í § 3, stk. 5 og 6.

Við tað, at tað nú staðiliga verður ásett, at viðkomandi skal lúka krøvini í § 3, stk. 5 og 6, verður tað nágreinað, hvørji onnur ítøkilig krøv grannskoðari skal lúka fyri at fáa eina góðkenning sum løggildur grannskoðari. Umframt at lúka krøvini til útbúgving og góðkenning, skal grannskoðarin hava eina trygging, sum lýkur krøvini sambært § 3, stk. 5. Harafturat skal grannskoðarin lúka krøvini í § 3, stk. 6, og merkir hetta, at viðkomandi ikki hevur framt ávíst revisvert brot, sbr. § 3, stk. 6, nr. 1, at viðkomandi ikki hevur sýnt ein atburð, ið er skaðiligur fyri umdømið, sbr. § 3, stk. 6, nr. 2, ella hevur eina ávísa skuld til tað almenna, sbr. § 3, stk. 6, nr. 3.

Nr. 18
Skotið verður upp at áseta eitt nýtt stk. 2 í § 10. Ásetingin snýr seg um góðkenning av grannskoðarum, sum eru góðkendir til at gera lógarálagda grannskoðan í einum landi, sum ikki hevur sett í gildi reglurnar í 8. vinnufelagadirektivinum hjá ES.

Í § 10, stk. 3 verður skotið upp at áseta, at útlendskir grannskoðarar, sum sambært § 10, stk. 1 søkja um góðkenning í Føroyum, skulu prógva sín kunnleika til føroyska lóggávu. Tað er Skráseting Føroya sum tekur avgerð um, hvørji roynd umsøkjarin skal upp í. Henda sama ásetingin er í dag í § 10, stk. 1, 2. pkt., men verður ásetingin nú frameftir at finna í § 10, stk. 3.

Stk. 2 og 3 verða hereftir stk. 3 og 4.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 12 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 19

Tað er sambært § 13 í grannskoðaralógini ein treyt fyri at fáa góðkenning sum grannskoðanarvirki, at virkið lýkur ávísar treytir um atkvøðurætt og samanseting av evstu leiðslu, og um at virkið skal geva seg undir reglur um góðskueftirlit.

Skotið verður upp, at tað eisini verður sett sum krav fyri góðkenning, at virkið lýkur treytirnar um innanhýsis bygnað, sbr. § 26 í uppskotinum, og kravið um, at grannskoðanarvirkið sum liður í góðskustýringsskipanini skal hava eina hóskandi skipan, har starvssett kunnu boða frá um brot á grannskoðaralóggávuna ella ES-fyriskipanina, sbr. § 26 a í uppskotinum. Um krøvini í hesum ásetingunum verður víst til serligu viðmerkingarnar niðanfyri undir § 1, nr. 51 og nr. 52.

Víst verður eisini til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 13 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 20
Talan er um eina rætting. Reglur um góðskueftirlit eru í § 27 og ikki í § 29, sum víst verður til.

Nr. 21 og 22
Fylgibroytingar orsakað av broytingunum í § 42, sum hava við sær, at § 42, stk. 4, verður § 42, stk. 6. Innihaldsliga er ikki talan um nakra broyting.

Nr. 23
Lagt verður upp til at seta eina nýggja grein í lógina, sum setur krøv til grannskoðanarvirkið, áðrenn virkið fer undir ella heldur fram við eini grannskoðanaruppgávu. Skotið verður upp, at nýggja greinin, § 14 a, fær yvirskriftina *góðkenning og framhald av grannskoðanaruppgávu*.

Tað er ásett í ES-direktivi 2014/56/EU art. 1, nr. 16 (art. 22b) eitt krav um, at grannskoðanarvirkir skulu meta um og skjalprógva ávís nærri ásett viðurskifti, áðrenn virkið tekur á seg ella heldur fram við eini uppgávu. Grannskoðanarvirkið skal m.a. meta um og skjalprógva óheftni og hóttanir móti óheftni og tær trygdarfyriskipanir, sum eru settar í verk móti hesum hóttanunum.

Sambært § 22, stk. 6, 1. pkt. í grannskoðaralógini skal eitt grannskoðanarvirki gera leiðreglur, ið tryggja, at grannskoðari, áðrenn hann átekur sær uppgávur, sambært § 1, stk. 2 tekur støðu til, um tað eru viðurskifti, sum hjá einum vælkunnaðum triðjamanni kunnu vekja iva um óheftnið hjá viðkomandi.

Í samsvari við § 22, stk. 6, 1. pkt. í grannskoðaralógini er lagt upp til at áseta í § 14 a, stk. 1, nr. 1 og 2, at eitt grannskoðanarvirki, áðrenn tað tekur við eini grannskoðanaruppgávu frá einum nýggjum viðskiftafólki ella heldur fram við eini grannskoðanaruppgávu fyri eitt verandi viðskiftafólk, skal meta um og skjalprógva, at tað lýkur krøvini um óheftni í § 22, um tað eru hóttanir móti óheftninum, og í so fall, hvørji trygdartiltøk eru tikin fyri at ganga hesum hóttanum á møti.

Tað eru allar hóttanir móti óheftni og øll møgulig trygdartiltøk, sum sambært § 14 a, stk. 1, nr. 2, skulu metast um og skjalprógvast. Tað er sostatt ikki krav um, at hóttanin o.a. skal vera týðandi.

Lagt verður upp til í § 14 a, stk. 1, nr. 3 og 4, at grannskoðanarvirkið eisini skal meta um og skjalprógva, at tað hevur tey neyðugu málsføru starvsfólkini, ta neyðugu tíðina og neyðugu orkuna at fremja grannskoðanina lýtaleyst, og at grannskoðarin er góðkendur at geva grannskoðanarátekningina á roknskapin.

Sambært § 14 a, stk. 2 verður lagt upp til, at krøvini í § 14 a, stk. 1, nr. 3 og 4 ikki skulu galda, tá smáar fyritøkur verða grannskoðarar. Smáar fyritøkur eru allýstar í § 1 a, stk. 1, nr. 4. Skotið verður upp, at tað einans eru § 14 a, stk. 1, nr. 1 og 2, sum eru galdandi fyri grannskoðan av smáum fyritøkum. Tí skulu grannskoðanarvirkir, sum grannskoða smáar fyritøkur, framvegis meta um og skjalprógva óheftni eftir § 22 í grannskoðaralógini og hóttanir móti óheftni og tær trygdarfyriskipanir, sum eru settar í verk. Hetta er í samsvari við galdandi § 22, stk. 6 í grannskoðaralógini.

At § 14, stk. 1, nr. 3 og 4 ikki er galdandi fyri grannskoðanarvirkir, sum grannskoða smáar fyritøkur, hevur við sær, at hesi ikki skulu meta um og skjalprógva, at virkið hevur neyðugu skikkaðu starvsfólkini, neyðugu tíðina og neyðuga tilfeingið, áðrenn virkið átekur sær uppgávuna ella heldur fram við uppgávuni, ella meta um, hvørt grannskoðarin, sum veitir grannskoðaraváttanina, er góðkendur til hetta. Tað er tó framvegis eitt krav sambært § 15 í lógini, at ein góðkendur grannskoðari skal grannskoða samsvarandi góðum grannskoðanarsiði. Ein grannskoðari skal útinna uppgávuna við tí neyvleika og skjótleika, sum uppgávan loyvir. Harafturat liggur tað í hugtakinum *góður grannskoðanarsiður*, at viðkomandi, sum gevur váttanina á roknskapin, er góðkendur grannskoðari.

Í § 14 a, stk. 3 verður lagt upp til, at stk. 1, nr. 1 og 2 eisini skulu galda fyri aðrar váttanir við trygd, t.e. ikki bara fyri grannskoðanarátekningar á roknskapir, men eisini t.d. í sambandi við víðkaða gjøgnumgongd av ársroknskapum. Hetta er í samsvari við galdandi § 22, stk. 6, 1. pkt. í grannskoðaralógini.

Tá nýggja greinin í § 14 a verður sett í lógina, verður skotið upp at strika § 22, stk. 6, 1. pkt. Sí viðmerkingar niðanfyri til § 1, nr. 42.

Sambært uppskotinum til § 14 a, stk. 4 skal stk. 1 um meting og skjalprógv eisini galda fyri grannskoðanarvirki, sum eru fevnd av art. 6 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga, tá tey fyrireika grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga. Art. 6 í fyriskipanini snýr seg um metingar og skjalprógv, sum grannskoðari ella grannskoðanarvirki skulu gera í sambandi við grannskoðanaruppgávur, og er sostatt galdandi afturat teimum krøvum, sum vera í § 14 a, fyri grannskoðanarvirki, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga.

Víst verður í síni heild víst til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 17 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 24 og 25
Sambært § 15, stk. 1 er grannskoðarin álitisumboð hjá almenninginum, tá hann ger uppgávur sambært § 1, stk. 2, og skal hann gera hesar uppgávur í samsvari við góðan grannskoðanarsið. Ásetingin lýkur krøvini til etikk sambært áðurgaldandi art. 21 í 8. vinnufelagadirektivinum hjá ES.

Við art. 1, nr. 13 í ES-direktivi 2014/56/EU verður art. 21 í 8. vinnufelagadirektivinum broyttur soleiðis, at tað verður eitt krav, at grannskoðarin skal vísa professionelt ivasemi, tá hann fremur lógarálagda grannskoðan. Tí verður skotið upp, at tað verður nágreinað í § 15, stk. 1, at tað, at vísa professionelt ivasemi, er ein partur av góðum grannskoðanarsiði.

Eisini verður lagt upp til í nýggja stk. 2 í § 15 at nágreina, hvat tað inniber, at grannskoðarin skal vísa professionelt ivasemi. Kravið um, at grannskoðarin skal vísa professionelt ivasemi er longu partur av altjóða standardum m.a. í parti 15 í ISA 200, í parti 22 í ISRE 2400 og í parti 14 í ISAE 3000.

Góður grannskoðanarsiður er galdandi í sambandi við allar váttanaruppgávur við trygd, tvs. bæði í sambandi við grannskoðan og í sambandi við aðrar uppgávur við trygd, eitt nú í sambandi við víðkaða gjøgnumgongd av ársroknskapum. Eftir uppskotinum er á sama hátt kravið um professionelt ivasemi galdandi fyri allar váttanir við trygd.

At vísa professionelt ivasemi merkir, at grannskoðarin hevur eina kritiska tilgongd, og skal hann ansa eftir umstøðum, sum kunnu geva ábendingar um skeivar upplýsingar orsakað av feili ella sviki, umframt eina kritiska meting av grannskoðanarprógvnum.

Í stk. 2 er nærri nágreinað, hvat tað inniber at vísa professionelt ivasemi. Grannskoðarin skal m.a. vera varugur við
- Prógv, sum mótsiga øðrum prógvum
- Upplýsingar, sum sáa iva um, hvørt skjøl og svar uppá fyrispurningar, ið eftir ætlan skulu nýtast sum grannskoðanarprógv, eru álítandi
- Viðurskifti, sum kunnu vera tekin um møguligt svik
- Umstøður, sum kunnu føra til, at tørvur verður á at fremja fleiri atgerðir

Í útgangstøði kann grannskoðari ganga út frá, at skrásetingar og skjøl eru ektað, uttan so at grannskoðari hevur orsøk til at halda tað øvugta. Grannskoðari skal tó altíð umhugsa, um upplýsingar eru álítandi, tá hesar verða nýttar sum grannskoðanarprógv, og um ivi er, skal grannskoðarin kanna tað nærri og fáa viðurskiftini greidd.

Sjálvt um grannskoðarin hevur royndir við leiðsluni í fyritøkuni, skal hann vísa professionelt ivasemi og skal hann ikki vera nøgdur við ivasom grannskoðanarprógv.

Professionelt ivasemi skal vera til staðar undir útinnan av allari uppgávuni soleiðis, at vandin er so lítil sum møguligt fyri, at grannskoðarin ikki gevur sær far um óvanlig viðurskifti, at hann yvirgeneraliserar, tá hann ger niðurstøður grundað á prógvini, ið eru savnað saman, ella hann tekur útgangsstøði í óhóskandi fyritreytum, tá hann gera av slagið, tíðarbundnu plaseringina og vavið av gerðum grannskoðarans.

Tað verður nágreinað í 2. pkt., at grannskoðarin serstakliga skal vísa professionelt ivasemi, tá hann gjøgnumgongur meting leiðslunnar av dagsvirði og avskriving av aktivum, avsetingum og framtíðar gjaldsstreymum, ið hava týdning fyri møguleikarnar hjá grannskoðaðu fyritøkuni at halda fram við rakstrinum. Kravið er bert galdandi, tá grannskoðarin útinnir grannskoðanina. Við nágreiningini verður tað undirstrikað, at grannskoðari ikki uttan víðari kann leggja meting leiðslunnar av virðisásetingunum til grund sum grannskoðanarprógv, men at grannskoðarin hevur eina sjálvstøðuga skyldu til at eftirkanna og seta spurning við grundarlagið og háttin, sum leiðslan hevur nýtt í sambandi við metingina.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 18 og 19 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 26
Talan er um eina fylgibroyting av § 1, nr. 18, sum hevur við sær, at § 10, stk. 3 verður § 10, stk. 4.

Nr. 27
Sambært § 15, stk. 4, 1. pkt. í grannskoðaralógini kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um etikk, um at gera grannskoðarauppgávur og um grannskoðarans veitan av váttanum, heruppií ummælir hjá grannskoðarum av leiðslufrágreiðingum sambært ársroknskaparlógini, og um at gera váttanaruppgávur við trygd og at veita aðrar váttanir við trygd.

Um innihaldið í galdandi heimild hjá landsstýrismanninum verður víst til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 5 í løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015 um broyting av løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir.

Í dag verður heimildin í § 15, stk. 4 nýtt á ein slíkan hátt, at nærri reglur eru ásettar í váttanarkunngerðini (kunngerð nr. 123 frá 25. juli 2019 um grannskoðaraváttanir o.a.). Krøvini í kunngerðini eru samsvarandi ásetingunum í 8. vinnufelagadirektivinum og altjóða grannskoðanarstandardum annars (ISA). Eftir ásetingini er eisini heimild til innan karmarnar av art. 26 í 8. vinnufelagadirektivinum at seta fleiri krøv til grannskoðanina ella undantaka frá ávísum krøvum eftir standardunum, tó innan karmarnar av direktivinum. Við broytingini í § 15, stk. 4 í grannskoðaralógin, sum var gjørd í 2015, varð tað nú heimilað at seta í gildi reglur um váttanarstandard fyri smáar fyritøkur, og eru hesar reglur eisini at finna í váttanarkunngerðini.

Lagt verður upp til, at heimildin hjá landsstýrismanninum í § 15, stk. 4, 1. pkt., sum verður § 15, stk. 5, 1. pkt., at áseta nærri reglur verður broytt soleiðis, at heimilað verður eisini at áseta nærri reglur um at leggja grannskoðanararbeiðið til rættis. Henda heimildin er samsvarandi art. 1, nr. 19 í ES-direktivi 2014/56/EU um gildissetan av art. 24b.

Eftir uppskotinum verður heimildin hjá landsstýrismanninum sostatt víðkað til, at tað verður møguligt í kunngerð eisini at áseta reglur um, hvussu arbeiðið skal leggjast til rættis.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 21 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 28
Í galdandi § 16 í grannskoðaralógini eru ásetingar um, tá grannskoðarin fer úr starvi. Ásetingin í § 16 er sambært stk. 1 galdandi, tá grannskoðari gevur grannskoðanarátekningar og aðrar váttanir við trygd á ársroknskapir v.m. Starv grannskoðarans heldur fram til nýggjur grannskoðari hevur tikið við, um ikki annað fylgir av lóggávuni ella av viðtøkunum hjá einum virki, ella annað er avtalað. Sambært stk. 2, kann grannskoðarin hóast ásetingina í stk. 1 til eina og hvørja tíð fara úr starvi, um hetta ikki stríðir ímóti góðum grannskoðanarsiði. Fer grannskoðari frá, skal grannskoðarin, sum tekur við, venda sær til fráfarandi grannskoðaran, ið hevur skyldu til at upplýsa orsakirnar til, at hann fer frá. Fráfarandi grannskoðarin hevur eisini skyldu til at geva grannskoðaranum, sum tekur við, atgongd til allar týðandi upplýsingar um tað virkið, sum váttanin hjá grannskoðaranum viðvíkur. Skyldan er eitt undantak frá tagnarskylduni, sum annars er galdandi fyri grannskoðarar, sbr. § 28 í

grannskoðaralógini. Endamálið við at geva grannskoðara innlit í allar upplýsingar um fyritøkuna, sum váttan skal gevast um, er, at ein nýggjur grannskoðari kann fáa innlit í øll viðkomandi viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri grannskoðanina av einum ársroknskapi.

Sambært stk. 1 heldur starv grannskoðarans fram inntil ein nýggjur grannskoðari tekur við uttan so, at annað er ásett í lóggávuni ella er avtalað. Grannskoðari kann tó fara úr starvi, um tað ikki er í ósamsvari við meginregluna um góðan grannskoðanarsið. Ein góð grundgeving kann í hesum sambandi vera, at grannskoðarin hevur staðfest, at hann ikki longur lýkur óheftniskrøvini. Í einum slíkum føri er tað beinleiðis eitt krav sambært lógini og sambært meginregluni um góðan grannskoðanarsið, at grannskoðarin fer frá. Í útgangsstøði kann grannskoðari fara úr starvi, um avtalan uttan iva fer at verða mishildin orsakað av, at fyritøkan ikki er før fyri at rinda samsýning grannskoðarans. Hinvegin kann grannskoðarin ikki siga avtaluna upp, um leiðslan í samsvari við § 1, nr. 23 í uppskotinum (og sambært fylgibroytingum í uppskoti, sum er til viðgerðar samstundis sum hetta uppskotið) ikki gevur grannskoðaranum ávísar neyðugar upplýsingar, ella tí grannskoðarin og leiðslan eru ósamd um innihaldið í roknskapinum, t.d. eini ársfrásøgn. Ásett er í váttanarkunngerðini í reglunum um grannskoðanarátekning, at grannskoðarin skal taka fyrivarni í síni átekning. Grannskoðarin er álitisumboðið hjá almenninginum, tá hann grannskoðar, og tí kann grannskoðarin ikki fara úr starvinum fyri á tann hátt at sleppa sær undan skylduni at átekna við fyrivarni. Viðurskiftini millum grannskoðara og hann, sum hevur biðið um uppgávuna, kunnu gerast so ring, at tað gerst greitt, at grannskoðanaravtalan ikki kann verða uppfylt eisini aftaná, at grannskoðarin hevur gjørt tað, hann kann fyri at gjøgnumføra grannskoðanina.

Í § 16, stk. 1 verður í samsvari við galdandi áseting lagt upp til, at starv grannskoðarans heldur fram, til nýggjur grannskoðari hevur tikið við, um ikki annað fylgir av lóggávuni ella av viðtøkunum hjá einum virki, ella annað er avtalað. Orsøkin til hesa høvuðsreglu er, at grannskoðanarkundin skal kunna ganga út frá, at grannskoðarin heldur fram, til uppgávan er loyst. Lagt verður tó upp til, at stk. 1 frameftir einans skal galda fyri grannskoðanarátekning á ársroknskapir o.a. Hetta er í samsvari við 8. vinnufelagadirektivið. Lagt verður upp til, at stk. 1 ikki skal verða galdandi, tá váttanarstandardur fyri smáar fyritøkur verður nýttur. Skyldur grannskoðarans í sambandi við, at hann fer úr starvi, eru eitt nú ikki galdandi, tá grannskoðarin gevur váttanir í sambandi við víðkaða gjøgnumgongd, review, ella hjálpir til við uppseting av roknskapi ella gevur aðra váttan uttan trygd. Nýtsla av hugtakinum ársroknskapur v.m. merkir harafturat, at skyldurnar sambært § 16 einans galda, tá grannskoðarin gevur grannskoðanarátekning á ein roknskap, sum fevnir um eitt heilt roknskaparár.

Lagt verður upp til, at grannskoðari hóast stk. 1 til eina og hvørja tíð kann fara úr starvi, um hetta ikki stríðir móti góðum grannskoðanarsiði. Hvørt tað stríðir móti góðum grannskoðanarsiði at fara úr starvi verður avgjørt eftir eina ítøkiliga meting av umstøðunum í hvørjum einstøkum føri.

Fer grannskoðari frá skal grannskoðarin, sum tekur við, sbrt. uppskotinum til stk. 2, 2. pkt., venda sær til fráfarandi grannskoðaran, ið hevur skyldu til at upplýsa orsakirnar til, at hann fer frá. Hevur fráfarandi grannskoðarin ikki givið seinastu váttanina á ársroknskapin o.a., skal grannskoðarin, sum tekur við, sbrt. stk. 2, 3. pkt. í uppskotinum, eisini venda sær til grannskoðaran, sum hevur givið seinastu váttanina. Bæði grannskoðarin, sum fer frá, og grannskoðarin, sum hevur givið seinastu váttanina, hava skyldu at geva grannskoðaranum,

sum tekur við, atgongd til allar týðandi upplýsingar um tað virkið, sum váttanin hjá grannskoðaranum viðvíkur.

Góður grannskoðanarsiður, sum m.a. fevnir um góðan grannskoðaraatburð, hevur við sær, at fráfarandi grannskoðarin ikki áleggur nýggja grannskoðaranum óneyðugar forðingar. Tí er vanligt, at grannskoðarin, sum tekur við, fær allar tær upplýsingar, ið viðkomandi ynskir.

Tað er sostatt í stóran mun upp til grannskoðaran, sum tekur við, at gera av, hvørjar upplýsingar, sum verða mettar viðkomandi. Grannskoðarin, sum tekur við, skal tó kunna seta fram eina umbøn, sum ítøkiliga greiðir frá, hvørjar upplýsingar viðkomandi ynskir. Umbønin eigur sostatt ikki at vera ov breið ella almenn.

Á sama hátt sum í stk. 2, 3. pkt. í galdandi áseting verður í uppskotinum til stk. 2, 4. pkt. ásett, at bæði fráfarandi grannskoðarin og grannskoðarin, sum hevur givið seinastu váttanina, hava skyldu at geva grannskoðaranum, ið tekur við, allar týðandi upplýsingar um virkið, sum váttanin hjá grannskoðaranum viðvíkur. Grannskoðararnir eru tí ikki fevndir av tagnarskylduni í mun til hesar upplýsingar.

Í fyritøkum, sum ikki eru fevndar av lógarkravi um grannskoðan av ársroknskapinum, men sjálvboðið hava valt at lata roknskapin grannskoða, er somuleiðis eitt krav um, at grannskoðarin, sum fer frá, skal lata grannskoðaranum, sum tekur við starvi, allar viðkomandi upplýsingar. Hetta er treytað av, at grannskoðarin kann skjalprógva, at hann hevur gjørt eina avtalu við fyritøkuna um at grannskoða ársroknskapin fyri komandi roknskaparár. Grannskoðarin, sum tekur við starvi, hevur bert atgongd til upplýsingarnar, um ársroknskapurin fyri árið fyri hevur eina grannskoðanarátekning. Um seinasti grannskoðanaráteknaði ársroknskapurin er eldri enn eitt roknskaparár hevur grannskoðarin, sum hevur grannskoðað hendan roknskapin, ikki skyldu til at geva grannskoðaranum, sum tekur við, upplýsingar.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 23 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 29
Talan er um eina fylgibroyting av § 1, nr. 30, sum hevur við sær, at galdandi § 17, stk. 3 verður til § 17, stk. 4.

Nr. 30
Í § 17 eru yvirskipaðar reglur um grannskoðanarátekningar, heruppií um innihald og um hvør kann og hvør skal geva átekningina. Eisini eru ásetingar um undirskrift av váttanum uttan trygd.

Við ES direktivi 2014/56/EU art. 1, nr. 23 verða broytingar gjørdar í art. 28 í 8. vinnufelagadirektivinum hjá ES um grannskoðanarátekningina. Eftir broyttu ásetingini skal ein felags grannskoðanarátekning verða givin, um fleiri grannskoðarar eru valdir. Ásett er, at grannskoðarar, um teir eru ósamdir, skulu geva hvør sítt úttalilsi í einum serstøkum broti í grannskoðanarátekningini.

Lagt verður upp til, at ein nýggj áseting verður ásett sum stk. 3 í § 17, sum hevur reglur um, hvussu grannskoðaraátekning skal gevast, tá fleiri grannskoðarar eru valdir. Skotið verður upp, at tað í stk. 3, 1. pkt. verður ásett, at um fleiri grannskoðarar eru valdir at geva eina

grannskoðanarátekning, skulu hesir verða samdir um úrslitið av grannskoðanini og geva eina felags grannskoðanarátekning. Grannskoðararnir skulu undirskriva grannskoðanarátekningina í samsvari við krøvini til undirskrift, sum eru ásett í váttanarkunngerðini.

Sambært § 5, stk. 9 í kunngerð nr. 153 frá 23. desember 2016 um grannskoðanarváttanir o.tíl., sum broytt við kunngerð nr. 45 frá 7. apríl 2017, skulu tann ella teir grannskoðarar, sum eru valdir at grannskoða, dagfesta og undirskriva grannskoðanarátekningina. Er talan um eitt grannskoðanarvirki, skulu teir grannskoðarar undirskriva átekningina, sum hava fingið grannskoðanina latna upp í hendur. Navnið á grannskoðanarvirkinum og grannskoðaranum og harafturat tilskilan, um viðkomandi er løggildur ella skrásettur grannskoðari, skal standa týðiliga í átekningini. Hesar upplýsingar skulu týðiliga síggjast fyri hvønn grannskoðara, sum undirskrivar.

Í uppskotinum til stk. 3, 2. pkt. verður støða tikin til, hvussu skal farast fram í teimum førum, tá grannskoðararnir ikki eru samdir um, hvør niðurstøðan er. Í hesum førum skulu grannskoðararnir hvør sær í einum serligum broti í átekningini siga frá orsøkini til ósemjuna.

Tá fleiri grannskoðarar eru valdir at gjøgnumføra eina lógarálagda grannskoðan, skulu hesir grannskoðarar, so vítt tað er gjørligt, semjast um niðurstøðuna. Eru grannskoðararnir ikki samdir, skulu teir meta um, hvørt tað er møguligt at semjast um, at fleiri grannskoðanarprógv verða savnað saman, so semja kann fáast um úrslitið av grannskoðanini. Tað verður nú ásett beinleiðis í lógini, at í teimum førum, tá tað ikki er møguligt at finna eina semju, skulu grannskoðararnir greiða frá sínari niðurstøðu í hvør sínum broti í átekningini.

Hóast grannskoðararnir eru ósamdir, verður bara ein grannskoðaraátekning gjørd. Nýggja ásetingin hevur við sær broyting í mun til áður galdandi praksis, tí sambært stk. 2 skulu grannskoðararnir, hóast ósemja er um úrslitið av grannskoðanini, geva eina átekning.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar § 1, nr. 25 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 31
Í § 18 er krav um, at grannskoðarin skal føra eina grannskoðanarprotokoll, og hvat ein tílík protokoll skal innihalda.

Lagt verður upp til, at § 18 verður broytt. Orsøkin til hetta er, at kravið um at føra eina grannskoðanarprotokoll er í art. 11 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europatinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga. Hetta hevur við sær, at grannskoðanarvirkir, sum eru fevnd av art. 11, og sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga sambært ásetingini í fyriskipanini skulu føra eina grannskoðanarprotokoll. Broytingin í § 18 hevur við sær, at tað ikki longur verður eitt lógarásett krav, at onnur grannskoðanarvirkir enn tey, sum eru fevnd av fyriskipanini, skulu føra eina grannskoðanarprotokoll.

Lagt verður upp til, at tað í § 18 í staðin verður ásett, at tá tað sbrt. art. 11 í fyriskipanini verður gjørd ein grannskoðanarprotokoll, skal hendan – umframt at verða løgd fyri grannskoðanarbólkin – eisini verða løgd fyri nevndina ella eftirlitsráðið í grannskoðaðu fyritøkuni.

At krav̈ið um grannskoðanarprotokoll verður strikað fyri fyritøkur, sum ikki eru PIE-fyritøkur, førir ikki við sær, at leiðslan í fyritøkuni ikki longur fær hesar upplýsingarnar. Altjóða grannskoðanarstandardar ISA 260 (samskifti við evstu leiðsluna) og ISA 265 (samskifti við evstu leiðsluna og dagligu leiðsluna um manglar í innanhýsis eftirlitinum) áleggja grannskoðaranum at geva leiðsluni í grannskoðaðu fyritøkuni eina røð av upplýsingum. Harafturat hevur grannskoðarin eftir øðrum ISA standardum eina skyldu til at kunna um eina røð av øðrum viðurskiftum. Krøvini um at upplýsa sambært ISA 260 og 265 eru í stóran mun tey somu, sum eftir galdandi § 18, stk. 3. Tí hevur grannskoðarin framhaldandi skyldu til at geva leiðsluni í grannskoðaðu fyritøkuni eina røð av upplýsingum.

Sjálvt um krav̈ið um grannskoðanarprotokoll verður strikað fyri aðrar fyritøkur enn PIE-fyritøkur, er tað einki sum forðar fyri, at leiðslan í fyritøkuni avtalar við grannskoðaran, at ein grannskoðanarprotokoll skal gerast. Við uppskotinum verður tað størri frælsi hjá fyritøkunum og grannskoðaranum at gera avtalu um, hvat er best í ítøkiliga førinum.

Krav̈ið um grannskoðanarprotokoll fyri fyritøkur, ið ikki eru PIE-fyritøkur, hevur virknað frá tí, at lógin kemur í gildi. Í teimum førum, har grannskoðanin ikki er endað, áðrenn lógin kemur í gildi, mugu grannskoðari og fyritøka avtala, um ein grannskoðanarprotokoll skal gerast.

Fyri grannskoðan av PIE-fyritøkum er galdandi, at broytingin í § 18 kemur í gildi fyri grannskoðan av roknskaparárum, sum byrja aftaná, at lógin er komin í gildi.

Viðvíkjandi skiftisskipan verður víst til gildiskomureglur lógarinnar.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 26 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi. Í mun til skiftisreglur verður víst til viðmerkingarnar til § 2 í uppskotinum.

Nr. 32
§ 19, stk. 1 og 2 hevur serligar reglur um grannskoðanarprotokollir í fyritøkum av almennum áhuga, heruppií hvørjar upplýsingar grannskoðarin serliga skal geva. Lagt verður upp til, at hesar ásetingar verða strikaðar, tí krøvini nú eru ásett í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga, sum lagt er upp til skal verða sett í gildi í Føroyum, sbrt. lógaruppskoti, ið er lagt fram samstundis sum hetta lógaruppskot.

§ 19, stk. 3 hevur eina upplisting av fyritøkum, sum serligar reglur eru galdandi fyri. Hetta eru fyritøkur av almennum áhuga, sum tó ikki eru allýstar í grannskoðaralógini. Lagt verður upp til, at fyritøkur av almennum áhuga skulu verða allýstar í § 1 a, stk. 1, nr. 3, sbrt. § 1, nr. 4 í hesum lógaruppskoti. Lagt verður tí eisini upp til, at § 19, stk. 3 verður strikað.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 27 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 33
§ 20 í grannskoðaralógini ásetur fráboðanarskyldu grannskoðarans, tá viðkomandi sær ella hevur grundaðan illgruna um fíggjarlig brotsverk.

Lagt verður upp til eitt nýtt stk. 5, sum ásetur, at skyldurnar í stk. 1-4 ikki eru galdandi fyri grannskoðan av ársroknskapum o.ø. hjá fyritøkum av almennum áhuga, tá grannskoðarin er fevndur av skyldunum í artikli 7 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europatinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga.

Orsøkin til hesa broyting er, at fyriskipanin hevur eitt líknandi krav til grannskoðarar, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga. Fráboðanarskyldan í fyriskipanini gongur víðari enn kravið í grannskoðaralógini og fevnir sostatt ikki einans um brot, sum leiðslan fremur, og er galdandi longu, tá grannskoðarin hevur illgruna um ella hevur rímiliga orsøk til at halda, at óreglusemi fer fram ella fer at fara fram.

Tá grannskoðarin ger aðrar uppgávur enn grannskoðan av PIE-fyritøkum, er grannskoðarin fevndur av skyldunum í stk. 1-4 og ikki av ásetingunum í ES-fyriskipanini.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 28 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 34
§ 21, stk. 1 ásetur, at grannskoðarar og grannskoðaravirkir skulu hava arbeiðsskjøl, sum skjalprógva grundarlagið fyri váttanum ella ummælum. § 21, stk. 2-5 ásetur ábyrgdina hjá samtøkugrannskoðara í sambandi við skjalprógv samtøkugrannskoðarans, tá talan er um grannskoðanararbeiði, sum aðrir grannskoðarar hava gjørt við samtøkugrannskoðan fyri eyga.

Lagt verður upp til, at § 21, stk. 2, 1. pkt. verður broytt soleiðis, at arbeiðsskjølini hjá samtøkugrannskoðara, umframt at skjalprógva ta gjøgnumgongd, ið er gjørd í sambandi við tað grannskoðanararbeiði, sum aðrir grannskoðarar hava gjørt við samtøkugrannskoðan fyri eyga, eisini skulu skjalprógva *metingina*, sum er gjørd av hesum grannskoðanararbeiði.

Nýggja orðingin í stk. 2, 1. pkt. hevur ikki við sær størri broytingar í praksis, tí tað longu er so, at grannskoðarin hjá móðurfelagnum í einum samtøkuroknskapi eigur at meta um grannskoðanararbeiðið, sum grannskoðari hjá dótturfelagnum hevur gjørt.

Í stk. 2, 2. pkt. verður lagt upp til, at arbeiðsskjølini eisini skulu skjalprógva, at grannskoðarar hjá dótturfeløgum hava játtað, at viðkomandi skjalprógv um grannskoðanararbeiðið verða givin víðari undir samtøkugrannskoðanini. Hetta hevur við sær, at samtøkugrannskoðarin skal hava skrivligt samtykki frá grannskoðara hjá dótturfelagi um, at hesin gevur neyðugu skjalprógvini víðari til samtøkugrannskoðaran. Verður hetta samtykki ikki givið, kann samtøkugrannskoðarin ikki brúka arbeiðið hjá viðkomandi grannskoðara.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 29 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 35
§ 21, stk. 2-5 ásetur ábyrgdina hjá samtøkugrannskoðara í sambandi við skjalprógv samtøkugrannskoðarans, tá talan er um grannskoðanararbeiði, sum aðrir grannskoðarar hava gjørt við samtøkugrannskoðan fyri eyga.

Lagt verður upp til, at eitt nýtt stk. verður sett í § 21, stk. 3. Ásett verður, at grannskoðarin skal seta hóskandi tiltøk í verk og boða Skráseting Føroya frá, um grannskoðarin ikki fær

møguleika at gjøgnumganga og meta um grannskoðanararbeiðið, sum aðrir grannskoðarar hava gjørt sum liður í samtøkugrannskoðanini, sbrt. stk. 2, 1. pkt.

Ásetingin hevur við sær, at samtøkugrannskoðarin í hesum førum skal seta hóskandi tiltøk í verk. Tað skal verða við í skjalprógvi samtøkugrannskoðarans, hvør forðingin hevur verið, og at grannskoðarin hevur sett hóskandi tiltøk í verk. Samtøkugrannskoðarin skal eisini boða Skráseting Føroya frá, at atgongd ikki fæst til grannskoðanararbeiði viðvíkjandi einum dótturfelag. Skjalprógv skal vera fyri hesi fráboðan.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 30 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 36 og 37
Talan er um fylgibroytingar orsakað av § 1, nr. 35, sum hevur við sær, at § 21, stk. 3 og 4 verða § 21, stk. 4 og 5.

Nr. 38
Grannskoðarar eru í sínum virki álitisumboð hjá almenninginum. Tí er tað sera umráðandi, at grannskoðarar eru óheftir. Sambært § 22, stk. 1 skal ein grannskoðari, ið ger uppgávur, sum § 1, stk. 2 fevnir um, vera óheftur av tí virki, sum uppgávan viðvíkur, og má ikki vera uppií, tá avgerðir verða tiknar í virkinum.

Lagt verður upp til, at § 22, stk. 1 verður umorðað. Broytingin hevur við sær, at skarin, sum sbrt. stk. 1, 1. pkt. er fevndur av ásetingini, verður víðkaður. Kravið um óheftni skal sostatt, umframt at fevna um grannskoðaran, eisini fevna um grannskoðanarvirkir og onnur enn grannskoðararnar í grannskoðanarvirkinum, sum eru knýtt at uppgávuni ella hava eftirlit við, at hon verður framd. Stk. 1, 1. pkt. verður framhaldandi galdandi fyri allar váttanaruppgávur við trygd, sbrt. § 1, stk. 2.

Lagt verður eisini upp til, at tað í § 22, stk. 1, 2. pkt. verður ásett í hvørjum tíðarskeiði óheftni krevst. Ásett verður sostatt, at óheftni krevst bæði í uppgávutíðarskeiðinum, og í tí tíðarskeiði, ið roknskapurin ella tað, sum váttan er fyri, fevnir um. Sambært § 22, stk. 1, 3. pkt. byrjar uppgávutíðarskeiðið, tá farið verður undir uppgávuna, og heldur fram til váttanin er givin. Ásetingin hevur við sær, at ein grannskoðari skal vera óheftur frá byrjanini av tí roknskaparári, sum verður grannskoðað, og til átekningin er givin.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 33 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 39
§ 22, stk. 2 lýsir í høvuðsheitum støður, tá grannskoðarin ikki er óheftur, og tí ikki kann taka á seg uppgávur, sum eru fevndar av § 1, stk. 2.

Lagt verður upp til eina málsliga tillaging í stk. 2, 1. pkt., so *fíggjarlig viðurskifti* verður broytt til *fíggjarlig áhugamál*. Henda málsliga tillagingin hevur við sær málsligt samsvar ímillum ásetingina í lógini og ásetingarnar í kunngerðini um óheftni grannskoðarans og grannskoðanarvirkisins.

Stk. 2, 1. pkt. snýr seg um tær støður, sum kunnu hótta óheftnið hjá grannskoðaranum, og sum grannskoðarin tí skal geva gætur, bæði áðrenn ein uppgáva byrjar, og meðan arbeitt

verður við eini uppgávu. Í kunngerðini um óheftni grannskoðarans og grannskoðanarvirkisins eru hesar støður nágreinaðar. Tað er ein treyt, at talan er um viðurskifti, sum hjá einum vælkunnaðum triðjamanni kunnu vekja iva um óheftni grannskoðarans.

Ásetingin fevnir um beinleiðis og óbeinleiðis fíggjarlig áhugamál millum grannskoðaran og ta fyritøku, sum skal grannskoðast. Fíggjarlig áhugamál fevnir m.a. um eigaraáhugamál, heruppií partabrøv, skuldarbrøv, veðhald o. líkn. Beinleiðis fíggjarlig áhugamál hava altíð við sær óheftni, meðan tað í metingini av óbeinleiðis fíggjarligum áhugamálum verður gjørd ein meting av týdninginum av áhugamálunum. Tey óbeinleiðis fíggjarligu áhugamálini kunnu sostatt ítøkiliga verða mett at hava so lítlan týdning, at tey ikki hótta óheftni grannskoðarans.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 34 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 40 og 41
Sambært galdandi áseting í § 22, stk. 4, 1. pkt. kann ein grannskoðari ikki fremja uppgávur eftir § 1, stk. 2, ið viðvíkja fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyritøkum), um talan er um sjálvgrannskoðan ella egináhugamál.

Sambært § 22, stk. 4, 2. pkt. kunnu tann ella teir grannskoðarar, ið undirskriva grannskoðanarátekningina fyri eina fyritøku av almennum áhuga, ikki taka á seg leiðandi størv í hesi fyritøkuni, fyrr enn 2 ár eru liðin eftir, at viðkomandi er farin frá sum grannskoðari.

Art. 5 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga, ásetur, at ein grannskoðari, sum grannskoðar eina fyritøku av almennum áhuga hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis kann fremja aðrar sokallaðar ikki-grannskoðarauppgávur fyri hesa fyritøku. Í art. 5 er ein listi yvir ikki-grannskoðarauppgávur, sum ein grannskoðari ikki kann gera fyri fyritøkur av almennum áhuga. Lagt er upp til, at fyriskipanin verður sett í gildi í Føroyum, sbrt. lógaruppskoti, sum er lagt fram samstundis sum hetta lógaruppskot.

Nýggjar ásetingar í 8. vinnufelagadirektivinum, sum broytt við direktivi 2014/56/EU, víðka skaran av teimum, sum eru fevnd av forboðnum, og eru nýggju reglurnar í direktivinum eisini galdandi fyri grannskoðarar, ið grannskoða aðrar fyritøkur enn PIE-fyritøkur. Lagt verður tí upp til, at § 22, stk. 4 verður strikað, og at ein nýggj grein verður sett inn í lógina, sum inniheldur hesar ásetingar. Sí í tí sambandi viðmerkingar til nýggju § 22 c, sbrt. § 1, nr. 45.

Sambært § 22, stk. 5, 2. pkt. kann landsstýrismaðurin áseta reglur um sjálvgrannskoðan og egináhugamál, sbr. stk. 4. Av tí, at tað er lagt upp til, at stk. 4 verður strikað, er eisini lagt upp til, at henda áseting skal strikast. Reglur um sjálvgrannskoðan og egináhugamál í sambandi við grannskoðan av PIE-fyritøkum verða frameftir regulerað í art. 5 í ES-fyriskipan nr. 537/2014 af 16. april 2014.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 35 og 36 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 42
Sambært § 22, stk. 6, 1. pkt. í grannskoðaralógini skal eitt grannskoðanarvirki gera leiðreglur, ið tryggja, at grannskoðari, áðrenn hann átekur sær uppgávur sambært § 1, stk. 2, tekur støðu

til, um tað eru viðurskifti, sum hjá einum vælkunnaðum triðjamanni kunnu vekja iva um óheftnið hjá viðkomandi.

Lagt verður upp til at strika stk. 6, 1. pkt. av tí, at tað í nýggju § 14 a um góðkenning og framhald av grannskoðarauppgávu verður lagt upp til, at grannskoðarin frammanundan einari grannskoðanaruppgávu skal meta um og skjalprógva, at krøvini um óheftni eru lokin.

Sí viðmerkingarnar til § 14 a omanfyri undir § 1, nr. 23.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 35 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 43
Talan er um eina málsliga broyting, sum kemst av, at § 22, stk. 6, 1. pkt. verður strikað. Sí viðmerking til broytingina í § 1, nr. 42.

Nr. 44
Tað eru ongar ásetingar í grannskoðaralógini um, hvussu grannskoðarar skulu bera seg at við framhaldandi at tryggja óheftni í teimum førum, tá eitt virki verður yvirtikið, leggur saman við ella yvirtekur eitt annað í roknskapartíðarskeiðinum.

Í samsvari við ásetingar í art. 22 í 8. vinnufelagadirektivinum, sum broytt við direktiv 2014/56/EU verður lagt upp til at áseta í § 22, stk. 6 í grannskoðaralógini, at ein grannskoðari, ið grannskoðar eitt virki, sum í roknskapartíðarskeiðinum verður yvirtikið, leggur saman við ella yvirtekur eitt annað virki, skal eyðmerkja og meta um øll fyrrverandi og núverandi áhugamál ella samstørv, heruppií latan av møguligum øðrum veitingum enn grannskoðan til virkið, sum við fyriliti fyri atkomuligum trygdarfyriskipanum kann hava við sær, at óheftni grannskoðarans og evni til at halda fram við grannskoðanini aftaná samanleggingar- ella yvirtøkudagin, kemur í vanda. Ásetingin er einans galdandi í teimum førum, har grannskoðarin grannskoðar og ikki, tá grannskoðarin einans veitir aðrar tænastur.

Lagt verður harafturat upp til, at tað í § 22, stk. 7 verður ásett, at grannskoðarin skjótast gjørligt og í seinasta lagi innan 3 mánaðir skal taka øll neyðug stig til at enda núverandi áhugamál og samstørv, sum sbrt. stk. 6 kunnu hótta óheftni grannskoðarans. Grannskoðarin skal eisini skipa fyri trygdartiltøkum fyri at minka um møguligar hóttanir ímóti sínum óheftni, sum kunnu koma av fyrrverandi og áleikandi áhugamálum og samstørvum.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 39 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 45
§ 22 a
Í art. 5 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga er ásett, at ein grannskoðari, sum grannskoðar eina fyritøku av almennum áhuga, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis kann gera eina røð av ikki-grannskoðanaruppgávum. Millum tær ikki loyvdu grannskoðanaruppgávurnar eru ávísar uppgávur innan skatt, og ávísar metingar o.a.
Í art. 5 er ein listi yvir veitingar, sum ein grannskoðari ikki kann lata fyritøkum av almennum áhuga.

Sum greitt er frá í almennu viðmerkingunum er ein fyriskipan beinleiðis galdandi í ES-limalondunum, og útgangsstøðið er, at londini í útgangsstøði ikki kunnu áseta serligar nationalar reglur um viðurskifti, sum eru fevnd av fyriskipanini.

Í art. 5, stk. 3 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga er tó lagt upp til, at limalondini hvør sær kunnu velja at áseta í nationalari lóggávu, at grannskoðarar undir nærri ásettum treytum kunnu veita grannskoðaðu fyritøkuni tænastur, sum eru fevndar av art. 5, stk. 1.

Í Danmark er heimildin í art. 5, stk. 3 nýtt til at áseta reglur, sum víkja frá ásetingini í art. 5, stk. 1. Mett verður, at tað er skilagott at áseta somu reglur í Føroyum á hesum økinum.

Lagt er tí upp til, at tað í § 22 a, stk. 1 verður ásett, at ein grannskoðari ella grannskoðanarvirki, sum grannskoðar fyritøkur av almennum áhuga, uttan mun til ásetingina í art. 5, stk. 1 í ES-fyriskipanini, kunnu fremja ávísar uppgávur fyri grannskoðanarkundan og tess móður- og dótturfyritøkur, heruppií ávísar nevndar uppgávur innan skatt, metingar í sambandi við veitingar frá aktuari og í sambandi við rættarmál.

Stk. 2 ásetur, hvørjar treytir skulu vera loknar, fyri at grannskoðarin kann veita tænastur sbrt. stk. 1.

Treytirnar eru, at uppgávurnar hvør sær ella saman onga ella týdningarleysa ávirkan hava á grannskoðaða roknskapin, at metingin av ávirkanini á grannskoðaða roknskapin er skjalprógvað og greidd frá í grannskoðanarprotokollini, sum er latin grannskoðanarbólkinum og nevndini, sbrt. art. 11 fyriskipanini, og at grannskoðarin og grannskoðanarvirkið lúka treytirnar um óheftni í § 22.

§ 22 b
Art. 4 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga hevur ymsar ásetingar um samsýningina fyri grannskoðan.

Art. 4, stk. 2 ásetur, at ein grannskoðari ella grannskoðanarvirki, sum í trý ella fleiri fylgjandi roknskaparár veitir einari fyritøku av almennum áhuga, tess móðurfyritøku ella samtøkufyritøkum, hvørs roknskap grannskoðarin ella grannskoðanarvirkið grannskoðar, aðrar ikki-grannskoðanartænastur enn tær, sum eru nevndar í art. 5, kann samsýningin fyri hesar ikki-grannskoðanartænastur í mesta lagi vera 70% av miðalsamsýningini fyri grannskoðanina trý tey seinastu árini og – um tað er viðkomandi – grannskoðan av móðurfyritøkuni, og teimum fyritøkum, sum hon hevur ræði á, og grannskoðan av samtøkuroknskapinum.

Ásetingin er við til at tryggja, at grannskoðarar ikki gjøgnum samsýningar fyri ikki-grannskoðanaruppgávur verða fíggjarliga tengdir at einari fyritøku av almennum áhuga á ein slíkan hátt, at spurnartekin kann verða sett við óheftni.

Sambært fyriskipanini er møguleiki fyri, at ES-limalondini í nationalari lóggávu loyva undantaki frá ásetingini í serligum førum.

Tí verður lagt upp til, at tað í § 22 b, stk. 1 verður ásett, at Skráseting Føroya eftir grundaða umsókn frá grannskoðara ella grannskoðanarvirki í hendinga førum og undir heilt serligum umstøðum kann geva grannskoðaranum ella grannskoðanarvirkinum undantak frá avmarkingini í art. 4, stk. 2. Undantak eigur einans at verða givið í einstøkum førum, og kann m.a. verða givið, um tað hevur við sær týðandi bága fyri grannskoðanarkundan um grannskoðarin ikki luttekur.

Um undantøka verður givin, kann tað sambært stk. 2 í mesta lagi verða fyri 1 roknskaparár.

§ 22 c
Sambært § 22, stk. 4, 2. pkt. í galdandi lóg kunnu tann ella teir grannskoðarar, ið undirskriva grannskoðanarátekningina fyri eina fyritøku av almennum áhuga, ikki taka á seg leiðandi størv í hesum virki, fyrr enn 2 ár eftir, at viðkomandi er farin frá sum grannskoðari.

Lagt verður upp til eina nýggja áseting í § 22 c, stk. 1, sum avmarkar møguleikarnar hjá grannskoðarum at taka á seg leiðandi størv el.líkn. hjá grannskoðanarkundanum.

Lagt verður upp til at áseta í § 22 c, stk. 1, at tann ella teir grannskoðarar, sum undirskriva grannskoðararátekningina í einum virki, ikki kunnu taka á seg leiðandi størv ella gerast limir í nevndini ella eftirlitsráðnum ella grannskoðanarbólki í hesum virki fyrr enn 1 ár eftir, at viðkomandi er farin frá sum grannskoðari. Lagt verður upp til, at hetta ikki skal verða galdandi, um grannskoðanin er framd eftir váttanarstandardi, sbrt. § 135, stk. 1, 2. pkt. í ársroknskaparlógini. Viðvíkur grannskoðaraátekningin hinvegin einari fyritøku av almennum áhuga, er bannið galdandi í 2 ár.

Sambært stk. 2 verður bannið í stk. 1 víðkað til eisini at fevna um grannskoðarar, sum eru knýttir at grannskoðanarvirkinum, og sum hava verið beinleiðis knýttir at grannskoðanini.

Lagt verður upp til, at § 22, stk. 4, 2. pkt. verður strikað. Sí viðmerkingar omanfyri til § 1, nr. 40.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 40 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), fylgiskjal 2, og til § 1, nr. 10 og 11 í áliti frá 12. maj 2016 frá Erhvervs-, Vækst- og Eksportudvalget í Fólkatinginum til uppskotið, fylgiskjal 3, sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 46
Sambært galdandi § 23 skal eitt grannskoðanarvirki, ið grannskoðar fyritøkur av almennum áhuga tryggja, at tann ella teir grannskoðarar, ið undirskriva grannskoðanarátekningina, í seinasta lagi 7 ár eftir, at teir eru tilnevndir at gera uppgávuna, verða skiftir út fyri eitt tíðarskeið, sum er í minsta lagi 2 ár.

Í artikli 17, stk. 7 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga eru reglur um útskifting av grannskoðarum í grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga.

Lagt er upp til, at fyriskipanin skal verða sett í gildi í Føroyum, sbrt. lógaruppskoti, sum er lagt fram samstundis sum hetta lógaruppskot. Tí er lagt upp til, at grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga frameftir verður fevnd av ásetingunum í ES-fyriskipanini um útskifting

av grannskoðara. Sambært reglunum í artikli 17, stk. 7 í fyriskipanini verður tíðarskeiðið, sum í dag er 2 ár, longt til 3 ár, og harvið verður tíðarskeiðið, sum ábyrgdarhavandi grannskoðarin skal vera skiftur út, longt.

Skotið verður upp, at ásetingin í § 23 verður broytt soleiðis, at ásetingin um at skifta ábyrgdarhavavandi grannskoðaran út í seinasta lagi aftaná 7 ár, nú verður galdandi fyri grannskoðanarvirkir, sum grannskoða stórar fyritøkur, sum ikki eru PIE-fyritøkur. Á tann hátt verða somu reglur galdandi fyri grannskoðarar, sum undirskriva grannskoðanarátekningina í PIE-fyritøkum, og grannskoðarar, sum undirskriva grannskoðanarátekningina í fyritøkum, sum lúka treytirnar, ið eru ásettar í § 23, stk. 2 í uppskotinum.

Víst verður í síni heild víst til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 12 í áliti frá 12. maj 2016 frá Erhvervs-, Vækst- og Eksportudvalget í Fólkatinginum til uppskotið, fylgiskjal 3, sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 47
Sambært § 24, stk. 1 kann eitt grannskoðanarvirki ikki í 5 fylgjandi roknskaparár hava ein størri part av sínum umsetningi enn 20 prosent hjá sama kunda. Skráseting Føroya kann geva undantak frá hesum, um serligar umstøður eru.

Art. 4, stk. 3 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga hevur serligar ásetingar um, hvussu stóran part av umsetninginum eitt grannskoðanarvirki kann hava frá somu fyritøku av almennum áhuga.

Lagt verður upp til, at ásetingin í § 24, stk. 1 – sum ikki er avmarkað til grannskoðanarvirkir, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga – verður strikað. Hetta hevur við sær – um fyriskipanin verður sett í gildi í Føroyum, sum lagt er upp til í lógaruppskoti, sum verður lagt fram samstundis sum hetta lógaruppskot – at ásetingar um, hvussu stórur partur av umsetninginum kann koma frá einum kunda, einans fer at verða galdandi fyri grannskoðanarvirkir, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga.

Hóast § 24, stk. 1 verður strikað, skal ein grannskoðari ella grannskoðanarvirki framhaldandi geva gætur, hvørt tað ávirkar óheftnið hjá grannskoðaranum ella grannskoðanarvirkinum, at ein stórur partur av samsýningini kemur frá einum kunda, sum ikki er ein fyritøka av almennum áhuga sambært fyriskipanini.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 42 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 48
Talan er um fylgibroytingar til § 1, nr. 47, sum hevur við sær, at § 24, stk. 2 verður § 24, stk. 1.

Nr. 49
Sambært § 25, sum er einasta ásetingin í kapitli 5, skulu grannskoðanarvirkir, ið gera uppgávur sambært § 1, stk. 2 fyri fyritøkur av almennum áhuga, árliga almannakunngera eina frágreiðing um gjøgnumskygni.

Í art. 13 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga eru krøv um árliga almannakunngering av frágreiðingum um gjøgnumskygni.

Lagt er upp til, at fyriskipanin skal verða sett í gildi í Føroyum, sbrt. lógaruppskoti, sum verður lagt fram samstundis sum hetta lógaruppskot. Tí er lagt upp til, at kapittul 5 og § 25 verða strikað.

Nr. 50
Heitið á kapitli 6 er góðskustýring og góðskueftirlit.

Lagt verður upp til broytingar í kapitli 6, sum m.a. snúgva seg um innanhýsis skipanina hjá grannskoðanarvirkjum. Tí verður skotið upp, at heitið á kapitli 6 verður broytt, so tað eisini fevnir um innanhýsis skipan.

Nr. 51
Sambært § 26, stk. 1 skulu grannskoðanarvirkir hava eina góðskustýringarskipan, eins og tey skulu kunna skjalprógva nýtsluna av henni. Sambært stk. 2 kann landsstýrismaðurin áseta reglur um innihaldið av góðskustýringarskipanini og um skjalprógvið fyri nýtsluna av henni. Heimildin í stk. 2 er ikki nýtt.

Lagt verður upp til, at § 26, stk. 1 verður umorðað, so tað stendur í lógini, at grannskoðanarvirkir skulu hava eina innanhýsis skipan, heruppií eina góðskustýringarskipan, ið skal forða fyri møguligum hóttanum ímóti óheftni og partloysi hjá grannskoðanarvirkinum og grannskoðaranum og somuleiðis tryggja góðsku, integritet og nærlagni í sambandi við váttanaruppgávur. Grannskoðanarvirkið skal, fyri at fylgja hesum, taka hædd fyri stødd og rakstrareyðkenni virkisins, og um tað er við í einum netverki.

Sambært stk. 2 skulu grannskoðanarvirkir kunna skjalprógva, at krøvini í stk. 1 eru lokin, heruppií at góðskustýringarskipanin verður nýtt.

Lagt verður upp til, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um krøvini til innanhýsis skipanina og um innihaldið av góðskustýringarskipanini og um skjalprógvið fyri nýtsluna av henni. Lagt verður upp til, at landsstýrismaðurin við hesi heimild skal áseta nærri reglur í kunngerð um, hvørji krøv eru til innanhýsis skipanina hjá grannskoðanarvirkjunum.

Um skiftistíð verður víst til viðmerkingarnar til § 3, stk. 2 niðanfyri.
Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 46 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 52
Grannskoðaralógin hevur eingi krøv um, at grannskoðanarvirki skulu hava skipanir, sum gera tað møguligt hjá starvsfólki at fráboða brot og møgulig brot á grannskoðaralógina.

Tað verður skotið upp, at tað verður ásett í § 26 a í lógini, at grannskoðanarvirkir sum liður í góðskustýringarskipanini skulu hava eina serliga skipan, sum gevur starvsfólki teirra møguleika at fráboða brot og møgulig brot á grannskoðaralóggávuna. Fráboðanirnar skulu kunna vera dulnevndar.

Ein tílík varskógvaraskipan, sum grannskoðanarvirkir skulu hava, skal liggja innanfyri teir karmar, sum verða settir í aðrari lóggávu, heruppií løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum.

Gjøgnum varskógvaraskipanina skal tað verða møguligt hjá starvsfólki at boða frá brotum og møguligum brotum, uttan at tað er sett krav um, at brotið skal vera av ávísum álvarsligum slag. Varskógvaraskipanin er tó einans galdandi fyri brot og møgulig brot á grannskoðaralóggávuna. Tað hevur við sær, at fráboðan um brot á eitt nú revsilógina ikki er fevnt av skipanini. Grannskoðaralóggávan skal skiljast sum grannskoðaralógin, kunngerðir við heimild í lógini og fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga, sum sett í gildi í Føroyum, sbrt. lógaruppskoti, sum er sett fram samstundis sum hetta lógaruppskot.

Tað er umráðandi, at tað er møguligt hjá starvsfólki dulnevnt at fráboða brot. At fráboðanin skal kunna verða dulnevnd inniber, at tað skal verða møguligt hjá starvsfólki at fráboða uttan at upplýsa navn o.s.fr. Tað skal heldur ikki verða møguligt gjøgnum ip-adressu el.líkn. at eyðmerkja viðkomandi.

Lagt verður upp til, at tað verður ásett í stk. 2, at starvsfólkið ikki má vera fyri ólagaligari viðferð ella ólagaligum fylgjum orsakað av, at starvsfólkið hevur boðað frá broti ella møguligum broti á grannskoðaralóggávuna.

Í útgangsstøði er øll ólagalig viðferð ella ólagaligar fylgjur fevndar av stk. 2. Ólagaliga viðferðin ella fylgjurnar kunnu – umframt uppsøgn – verða starvslækking, starvsflyting, arging el.líkn.

Tað er ein fortreyt fyri at verða fevndur av stk. 2, at starvsfólkið hevur boðað frá broti ella møguligum broti, og at tað er atvoldarsamband millum fráboðanina og ólagaligu viðferðina ella fylgjuna. Hetta hevur m.a. við sær, at einans ólagalig viðferð ella ólagalig fylgja, sum starvsfólkið verður fyri eftir at hava fráboðað brot, eru fevndar av stk. 2.

Í stk. 3 verður lagt upp til, at kravið um at hava eina varskógvaraskipan ikki skal vera galdandi fyri grannskoðanarvirkir, sum bara hava ein grannskoðara knýttan at sær ella grannskoðanarvirkir, sum bara fáast við aðrar uppgávur enn at grannskoða roknskapir.

Um skiftistíð verður víst til viðmerkingarnar til § 2 í uppskotinum.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 47 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 53
Talan er um fylgibroyting av § 1, nr. 52, sum hevur við sær, at § 26 a verður sett í grannskoðaralógina.

Nr. 54
Sambært § 27, stk. 3 skal góðskueftirlit fara fram við í mesta lagi 6 ára millumbilum. Góðskueftirlitið skal tó fara fram við í mesta lagi 3 ára millumbilum í grannskoðanarvirkjum, ið grannskoða roknskapir hjá fyritøkum av almennum áhuga. Sambært stk. 4 skal eitt grannskoðanarvirki, har góðskueftirlit fer fram, geva grannskoðaraeftirlitinum og

góðskueftirlitsfólkinum høvi til at gera tær kanningar, ið mettar vera neyðugar, og skal síggja til, at grannskoðaraeftirlitið og góðskueftirlitsfólkið fær tær upplýsingar og ta hjálp, ið verða mettar neyðugar fyri at fremja góðskueftirlitið. Grannskoðarar, ið eru knýttir at grannskoðanarvirkinum, hava samsvarandi skyldur mótvegis Grannskoðaraeftirlitinum og eftirlitsfólkinum.

Lagt verður upp til, at stk. 3, 1. pkt. verður orðað soleiðis, at í grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða roknskap hjá miðalstórum og stórum fyritøkum, skal góðskueftirlitið fara fram við í mesta lagi 6 ára millumbilum. Í øðrum grannskoðanarvirkjum, sum geva váttanir eftir § 1, stk. 2, skal góðskueftirlitið verða grundað á eina váðameting. Hetta hevur við sær, at í grannskoðaravirkjum, sum einans geva váttanir til smáar fyritøkur, kann verða longri enn 6 ár ímillum hvørt góðskueftirlit. Hinvegin kann ein ítøkilig váðameting hava við sær, at góðskueftirlitið verður oftari.

Lagt verður upp til, at stk. 3, 1. pkt. ikki skal verða galdandi fyri góðskueftirlit, sum er fevnt av art. 26, stk. 2 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga av tí, at tað er lagt upp til, at fyriskipanin verður sett í gildi í Føroyum, sbrt. lógaruppskoti, sum er sett fram samstundis sum hetta lógaruppskot.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 50 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi. Tó skal verða lagt til merkis, at tað í hesum uppskoti til broyting í grannskoðaralógini ikki verða gjørdar broytingar í § 27, stk. 4, meðan ásetingin í § 29, stk. 4 í revisorloven verður broytt orsakað av broytingum í eftirlitinum sambært revisorloven.

Nr. 55
Talan er um eina fylgibroyting sum kemst av, at § 154 í revsilógini er strikað.

Nr. 56
Í § 29 í grannskoðaralógini er krav um, at fyritøkur, hvørs virðisbrøv verða handlað á einum skipaðum marknaði í einum ES/EBS-landi, skulu seta ein grannskoðanarbólk. Eisini eru ásetingar um, hvussu hesin bólkur skal verða settur saman og hvørjar uppgávur, bólkurin skal røkja.

Broytingarnar í ES-reglunum (fyriskipanini og direktivinum) hava við sær, at krav skal setast um, at allar fyritøkur av almennum áhuga – og ikki einans fyritøkur, hvørs virðisbrøv verða handlað á einum skipanum marknaði í einum ES/EBS-landi – skulu hava ein grannskoðanarbólk.

Orsakað av hesum broytingunum í ES-reglunum verður lagt upp til, at § 29 í grannskoðaralógini eisini verður broytt.

Lagt verður upp til, at tað verður ásett í § 29, stk. 1, 1. pkt., at allar fyritøkur av almennum áhuga, sbrt. allýsingini í § 1 a, stk. 1, nr. 3, skulu hava ein grannskoðanarbólk, um ikki annað er ásett í stk. 4, 5, 7 ella 8. Stk. 1, 2. pkt. ásetur, at í grannskoðanarbólkinum skulu vera persónar, sum eru limir í eftirlitsráðnum ella í nevndini, sum ikki samstundis eru í stjórnini, ella persónar, sum eru valdir av aðalfundinum ella samsvarandi myndugleika at vera í bólkinum. Stk. 1, 3. pkt. snýr seg um samansetingina av grannskoðanarbólkinum og ásetur, at

meirilutin av grannskoðanarbólkinum, heruppií formaðurin, skal verða óheftur, uttan so at einans limir í nevndini ella eftirlitsráðnum eru í bólkinum.

Stk. 1, 4. pkt. ásetur, at í minsta lagi ein limur í grannskoðanarbólkinum skal hava útbúgving/førleikar innan roknskap ella grannskoðan. Henda áseting skal tryggja, at førleikar eru í grannskoðanarbólkinum at røkja tær uppgávur, bólkinum verður álagt, heruppií sbrt. stk. 3.

Stk. 1, 5. pkt. ásetur, at limirnir í grannskoðanarbólkinum sum heild skulu hava førleikar viðkomandi fyri virkisøkið hjá fyritøkuni.

Tað er evsta leiðsla, sum hevur ábyrgdina av, at grannskoðanarbólkurin verður settur saman sambært krøvunum í stk. 1, pkt. 2-5.

Lagt verður upp til, at tað í stk. 2 verður ásett, at persónur, sum er valdur av aðalfundinum ella samsvarandi myndugleika at vera limur í grannskoðanarbólkinum, er í hesum starvi fevndur av somu reglum, sum limir í grannskoðanarbólkinum, sum eisini eru limir í nevndini ella eftirlitsráðnum.

Endamálið við hesi áseting er at tryggja, at persónar, sum verða valdir av aðalfundinum ella samsvarandi myndugleika, hava somu rættarstøðu, sum persónar, sum eru limir í evstu leiðsluni. Ásetingin er nýggj, og er ein avleiðing av orðingini av stk. 1, sum hevur við sær, at persónar, sum ikki eru limir í evstu leiðsluni, kunnu gerast limir í grannskoðanarbólkinum.

Lagt verður upp til, at tær uppgávur, sum grannskoðanarbólkurin í minsta lagi skal hava, verða nevndar í stk. 3, nr. 1-6. Uppgávurnar í nr. 2-5 eru í stóran mun tær somu, sum eru nevndar í § 29, stk. 2 í galdandi grannskoðaralóg, men verða tó í nýggja uppskotinum nágreinaðar nakað. Afturat hesum verður í stk. 3, nr. 1 ásett, at grannskoðanarbólkurin skal geva samlaðu evstu leiðslu boð um niðurstøðuna av lógarásettu grannskoðanini, heruppií mannagongdini fyri roknskapargreiðslu, eins og grannskoðanarbólkurin sbrt. stk. 3, nr. 6 skal vera ábyrgdari fyri mannagongdini fyri vali og tilnevning av grannskoðara til val sambært art. 16 í fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga.

Ongar broytingar eru í stk. 4, 5 og 6 í mun til galdandi ásetingar í § 29, stk. 4, 5 og 6.

Tá tað í stk. 5 er ásett, at evsta leiðslan kann útinna uppgávurnar hjá grannskoðanarbólkinum, um nevndarformaðurin ikki er í leiðsluni, verður hugsað um aðrar fyritøkur/virkir enn kapitalfeløg. Nevndarformaðurin í einum kapitalfelag, hvørs partabrøv verða handlað á einum skipaðum marknaði, kann ikki vera limur í leiðsluni, sbrt § 114 í partafelagslógini. Ásetingin er serliga ætlað smærri fyritøkum, sum ikki verða riknar sum kapitalfeløg.

Í stk. 7, nr. 1-5 er ásett hvørjar fyritøkur, sum eru fevndar av høvuðsregluni um at hava ein grannskoðanarbólk, eru undantiknar kravinum.

Fyritøkurnar, sum eru fevndar av stk. 7, nr. 1-5, kunnu velja at hava ein grannskoðanarbólk, hóast undantakið.

Í stk. 8 er ásett, at ein fyritøka sambært stk. 7, nr. 4, ið velur ikki at skipa ein grannskoðanarbólk, í síni ársfrásøgn skal greiða frá, hví hon ikki metir tað skynsamt at skipa

ein grannskoðanarbólk, at hava eina nevnd ella eitt eftirlitsráð, sum hevur ábyrgd av at útinna leiklutin hjá grannskoðanarbólkinum.

Uppskotið til § 29 førir samanumtikið við sær, at tað verður smidligari hjá fyritøkunum at seta saman ein grannskoðanarbólk, tí tað verður ikki longur eitt krav, at limirnir í grannskoðanarbólkinum eisini eru í evstu leiðsluni í fyritøkuni. Í minsta lagi ein limur í bólkinum skal hava førleikar innan roknskapargreiðslu og/ella grannskoðan, og limirnir í grannskoðanarbólkinum skulu samanumtikið hava førleikar, ið eru viðkomandi fyri grannskoðaðu fyritøkuna.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 53 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 57
Í kap. 9 í grannskoðaralógini eru reglur um almenna eftirlitið við grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum. Sambært 8. vinnufelagadirektivinum skal ein munagóð almenn eftirlitsskipan skipast, sum fevnir um allar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir. Harafturat er í direktivinum ásett, at tað skal vera ein málførur myndugleiki, sum hevur ábyrgdina av eftirlitinum. Fyri at kunna útinna eitt munagott eftirlit – eisini við grannskoðanini í samtøkum, sum virka tvørtur um landamørk – er ásett í direktivinum, at almennu eftirlitini innan ES/EBS-økið skulu samstarva í sambandi við útinnan av eftirlitsuppgávuni. Harafturat verður karmarnir ásettir fyri samstarvinum millum eftirlitsmyndugleikar í teimum londunum, sum eru uttanfyri ES/EBS-økið.

Sambært § 30 í galdandi lóg hevur Skráseting Føroya ábyrgdina av eftirlitinum við grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum, heruppií ábyrgdina av eftirlitinum við próvtøku og eftirútbúgving, góðskueftirliti, kanningum, dissiplinermálum og samstarvi við og flytan av upplýsingum til málsførar myndugleikar í øðrum londum. Skráseting Føroya kann í sambandi við sítt virksemi sambært stk. 1 og 2 útvega sær upplýsingar frá øðrum føroyskum og útlendskum málsførum myndugleikum og krevja neyðugar upplýsingar frá grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum, heruppií latan av arbeiðsskjølum og øðrum skjølum viðvíkjandi uppgávum, framdar sambært § 1, stk. 2.

Í broyttu ES-reglunum verða nýggjar uppgávur álagdar málføra myndugleikanum, ið víðka virkisøkið hjá myndugleikanum. Tað snýr seg m.a. um, at limir í evstu leiðsluni ella grannskoðaranevndin í eini fyritøku av almennum áhuga kunnu revsast fyri brot á grannskoðaralóggávuna, sbr. art. 30 a í ES-direktivi 2014/56/EU. Harafturat snýr tað seg um eftirlit og meting av gongdini á grannskoðanarmarknaðinum fyri lógálagdar veitingar til PIE-fyritøkur, sbr. art. 27 í fyriskipanini.

Stk. 1 er óbroytt í mun til galdandi áseting í § 30, stk. 1.

Stk. 2 er ein gildissetan av art. 32 og 33 í 8. vinnufelagadirektivinum. Í stk. 2 eru tær uppgávur nevndar, sum liggja hjá eftirlitinum. Uppgávurnar eru tær somu sum eftir galdandi áseting, men lagt er nú afturat í stk. 2, nr. 1, at eftirlitið eisini fevnir um eftirútbúgving sambært § 4. Í stk. 2, nr. 2 er gjørd ein broyting soleiðis, at tað nú ístaðin fyri at vísa til §§ 34-36 verður víst til §§ 32-34. Talan er um eina avleiðing av broytingum í ásetingunum, sum víst verður til.

Stk. 3 er ein nýggj áseting, har nýggju eftirlitsuppgávurnar hjá Skráseting Føroya verða nágreinaðar. Sambært uppskotinum til stk. 3, nr. 1 hevur Skráseting Føroya ábyrgd av at hava eftirlit við, at limir í evstu leiðsluni ella grannskoðanarbólkinum í einari PIE-fyritøku yvirhalda tær skyldur, sum grannskoðaralógin, ES-fyriskipanin og ES-direktivið áseta.

Sambært stk. 4 fær Skráseting Føroya heimild til at innheinta tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at kunna røkja uppgávurnar, sum eru álagdar stovninum sambært stk. 1-3. Ásetingin svarar til ásetingina í § 30, stk. 3 í galdandi lóg.

Sambært ásetingini í stk. 3, nr. 1 hevur Skráseting Føroya ábyrgd av at hava eftirlit við, at limir í evstu leiðsluni ella grannskoðanarbólkinum í einari PIE-fyritøku yvirhalda tær skyldur, sum grannskoðaralógin, ES-fyriskipanin og ES-direktivið áseta. Í stk. 5 verður skotið upp, at Fíggjareftirlitið og Tryggingareftirlitið hava hetta eftirlitið við fyritøkum av almennum áhuga, ið ávíkavist eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum og Tryggingareftirlitinum.

Sambært § 1 a, stk. 1, nr. 3 í grannskoðaralógini eru børsskrásettar fyritøkur og fyritøkur, sum eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum og Tryggingareftirlitinum, fevndar av hugtakinum fyritøkur av almennum áhuga. Tað er sostatt, tá talan er um eina slíka fyritøku, at Fíggjareftirlitið ella Tryggingareftirlitið kemur í staðið hjá Skráseting Føroya, og skal útinna eftirlitið, sum tað er lýst í § 30, stk. 3, nr. 1 í grannskoðaralógini. Skotið verður upp, at Fíggjareftirlitið og Tryggingareftirlitið kunnu útinna tær heimildir, sum eru lýstar í § 30, stk. 4 í lógini.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 54 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Í stk. 6. er ásett, at fyritøkurnar av almennum áhuga, sum koma undir eftirlit sambært stk. 3, nr. 1 bera útreiðslurnar av eftirlitinum. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um gjald fyri eftirlitið. Talan er um eftirlitið hjá Skráseting Føroya við, at limir í evstu leiðsluni ella grannskoðanarbólkinum í einari PIE-fyritøku yvirhalda tær skyldur, sum grannskoðaralógin, ES-fyriskipanin og ES-direktivið áseta.

Nr. 58
Skotið verður upp at broyta § 31, stk. 5 soleiðis, at heimildin at gera avtalu við myndugleikar í øðrum londum um prógvtøkuhald og prógvtøkudøming verður víðkað soleiðis, at heimild eisini verður at gera avtalu við Foreningen for Statsautoriserede Revisorer í sambandi við prógvtøkuhald og prógvtøkudøming.

Broytingin hevur ongar broytingar við sær í galdandi skipan í mun til leiklutirnar hjá ávikavist Skráseting Føroya og hjá Prógvtøkunevndini í sambandi við prógvtøkuhald og prógvtøkudøming.

Orsøkin til, at heimildin at gera avtalu við Foreningen for Statsautoriserede Revisorer verður ásett, er, at umskipanir hava verið í Danmark í sambandi við fyriskipan av prógvtøkum fyri grannskoðarar. Orsakað av umskipanini kann væntast, at neyðugt eisini er at skipa samstarv við Foreningen af Statsautoriserede Revisorer í framtíðini.

Orðingin “myndugleikar í øðrum londum” verður broytt til “Erhvervsstyrelsen”, tí í praksis hevur samstarv verið við henda myndugleika um prógvtøkuhald og prógvtøkudøming. Í donsku revisorloven er heimild til, at Erhvervsstyrelsen kann skipa eitt samstarv við Skráseting Føroya í sambandi við prógvtøkuhald og prógvtøkudøming.

Nr. 59
Av tí, at tað er neyðugt at broyta samansetingina av limum í Grannskoðaraeftirlitinum, verður skotið upp at broyta ásetingina í § 32, stk. 1, 3. pkt.

Tað er eitt krav sambært ES-direktivi 2014/56, at almenna eftirlitið við grannskoðarum virkar óheft av vinnuni, tá avgerðir skulu takast, men kravt verður samstundis, at eftirlitið hevur neyðugan serkunnleika til økið. Tí er neyðugt at gera hesa broyting í samansetingini av limum í Grannskoðaraeftirlitinum.

Sambært galdandi áseting er Grannskoðaraeftirlitið mannað við einum formanni og 4 øðrum limum, harav 2 limir skulu vera góðkendir grannskoðarar og 2 limir skulu umboða roknskaparbrúkararnar.

Skotið verður upp at broyta ásetingina soleiðis, at Grannskoðaraeftirlitið frameftir verður mannað við einum formanni og 4 øðrum limum, harav 2 limir skulu hava hóskandi útbúgving og viðkomandi royndir innan grannskoðan og roknskapargreiðslu, og 2 limir skulu umboða roknskaparbrúkararnar.

Tað eru sostatt limirnir, sum í dag skulu vera góðkendir grannskoðarar, ið aftaná broytingina ikki sleppa at halda fram í Grannskoðaraeftirlitinum. Frameftir skulu hesir báðir sessirnir í Grannskoðaraeftirlitinum verða mannaðir við 2 limum, sum hava hóskandi útbúgving og viðkomandi royndir innan grannskoðan og roknskapargreiðslu.

Hetta merkir, at limirnir, sum Skráseting Føroya velur, skulu hava eina teoretiska útbúgving sum cand.merc.aud ella útbúgving, ið er sambærilig við hesa. Harafturat er tað eitt krav, at talan skal vera um persónar, sum hava hóskandi royndir innan grannskoðan. Skráseting Føroya metir um hetta og verður dentur tá lagdur á praktisku royndirnar innan grannskoðan. Tað er ikki eitt krav, at viðkomandi skal hava starvast á einum grannskoðanarvirki, men hetta kann vera ein fyrimunur. Viðkomandi royndir kunnu eisini eitt nú vera frá innanhýsis grannskoðan í fíggjarfyritøkum ella í øðrum størri fyritøkum.

Nr. 60
Sambært galdandi áseting í § 32, stk. 1, 5. pkt. skulu hvørki formaðurin ella umboðini fyri roknskaparbrúkararnar í Grannskoðaraeftirlitinum vera góðkendir grannskoðarar ella vera í starvi hjá ella reka grannskoðanarvirki saman við góðkendum grannskoðarum.

Tá samansetingin av Grannskoðaraeftitlitinum nú verður broytt, sbrt. § 1, nr. 59 í uppskotinum, av tí, at allir limir skulu virka óheft av grannskoðaravinnuni, er eisini neyðugt at broyta ásetingina í § 32, stk. 1, 5. pkt. í grannskoðaralógini.

Skotið verður upp, at hvørki formaðurin ella limirnir kunnu vera góðkendir grannskoðarar ella vera í starvi hjá ella reka grannskoðanarvirki saman við góðkendum grannskoðarum.

Nr. 61
Av tí, at § 19 verður strikað úr lógini, sbr. § 1, nr. 32 í uppskotinum, er neyðugt at broyta ásetingina. Innihaldið í ásetingini er enn hitt sama.
Sambært galdandi áseting kann landsstýrismaðurin áseta serligar reglur um góðskueftirlit við grannskoðanarvirkjum, ið grannskoða á virkjum, sum eru nevnd í § 19, stk. 3.

Sambært uppskotinum til nýggja orðing fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta serligar reglur um góðskueftirlit við grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga. Hvat hugtakið fyritøka av almennum áhuga fevnir um, verður nágreinað í § 1, nr. 5 í uppskotinum.

Nr. 62
Ásetingin hevur sama innihald sum § 32, stk. 4 í galdandi lóg, tó við teirri broyting, at landsstýrismaðurin afturat teimum heimildum, sum hann hevur eftir galdandi áseting, fær heimild til at áseta reglur um almannakunngerð av úrslitinum av einum góðskueftirliti sambært § 33 a, stk. 1. Tey í § 32, stk. 4, nr. 1-5 nevndu viðurskiftini eru tey mest viðkomandi viðurskiftini, sum skulu regulerast nærri, men talan er ikki um eina úttømandi uppreksan av viðurskiftum, sum heimild er til at regulera nærri.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 61 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 63
Sambært galdandi áseting í § 33, stk. 3 ger góðskueftirlitsfólkið eina frágreiðing til Grannskoðaraeftirlitið, har ein lýsing verður gjørd av, hvat er kannað, slagið og vavið av kanningini og eina meting av úrslitinum av kanningini. Ger ein grannskoðari kanningina, verður hon gjørd sum ein váttan sambært § 1, stk. 2 í lógini.

Skotið verður upp, at góðskueftirlitsfólkið ikki longur skal gera eina váttan sambært § 1, stk. 2, men skal gera ein frágreiðing til Grannskoðaraeftirlitið. Nágreinað verður í ásetingini, hvat skal standa í frágreiðingini. Í frágreiðingini skal vera ein lýsing av, hvat er kannað, slagið og vavið á kanningini, ein meting av góðskustýringarskipanini, umframt fremjanini av og óheftni í sambandi við uppgávur sambært § 1, stk. 2.

Frágreiðingin frá góðskueftirlitsfólkinum er ikki ein fyrisitingarlig avgerð, og Grannskoðaraeftirlitið er ikki bundið av metingini hjá góðskueftirlitsfólkinum. Við støði í frágreiðingini ger Grannskoðaraeftirlitið eina meting av úrslitinum av eftirlitinum, undir hesum eina meting, hvørt góðskueftirlitið eigur at føra til ávísar atgerðir, sbr. viðmerkingarnar til § 1, nr. 65 í uppskotinum (§ 33, stk. 6 í grannskoðaralógini).

Leiðreglur fyri góðskueftirlitsvitjanir umframt frágreiðingina frá góðskueftirlitinum verða gjørdar við heimild í § 32, stk. 3, 2. og 3. pkt. í grannskoðaralógini.

Til nr. 64
Broytingin er ein avleiðing av, at ásetingin í § 19 verður strikað úr grannskoðaralógini, sí § 1, nr. 32. Ásetingin hevur enn sama innihald, hóast orðaljóðið verður broytt.

Til nr. 65
Ásetingin snýr seg um, hvussu góðskueftirlitið verður endað. Í mun til galdandi reglur verður mátin at enda eitt góðskueftirlit nú broyttur nakað.

Sambært 8. vinnufelagadirektivinum art. 29, stk. 1, litra g, skal góðskueftirlitið enda við eini frágreiðing, sum inniheldur tær mest týðandi niðurstøðurnar frá eftirlitinum.

Eftir uppskotinum skal góðskueftirlitið enda við, at Grannskoðaraeftirlitið gevur grannskoðanarvirkinum eina frágreiðing við teimum mest týðandi niðurstøðunum frá

góðskueftirlitinum. Í frágreiðingini eru metingarnar hjá Grannskoðaraeftirlitinum av góðskustýringsskipanini hjá grannskoðanarvirkinum og kannaðu váttanaruppgávunum umframt eina nærri lýsing av staðfestu feilunum og manglunum umframt tilmælum. Í teimum førum, har Grannskoðaraeftirlitið metir, at batar kunnu gerast, verða tilmæli gjørd í frágreiðingini soleiðis, at grannskoðanarvirkið fær rættað upp á tey viðurskiftini, sum eru eyðmerkt.
Grannskoðaraeftirlitið metir um, hvørt eftirlitið kann verða endað uttan onnur tiltøk, ella eftirlit skal verða aftur fyri at vita, um grannskoðanarvirkið hevur fylgt tilmælunum í sambandi við góðskueftirlitið. Tá eftirlitið verður endað, verður eisini mett um, hvørt eftirlitið metir, at góðskustýringarskipanin og/ella ein ella fleiri váttanaruppgávur skulu kannast nærri eftir § 35, stk. 3 í lógini.

Sambært stk. 7 í uppskotinum kann Grannskoðaraeftirlitið krevja, at kannaða grannskoðanarvirkið ger eina virkisætlan.

Sambært 8. vinnufelagadirektivinum, art. 29, stk. 1, litra j, skal grannskoðarin ella grannskoðanarvirkið, innanfyri eitt rímiligt tíðarbil, fylgja tilmælum frá einum góðskueftirliti upp. Um tilmæli ikki verða fylgd, verða dissiplinerar ella aðrar reaktiónir settar í verk mótvegis grannskoðarum ella grannskoðanarvirkjum. Í art. 26, nr. 8 í ES-fyriskipanini er ásett, at tilmæli í sambandi við góðskustýringarskipanina hjá grannskoðanarvirkinum skal grannskoðanarvirkið seta í verk innanfyri 12 mánaðir.

Við støði í hesum verður skotið upp, at Grannskoðaraeftirlitið kann krevja, at grannskoðanarvirkið ger eina virkisætlan, har virkið skjýtur upp, hvussu staðfestu feilirnir ella manglarnir verða loystir. Í frágreiðingini skal vera frágreiðing frá grannskoðanarvirkinum um orsakir til feilir og manglar, uppskot til uppfylging viðvíkjandi feilum og manglum við ítøkiligum loysnum, hvør hevur ábyrgd av at loysa feilir og manglar, umframt eina tíðarætlan fyri uppskotini til loysnir. Grannskoðaraeftirlitið skal góðkenna endaligu virkisætlanina. Í sambandi við næsta uppfylgjandi eftirlitið verður kannað, um grannskoðanarvirkið hevur fylgt virkisætlanini.

Galdandi praksis er, at tað kannaða grannskoðanarvirkið fær eina avgerð um meting Grannskoðaraeftirlitsins av góðskustýringarskipanini, og um týðandi feilir og manglar eru funnir í einari ella fleiri kannaðum grannskoðanaruppgávum, fær grannskoðarin ella grannskoðararnir eina sjálvstøðuga avgerð. Við uppskotinum til nýggja orðing í stk. 6 og 7 er ætlanin at broyta hesa praksis, men endamálið er framvegis at hækka góðskuna á arbeiðinum hjá grannskoðarum. Við hesum uppskotinum verður, heldur enn at leggja dent á átalur fyri staðfestar feilir og manglar, lagdur størri dentur á frameftir lítandi tiltøk, sum hava til endamáls at bøta um viðurskiftini, og tiltøk, har fylgt verður við, at ábøtur verða gjørdar. Henda broyting í praksis hevur við sær, at grannskoðanarvirkið í størri mun fær ábyrgdina av góðskuni bæði á virkinum sum heild og í einstøkum málum. Grannskoðanarvirkið hevur ábyrgdina av, at ein nøktandi góðskustýringarskipan verður skipað, sett í verk og brúkt, sum tryggjar góðskuna, integritetin og neyvleikan í grannskoðarans arbeiði. Tað er grannskoðanarvirkið, sum eftir tilmæli frá Grannskoðaraeftirlitinum skal gera eina virkisætlan, uttan mun til, um feilir og manglar eru í málum á virkinum ella í einstøkum málum.

Við uppskotinum er eisini lagt upp til, at góðskueftirlitið og fyrisitingarligar reaktiónir og sanktiónir verða hildnar atskildar. Í teimum førum, har tað í samband við góðskueftirlitið verður mett, at tað møguliga eru framd brot á grannskoðaralóggávuna, verður ein kanning sett

í verk eftir § 35, stk. 3 í grannskoðaralógini, og avgerð tikin um úrslitið av kanningini eftir § 38, stk. 1.

Til nr. 66
Broytingin er ein avleiðing av bygnaðarbroytingum í Danmark, har Revisortilsynet er niðurlagt og Erhvervsstyrelsen hevur yvirtikið uppávur, sum Revisortilsynet hevði.

Til nr. 67
Ásetingin í § 33 a, sum snýr seg um almannakunngering av góðskueftirlitinum, er nýggj. Sum nakað nýtt gevur ásetingin Grannskoðaraeftirlitinum møguleika til at almannakunngera ávís úrslit frá góðskueftirlitinum.

Sambært art. 29, stk. 1, litra j í 8. vinnufelagadirektivinum hjá ES kann grannskoðari ella grannskoðanarvirki verða revsað við dissiplinerari revsing ella á annan hátt, um tilmæli í sambandi við góðskueftirlit ikki verða fylgd. Við støði í hesum verður skotið upp, at ein avleiðing av, at eitt grannskoðanarvirki ikki hevur fylgt tilmælinum í sambandi við eitt eftirlit, kann vera, at Grannskoðaraeftirlitið almannakunnger úrslitið av góðskueftirlitinum á grannskoðanarvirkinum.

Sostatt kann Grannskoðaraeftirlitið almannakunngera úrslitið av góðskueftirlitinum, um tað í sambandi við eitt uppfylgjandi eftirlit verður staðfest, at grannskoðanarvirkið ikki hevur fylgt tilmælinum frá fyrra eftirlitinum. Harafturat kann Grannskoðaraeftirlitið almannakunngera úrslitið av einum góðskueftirliti, har eftirlitið hevur mælt til, at grannskoðanarvirkið ger eina virkisætlan, og grannskoðanarvirkið ikki hevur gjørt hesa virkisætlanina. Grannskoðaraeftirlitið kann eisini almannakunngera úrslitið ella partar av úrslitinum av góðskueftirlitinum á grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða roknskapir hjá fyritøkum av almennum áhuga.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 64 (§ 35b) í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 68
Ásetingin í § 35 snýr seg um kanningar, sum Skráseting Føroya kann gera, um stovnurin metir, at vandi er fyri, at ein grannskoðari ella eitt grannskoðanarvirki hevur brotið ella fer at bróta reglur í ella sambært lóg. Endamálið við eini slíkari kanning er at staðfesta, rætta ella forða fyri einum slíkum broti. Um talan er um illgruna um brot á revsilógina, verður málið latið løgregluni, sum tá skal gera kanningarnar.

Heimildin hjá Skráseting Føroya at gera kanningar verður eftir uppskotinum víðkað til, umframt at fevna um grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, eisini at fevna um fyritøkur av almennum áhuga, og limir í evstu leiðslu ella grannskoðanarbólki í eini fyritøku av almennum áhuga, sum hevur brotið ella fer at bróta eina skyldu í ella sambært hesi lóg ella fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 66 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 69

Sambært § 36 kann Skráseting Føroya krevja allar upplýsingar frá grannskoðaranum ella grannskoðanaravirkinum, heruppií arbeiðsskjøl, grannskoðanarprotokollir, brævaskifti og onnur skjøl, ið verða mett neyðug, tá Skráseting Føroya skal gera av, um tað eru hend ella fara at henda brot á reglurnar í hesi lóg, á reglur, ásettar sambært hesi lóg ella reglur um skyldur grannskoðarans, ásettar í aðrari lóggávu.

Í lógaruppskotinum um at seta fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga í gildi í Føroyum, sum er lagt fram samstundis sum hetta lógaruppskot, er í § 1, nr. 2 skotið upp at áseta, at málsførur myndugleiki, sum víst verður til í fyriskipanini, er Skráseting Føroya.

Sambært art. 23 í fyriskipanini skal málsføri myndugleikin hava ávísar heimildir í sambandi við kanningar, sum hava við fyritøkur av almennum áhuga at gera, heruppií at krevja upplýsingar frá einum størri bólki enn í sambandi við aðrar kanningar.

Lagt verður tí upp til, at ein nýggj áseting verður sett í § 36, stk. 2, har ásett verður, at Skráseting Føroya í sambandi við kanningar, sum hava við fyritøkur av almennum áhuga at gera, kann krevja somu upplýsingar frá persónum, ið eru við í ella hava samband við grannskoðaran ella grannskoðanarvirkið, og frá øðrum pørtum, sum grannskoðarin ella grannskoðanarvirkið hava latið uppgávur upp í hendi.

Heimildin at krevja upplýsingar verður sostatt víðkað til at fevna um aðrar persónar, enn grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, sum eru fevnd av stk. 1.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 67 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 70
Sambært § 38 kann Skráseting Føroya, tá ein kanning er endað, taka støðu til, um úrslitið av kanningini gevur høvi til at geva eina átalu, at krevja, at brot skulu steðga, ella at leggja grannskoðaran, grannskoðanarvirkið ella bæði fyri Grannskoðaranevndina, sbr. § 41. § 38 ásetur sostatt, hvørjar møguleikar Skráseting Føroya hevur, tá ein kanning vísir, at brot eru á lógina.

Sambært galdandi § 39, sum sambært hesum uppskoti verður strikað, kann Skráseting Føroya gera av, at úrslitið av kanningini sbrt. § 38 skal almannakunngerast. Skráseting Føroya kann eisini almannakunngera, at ein kanning er endað við, at eingi brot el.líkn. eru ávíst. Hetta kann tó ikki lesast í lógini, tí § 38 ikki hevur sum ein møguleika, at ein kanning endar uttan viðmerkingar.

Lagt verður tí upp til, at § 38 verður broytt soleiðis, at tað verður ásett í stk. 1, nr. 1, at Skráseting Føroya kann taka støðu til, um kanningin verður endað uttan viðmerkingar. Henda áseting eigur at verða nýtt í teimum førum, tá kanningin ikki hevur ávíst nøkur brot á grannskoðaralóggávuna.

Stk. 1, nr. 2-4 samsvara við ásetingarnar í stk. 1, nr. 1-3 í galdandi lóg, og eingin broyting er ætlað.

Sambært stk. 1, nr. 5 kann Skráseting Føroya leggja lim í evstu leiðsluni ella grannskoðanarbólk í eini fyritøku av almennum áhuga ella eina fyritøku av almennum áhuga ella bæði fyri Grannskoðaranevndina.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 68 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 71
Sambært § 39 kann Skráseting Føroya gera av, at úrslitið av kanningini sbrt. § 38 skal almannakunngerast.

Lagt verður upp til, at § 39 verður strikað, og at nýggjar ásetingar um almannakunngering verða settar í lógina í § 44 a – 44 c. Víst verður til viðmerkingarnar til hesar greinar niðanfyri undir § 1, nr. 92.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 69 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 72
Sambært § 40 í galdandi lóg kann Skráseting Føroya sum tvingsilsráð áleggja limum í nevndini ella stjórnini ella øðrum, sum hava líknandi ábyrgd í grannskoðanarvirkinum, og grannskoðarum dag- ella vikubøtur, um tey lata vera við at fylgja eini áheitan um upplýsingar sambært § 36 ella lata vera við at gera eftir boðum frá Skráseting Føroya sambært § 38.

Av tí, at tað er lagt upp til, at skarin av persónum, sum eru fevndir av § 35 verður víðkaður, verður somuleiðis lagt upp til at víðka um skaran, sum Skráseting Føroya kann áleggja tvingsilsráð.

Tað verður mett sum týdningarmikið fyri at handhevja eitt munadygt eftirlit, at Skráseting Føroya fær atgongd til tær upplýsingar, sum skrásetingin biður um. Við atliti til álitið á almenna eftirlitið er tað harafturat avgerandi, at Skrásetingin kann tvinga ígjøgnum, at tey boð, sum Skrásetingin gevur, verða fylgd.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 70 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Nr. 73
Ásetingin í § 41, stk. 1 snýr seg um samanseting av og val av formanni og limum í Grannskoðaranevndina. Sambært ásetingini velur Skráseting Føroya formannin og limirnar.

Skotið verður upp at gera tvinnar broytingar í ásetingini í § 41, stk. 1.

Onnur er, at 2. pkt. í § 41, stk. 1 verður strikað. Talan er um heimildina hjá landsstýrismanninum at gera starvsskipan fyri nevndina. Hendan heimildin verður sambært § 1, nr. 91 í uppskotinum frameftir at finna í § 43 a í lógini.

Hin broytingin í ásetingini er, at tað veður skotið upp, at ein av tveimum limum, ið umboða roknskaparbrúkararnar í nevndini, skal hava leiðsluroyndir frá einari fyritøku av almennum áhuga. Ásetingin hongur saman við broytingunum í § 1, nr. 89, har heimildirnar hjá Grannskoðaranevndini verða víðkaðar. Grannskoðaranevndin fær heimild til at viðgera

klagur, sum snúgva seg um brot á tær skyldur, sum PIE-fyritøkur, limir í evstu leiðsluni í hesum fyritøkum ella grannskoðanarbólkurin í hesum fyritøkum hava. Talan er um eina víðkan av persónskaranum, sum er fevndur av málføri Grannskoðaranevndarinnar, nú mál um onnur enn grannskoðarar og grannskoðanarvirkir kunnu verða løgd fyri nevndina. Tí verður skotið upp, at ein limur, sum umboðar roknskaparbrúkararnar, skal hava leiðsluroyndir frá einari fyritøku av almennum áhuga. Persónar við leiðsluroyndum frá PIE-fyritøkum er at skilja sum stjórar, nevndarlimir, CFO, internur grannskoðanarleiðari el. líkn. í einari PIE-fyritøku.

Til nr. 74
Ásetingin í § 41, stk. 2 snýr seg um samansetingina av Grannskoðaranevndini, tá mál eru til viðgerðar. Í høvuðsheitum er innihaldið í ásetingini í uppskotinum hitt sama sum í galdandi lóg. Ásetingin í 4. pkt. verður nú broytt soleiðis, at kravið um, at formaðurin og 2 løggildir ávíkavist 2 skrásettir grannskoðarar og eitt samsvarandi tal av limum skulu luttaka í viðgerðini í málum um rættindafrádøming, verður víkað soleiðis, at hetta eisini verður galdandi fyri mál um forboð sambært § 42, stk. 3 og treytaða frádøming sambært § 44, stk. 2.

Ein onnur broyting í § 41, stk. 2 er, at tað verður ásett eitt nýtt 6. pkt. Sambært ásetingini í 6. pkt. í § 41, stk. 2, kann Grannskoðaranevndin bert taka avgerð um rættindafrádøming, forboð ella treytaða frádøming, um kærari í sambandi við málið hevur eina slíka revsing sum málkrav.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 72 til 5. pkt. í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 75
Talan er um fylgibroytingar orsakað av broytingum í § 1, nr. 83 í uppskotinum.

Til nr. 76
Talan er um eina fylgibroyting orsakað av broyting í § 1, nr. 84 í uppskotinum.

Til nr. 77

Ásetingin snýr seg um tað sama sum galdandi áseting í § 41, stk. 5 í grannskoðaralógini. Ásetingin er umorðað orsakað av broytingum í øðrum ásetingum í lógini, og harafturat verða møguleikarnir hjá Grannskoðaraeftirlitinum og Skráseting Føroya til at skjóta grannskoðanarvirki inn fyri Grannskoðaranevndina víðkaðir.

Eins og eftir galdandi áseting hava Grannskoðaraeftirlitið og Skráseting Føroya heimild til at skjóta mál um viðurskifti, sum eftirlitið er komið fram á í sambandi við ávikavist eitt góðskueftirlit sambært § 27 í lógini ella eina kanning sambært § 35 í lógini. Tað er nágreinað, at grannskoðanarvirki kunnu verða skotin inn fyri nevndina, tá funnir eru skeivleikar ella manglar hjá virkinum viðvíkjandi skyldum virkisins sambært § 14 a, stk. 1 og 4 og § 22, stk. 5 ella virkið ikki hevur eina góðskustýringsskipan sambært §§ 26 og 26 a.

Eftir galdandi reglum er tað ein treyt fyri, at Grannskoðaranevndin kann viðgera eina kæru um eitt virki, at grannskoðanarvirkið er góðkent. Hetta merkir, at virkið skal vera skrásett í skránni hjá Skráseting Føroya yvir góðkend grannskoðanarvirkir, sbr. § 2 í grannskoðaralógini. Í hesum liggur, at Grannskoðaranevndin ikki kann viðgera eina kæru um eitt virki, sum ikki er skrásett í skránni, tá brotið fer fram. Skotið verður nú upp at nágreina í § 41, stk. 5, 2, pkt., at Grannskoðaranevndin hevur heimild til at viðgera eina kæru, sum er

skotin inn fyri nevndina, sjálvt um virkið verður strikað sum góðkent virki, áðrenn farið verður undir at viðgera málið í nevndini, ella meðan málið er til viðgerðar í nevndini. Tað, sum er avgerandi fyri, at Grannskoðaranevndin kann viðgera málið, er, at virkið var skrásett í skránni, tá brotið fór fram.

Ásetingin í 2. pkt. førir við sær, at Grannskoðaranevndin kann viðgera eina kæru um eitt grannskoðanarvirki, sum verður rikið t.d. í felagsformi uttan mun til, um virkið, áðrenn kæran verður latin inn, hevur mist sín status sum grannskoðanarvirki ella missir henda status, meðan málið er til viðgerðar. Einasta treyt er, at virkið ikki er hildið uppat sum juridiskur persónur. Á tann hátt verður tryggjað, at eitt virki ikki verður strikað bert við tí endamáli at sleppa undan einari kærumálsviðgerð í Grannskoðaranevndini. Ein kæra ímóti einum einstaklingavirki, sum hevur mist ella missir sína góðkenning sum grannskoðanarvirki, kann ikki verða viðgjørd í nevndini, tí eitt slíkt virki harvið ikki kann verða ábyrgdarsubjekt fyri dissiplinerábyrgdini. Eitt persónliga rikið einstaklingavirki kann vanliga ikki verða subjekt fyri revsiábyrgd, sbr. § 26 í revsilógini.

Til nr. 78
Við broytingini verður Felagið fyri skrásettar grannskoðarar strikað úr ásetingini. Orsøkin til broytingina er, at tað nú bert er eitt felag fyri grannskoðarar í landinum, og tað er Felagið Føroyskir Grannskoðarar, sum longu er nevnt í ásetingini.

Til nr. 79
Sambært galdandi áseting í § 41, stk. 6 kann Grannskoðaranevndin ella formaðurin nokta at viðgera kærur frá persónum, ið ikki hava ein rættarligan áhuga í teimum viðurskiftum, kæran viðvíkur, og kærur, sum frammanundan verða mettar ógrundaðar. Tó skal Grannskoðaranevndin altíð viðgera kæruna, tá kæran kemur frá Skráseting Føroya, Fíggjareftirlitinum, Tryggingareftirlitinum, Fíggjarmálaráðnum, ákæruvaldinum, Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Felagnum fyri skrásettar grannskoðarar ella Grannskoðaraeftirlitinum, og er tað sama eisini galdandi fyri kæru frá einari kommunu ella kommunalum felagsskapi, um grannskoðarin hevur gjørt arbeiði sambært § 1, stk. 2 og 3.

Skotið verður upp, at tað í § 41, stk. 6 aftan á 3. pkt. sum nýtt pkt. verður sett:
"Umframt at nokta at viðgera eina kæru eftir 1. pkt. kann Grannskoðaranevndin ella formaðurin nokta at viðgera eina kæru, ið ikki er fevnd av málsføri nevndarinnar, ella er latin inn ov seint."

Harvið verður tað nágreinað, at nevndin ikki skal viðgera kærur, sum ikki er fevnd av málsføri nevndarinnar, ella er latnar inn ov seint. Hetta er somuleiðis galdandi fyri kærur frá Skráseting Føroya, Fíggjareftirlitinum, Tryggingareftirlitinum, Fíggjarmálaráðnum, ákæruvaldinum, Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Felagnum fyri skrásettar grannskoðarar ella Grannskoðaraeftirlitinum, kommunum ella kommunalum felagsskapum.
Talan kann vera um kærur um ráðgevingartænastur, sum grannskoðarin hevur veitt, men ikki eru fevnar av grannskoðaralógini.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 77 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 80

Í galdandi § 41, stk. 7 er ein heimild til landsstýrismannin at áseta nærri reglur um gjald fyri at fáa eina kæru viðgjørda í Grannskoðaranevndini. Henda heimildin verður frameftir at finna í § 43 a í grannskoðaralógini, sbrt. § 1, nr. 91 í uppskotinum. Tí verður skotið upp at strika ásetingina í § 41, stk. 7 í grannskoðaralógini.

Til nr. 81
Sambært § 42, stk. 1 í galdandi lóg kann Grannskoðaranevndin geva eina ávaring ella eina sekt upp á í mesta lagi 300.000 kr., um ein grannskoðari setir til síðis tær skyldur, ið fylgja við starvinum, tá hann fremur uppgávur sambært § 1, stk. 2 og 3.

Í sambandi við smærri brot á grannskoðaralóggávuna er ikki altíð tørvur á at leggja málið fyri Grannskoðaranevndina, uttan so, at talan er um endurtøku. Við støði í hesum er ætlanin at gera eina broyting soleiðis, at fleiri mál verða endað við átalu ella við boðum, tó ikki tá talan er um endurtøku. Tað sama ger seg galdandi fyri mál, sum ikki hava verið undir góðskueftirliti, men eru kannað eftir § 35 í lógini.

Praksisbroytingin hevur við broytingarnar í góðskueftirlitinum at gera, sbr. § 1, nr. 62-69 í uppskotinum.

Tá eftirlitið metir um, hvørt talan er um smærri brot, hevur tað týdning, í hvønn mun brotið kann hava ávirkan á viðurskifti hjá grannskoðanarkundanum ella á avgerðirnar hjá triðjamanni um eitt nú at veita kreditt ella at fara í handilssamstarv. Yvirskipað er talan um mál, sum higartil hava ført til sekt upp á 25.000 kr. í Grannskoðaranevndini.
Grannskoðaraeftirlitið ella Skráseting Føroya, sbr. § 41, stk. 5 í lógini, metir ítøkiliga um, hvørt talan er um eitt minni álvarsamt brot.
Í teimum førum, har onnur enn Grannskoðaraeftirlitið ella Skráseting Føroya leggja eitt mál fyri Grannskoðaranevndina, skal Grannskoðaranevndin á sama hátt meta um, hvørt talan er um eitt minni álvarsamt brot, og er hetta fyrstu ferð tað hendir, skal tað ikki føra við sær eina sekt, men bert eina ávaring.

Galdandi stødd á sekt upp á 300.000 kr. fyri ein grannskoðara og 750.000 kr. fyri eitt grannskoðanarvirki verða í útgangsstøði mett hóskandi. Í heilt serstøkum førum, har talan er um grovt brot á grannskoðaralóggávuna, kann tørvur verða á at kunna geva hægri sekt. Tí verður skotið upp, at tað í stk. 1, 2. pkt. verður ásett, at Grannskoðaranevndin kann hækka sektina upp í 600.000 kr., tá talan er um serliga grovt brot á skyldurnar sum grannskoðari. Væntað verður ikki, at ásetingin fer at verða nýtt ofta.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 79 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 82
Ásetingin í § 42, stk. 2 snýr seg um frádøming av góðkenning grannskoðarans.

Í § 42, stk. 2 í uppskotinum verður skotið upp, at tað sum nakað nýtt kann verða givin ein treytað frádøming av góðkenning grannskoðarans. Hesin møguleiki er ikki í dag.

Sambært § 42, stk. 3 í uppskotinum kann forboð verða sett fyri, at ein grannskoðari virkar sum grannskoðari í upp í 3 ár, um viðkomandi er sekur í grovum ella ofta endurtakandi

vansketni í útinnanini av ávísum virksemi sum grannskoðari ella í starvi í einum grannskoðanarvirki.

Galdandi áseting í § 42, stk. 2 um frádøming av góðkenning grannskoðarans verður frameftir at finna í § 42, stk. 4, sí broyting nr. 76 í uppskotinum.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 80 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 83
Ásetingin í § 42, stk. 2 í galdandi lóg snýr seg um frádøming av góðkenning grannskoðarans.

Hetta verður nú broytt soleiðis, at henda ásetingin í § 42, stk. 2 um frádøming av góðkenningini nú verður at finna í § 42, stk. 4 í lógini. Ásetingin verður eisini broytt soleiðis, at tað í 3. pkt. í § 42, stk. 4 verður ásett, at Grannskoðaranevndin í sambandi við avgerðina leggur avgerandi dent á, at grannskoðarin, sbrt. § 15, stk. 1, er álitisumboð hjá almenninginum.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar § 1, nr. 81 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 84
Sambært § 42, stk. 4 í galdandi lóg kann tað verða álagt einum grannskoðanarvirki eina ávaring, átalu ella eina sekt upp á í mesta lagi 750.000 kr.

Skotið verður upp, at § 42, stk. 4 verður til § 42, stk. 6. Innihaldsliga verður skotið upp, at Grannskoðaranevndin kann hækka sektina í upp í 1.500.000 kr., tá talan er um staðfest brot av serliga grovum slagi.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 82 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 85
Skotið verður upp at strika ásetingina í § 42, stk. 4, 4. pkt. í galdandi lóg. Sambært ásetingini í galdandi lóg skal í eini avgerð hjá Grannskoðaranevndini sambært § 42, stk. 4, 3. pkt. í galdandi lóg verða upplýst um, at avgerðin kann verða løgd fyri rættin og um freistina fyri hesum.

Av tí, at tað verður skotið upp heldur at regulera hetta í § 42, stk. 10 í lógini, verður skotið upp, at hetta verður strikað úr § 42, stk. 4.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 83 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 86
Ásetingin er hin sama, sum í dag er í § 42, stk. 6 í lógini. Tó verður í ásetingini í § 42, stk. 8 nú víst til § 44 c í lógini, ið hevur neyvari ásetingar um almannakunngering av avgerðum hjá Grannskoðaranevndini.

Til nr. 87

Talan er um eina konsekvensbroyting orsakað av broytingini í § 1, nr. 82 í uppskotinum, har skotið verður upp at áseta nýggj stk. 2 og 3 í § 42.

Til nr. 88
Skotið verður upp, at tað í § 42 verður ásett í stk. 10, at tað í avgerðum eftir stk. 3 og 4 og stk. 6, 4. pkt. skal upplýsast, at avgerðin, sbrt. § 49, kann verða løgd fyri rættin og um freistina fyri hesum.

Til nr. 89
Skotið verður upp at seta eina nýggja áseting í § 42 a, sum snýr seg um at víðka heimildirnar hjá Grannskoðaranevndini. Hetta er neyðugt orsakað av broytingunum í 8. vinnufelagadirektivinum, art. 30 a, sum ásetur, at revsing skal verða áløgd í sambandi við brot á skyldurnar hjá m.a. fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyritøkum).

Í stk. 1 verður skotið upp, at Grannskoðaranevndin fær heimild til at viðgera klagur, sum snúgva seg um brot á tær skyldur, sum PIE-fyritøkur, limir í evstu leiðsluni í hesum fyritøkum ella grannskoðanarbólkurin í hesum fyritøkum hava. Skyldurnar, sum talan kann vera um, eru sambært § 29 í grannskoðaralógini um at skipa ein grannskoðanarbólk (skipan, samanseting og fremjan av uppgávunum), sambært partafelagslógini um val av og um at koyra grannskoðaran/grannskoðanarvirkið frá (art. 38 í 8. vinnufelagadirektivinum) ella sambært fyriskipan 2014/537/EU frá 16. apríl 2014 frá Europa-tinginum og Ráðnum um ítøkilig krøv til lógarálagda grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga. Skyldur sambært fyriskipanini snúgva seg m.a. um, at grannskoðanarbólkurin ikki hevur góðkent, at grannskoðarin veitir loyvdar ikki-grannskoðanaruppgávur (art. 5), at einki útboð hevur verið í sambandi við val av grannskoðara (art. 16), at tað ikki hevur verið rotatión av grannskoðanarvirkjum (art. 17) ella frágreiðing í sambandi við, at ein triðjapartur hevur roynt at handhevja avtalur, ið avmarka valið av grannskoðara í PIE-fyritøkum (art. 16).

Talan er um eina víðkan av persónskaranum, sum sambært § 41, stk. 3 og 4 er fevndur av málføri Grannskoðaranevndarinnar soleiðis, at onnur enn grannskoðarar og grannskoðanarvirkir kunnu verða skotin inn fyri nevndina.

Í stk. 2 verður í 1. og 2. pkt. ásett, hvussu nevndin er samansett, tá hon viðger eitt mál, undir hesum at tað í sambandi við viðgerðina altíð skulu vera eins nógvir grannskoðarar sum persónar við leiðsluroyndum frá fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyritøkur). Í sambandi við val av limum til nevndina verða tað, sbr. § 1, nr. 73 í uppskotinum, millum umboðini fyri roknskaparbrúkararnar útnevndir persónar við leiðsluroyndum frá fyritøkum av almennum áhuga. Tað er formaðurin, sum út frá einari meting av einstaka málinum, tekur avgerð um, hvussu nógvir og hvørjir limir skulu luttaka í viðgerðini av málinum. Í 3. pkt. er ásett, at tað í sambandi við viðgerðina av málum, har tað verður sett krav um forboð, útyvir formannin ella næstformannin altíð skulu luttaka í minsta lagi tveir grannskoðarar og tvey umboð fyri roknskaparbrúkararnar. Ásetingin í 4. pkt. svarar til uppskotið til ásetingina í § 41, stk. 2, 5. pkt., sbr. § 1, nr. 74., og sambært ásetingini kann nevndin bert taka avgerð um forboð, tá kærarin hevur sum málkrav, at hendan revsingin verður brúkt. Tað er ikki ein treyt, at kærarin skal hava nágreinað, at forboð skal gevast eftir § 42 b, stk. 2. Víst verður til viðmerkingarnar í § 1, nr. 74, ið snýr seg um § 41, stk. 2, 5. pkt.

Í stk. 3 er ásett, at tað er ein treyt fyri at lata inn kæru, at kærari hevur ein rættarligan áhuga í málinum. Viðkomandi skal harvið hava ein viðurkenningarverdan áhuga í, at nevndin tekur

eina avgerð í málinum. Sum dømi um, hvør kann metast at hava ein rættarligan áhuga, kunnu nevnast partaeigarar í felagnum, Fíggjareftirlitið ella Tryggingareftirlitið.

Ásett er, nær nevndin ella formaðurin í nevndini kunnu nokta at viðgera eina kæru. Kærur frá Grannskoðaraeftirlitinum, Skráseting Føroya ella øðrum almennum myndugleika kann nevndin ikki nokta at viðgera, uttan so at ein slík klaga ikki er fevnd av málsføri nevndarinnar, ella er latin inn ov seint.

Ásetingin í § 42 b snýr seg um ta revsing, sum Grannskoðaranevndin kann áleggja eini fyritøku av almennum áhuga ella einum limi í evstu leiðsluni ella í grannskoðanarnevndini í eini slíkari fyritøku. Revsingin kann verða nýtt, tá viðkomandi hevur sett til síðis sínar skyldur sambært grannskoðaralógini og/ella ES-fyriskipanini, sum lýst omanfyri undir § 42 a, stk. 1, undir hesum skyldurnar sambært reglum, sum seta í gildi art. 38 í 8. vinnufelagadirektivinum.

Revsingin kann sambært stk. 1 verða ávaring ella upp í 300.000 kr. í sekt. Revsingin svarar til ta revsing, sum Grannskoðaranevndin kann áleggja grannskoðarum sambært § 42, stk. 1. Mett verður ikki, at tað er tørvur á at kunna áleggja bøtur á 600.000 kr. ella 1.500.000 kr. svarandi til § 1, nr. 81 og 84. Tá mett verður um, hvat ein dissipliner sekt skal vera, eigur nevndin, umframt meginreglurnar í revislógarinnar kap. 10 um ásetan av revsing, at leggja upp fyri praksis fyri bøtur í sambandi við brot á leiðsluábyrgdina. Hægtu bøturnar eiga bert at verða nýttar í undantaksføri, har óvanligar umstøður í ítøkiliga málinum avgerandi tala fyri hesum.

Ásetingin í stk. 2 er ein gildissetan av art. 30 a, stk. 1, litra e í ES-direktivinum. Ein felags treyt fyri at geva eitt ella fleiri forboð eftir 1, 2 ella 3 er, at viðkomandi tilætlað ella av ósketni er sekur í grovliga ella í endurtøku føri at seta til síðis skyldurnar, sum viðkomandi hevur sum limur í evstu leiðsluni ella grannskoðanarnevndini í eini PIE-fyritøku.

Sambært stk. 2, nr. 1-3 kann Grannskoðaranevndin seta fyribils forboð fyri, at viðkomandi er nevndarlimur, limur í eftirlitsráðnum ella limur í leiðsluni, kann veljast sum limur ella vera limur í grannskoðanarnevndini í eini PIE-fyritøkuni. Eitt slíkt fyribils forboð kann vera galdandi í upp til 3 ár. Eitt forboð er generelt, og tí fær tað ikki bert virknað í mun til ta fyritøkuna, viðkomandi er ella var knýttur at í sambandi við tey viðurskifti, sum málið snýr seg um.

Hvørja revsing (ella hvørjar) av teimum sanktiónunum, Grannskoðaranevndin eigur at nýta, er m.a. treytað av, hvat slag av broti talan er um, um brotið er framt av viðkomandi í leiklutinum sum nevndarlimur, limur í leiðsluni ella limur í grannskoðanarnevndini í eini PIE-fyritøku, herundir hvør revsing verður mett best hóskandi í ítøkiliga førinum.

Eitt forboð, sum er givið, førir við sær, at viðkomandi skal fara úr nevndu leiðslu.

Uppskotið til stk. 3 og 4 svarar til § 42, stk. 9 og 10, sbr. § 1, nr. 87 og 88 í uppskotinum.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 87 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 90
Talan er um eina broyting, sum er ein avleiðing av broytingini í § 1, nr. 82 í uppskotinum.

Til nr. 91
§ 43 a er ein nýggj áseting, sum kemur í staðin fyri ásetingina í galdandi § 41, stk. 1, 2. pkt. Sambært galdandi áseting í § 41, stk. 1, 2. pkt. ger landsstýrismaðurin eina starvsskipan fyri nevndina. Skotið verður upp, at tað í § 43 a verður ein heimild til landsstýrismannin at áseta nærri reglur fyri Grannskoðaranevndina, herundir reglur um gjald fyri at lata inn kæru, um fyrireiking av málunum, um at áseta fund, um luttøku partanna, viðurskifti, sum skulu hava týdning, tá revsing verður ásett umframt almannakunngering av avgerðum nevndarinnar.
Í kunngerðini, sum fer at verða sett í gildi við heimild í ásetingini, verða eisini ásettar reglur um, hvørjar umstøður skulu takast við í metingina, tá Grannskoðaranevndin m.a. skal taka avgerð um revsing. Á tann hátt verður ásetingin í art. 30 b í 8. vinnufelagadirektivinum implementerað.

Til nr. 92
Í § 39 í galdandi lóg er ein áseting um almannakunngering.

Sambært ES-direktivinum art. 30 c hava Skráseting Føroya og Grannskoðaranevndin skyldu til at almannakunngera allar avgerðir um revsing.

Skotið verður upp, at nýggju reglurnar um almannakunngering verða settar í §§ 44 a – 44 c.

Sum ein avleiðing av hesum verður skotið upp, at galdandi § 39 verður flutt soleiðis, at ásetingin nú verður í nýggju § 44 b.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 90 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 93
Ásetingin snýr seg um tagnarskylduna hjá Skráseting Føroya og øðrum persónum, sum eru við í sambandi við eftirlitsarbeiðið.
Reglurnar eru tær somu, sum í tí galdandi § 45, stk. 1, tó verður ásetingin um víðkaða tagnarskyldu nú eisini galdandi fyri persónar, sum starvast við, og sum verða tiknir við í góðskueftirlitið. Á tann hátt verða øll, sum taka lut í arbeiði við góðskueftirliti, undir hesum góðskueftirlitsfólk og onnur, eisini fevnd av somu skyldum viðvíkjandi tagnarskyldu.

Hóast tagnarskylduna sambært § 45, stk. 1 kann Skráseting Føroya í sambandi við eftirlitsvirksemi lata upplýsingar víðari innanhýsis á stovninum í sambandi við, at stovnurin hevur aðrar eftirlitsuppgávur, sbr. § 1, nr. 96 í uppskotinum.

Til nr. 94
Ásetingin snýr seg um víðarilatan av trúnaðarupplýsingum, hóast tagnarskylduásetingina í § 45, stk. 1.
Ásetingarnar í stk. 4, nr. 1, 4 og 5 hava sama innihald sum í galdandi áseting.
Í ásetingini í nr. 3 verður presiserað, at upplýsingar kunnu verða latnar víðari til ákæruvaldið og løgregluna, so hesi kunnu røkja teirra lógarásettu uppgávur. Upplýsingarnar kunnu m.a. verða nýttar til rannsóknir og revsirættarsókn í málum, ið koma undir revsilógina ella eftirlitslóggávuna, ið almennir eftirlitsmyndugleikar umsita, eitt nú TAKS. Slík mál krevja mangan eina neyva kanning og meting av próvtilfari, áðrenn staðfestast kann, at brot er framt á lóggávuna. Skráseting Føroya hevur í flestu slíkum førum ikki heimild til ella møguleika til

at gera slíka kanning, og tí hevur tað týdning at hava heimild til at lata upplýsingar víðari til rætta myndugleika, tá hesin kannar eitt mál um brot á eftirlitslóggávu ella revislógina.

Víðarilatan av upplýsingum skal metast eftir persónsupplýsingarlóggávuni alt eftir, um talan er um viðkvæmar ella ikki viðkvæmar upplýsingar.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 92 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 95
Sambært galdandi § 45, stk. 7 kunnu upplýsingar, sum Skráseting Føroya hevur fingið frá útlendskum málførum myndugleika, einans latast víðari til Grannskoðaraeftirlitið, Grannskoðaranevndina og ákæruvaldið.
Skotið verður nú upp at broyta ásetingina soleiðis, at ásetingin í § 45, stk. 7 í uppskotinum hevur sama innihald sum nú, tó verður nú skoytt uppí, at upplýsingarnar einans kunnu latast øðrum myndugleika enn Grannskoðaraeftirlitinum, Grannskoðaranevndini og ákæruvaldinum, um tann útlendski myndugleikin hevur játtað, at upplýsingarnar verða latnar øðrum. Harvið er tað nágreinað, at upplýsingar frá útlendskum myndugleikum einans kunnu latast øðrum enn teimum nevndu, um útlendski myndugleikin hevur givið sítt samtykki.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 93 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 96
Skotið verður upp at áseta stk. 8 og stk. 9 sum nýggjar ásetingar í § 45. Ásetingarnar í stk. 8 og 9 snúgva seg ávikavist um tagnarskyldu og víðarilatan av upplýsingum.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 94 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 97
Í § 47, stk. 1 í grannskoðaralógini er ein heimild til landsstýrismannin at áseta, at góðskueftirlitið og dissiplinerskipanin verða fíggjað við innkrevjing av gjaldi frá øllum góðkendum grannskoðarum, ið eru knýttir at einum grannskoðanarvirki.

Skotið verður upp, at tað verður ásett sum 2. pkt. í § 47, stk. 1, at gjaldið kann verða ásett serstakt fyri ávíkavist grannskoðarar, sum eru knýttir at grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga, og grannskoðarar, sum eru knýttir at øðrum grannskoðanarvirkjum.

Í dag verður sama gjald brúkt, og tað uttan mun til, á hvørjum virkjum grannskoðararnir starvast.

Heimildin fyri at áseta ymisk gjøld skal vera við til at tryggja, at grannskoðanarvirkir, sum hoyra til annan bólkin, ikki fíggja raksturin av grannskoðaraeftirlitinum, sum hevur við hin bólkin at gera. Gjaldið verður sum higartil kravt inn eina ferð árliga.

Til nr. 98
Ásetingin í § 48 snýr seg um kæru og undantøk í tí sambandi.

Í stk. 1 er ásett, at avgerðir hjá Skráseting Føroya sambært lógini ella kunngerðum sambært lógini kunnu verða lagdar fyri Vinnukærunevndina í seinasta lag 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina. Hendan áseting heldur fram, og verður tað skoytt upp í ásetingina, at avgerðir, sum Skráseting Føroya tekur sambært ES-fyriskipanini, eisini kunnu verða lagdar fyri Vinnukærunevndina við 4 vikur freist.

Í stk. 2 er ásett, hvørjar avgerðir ikki kunnu verða lagdar fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika. Sambært galdandi áseting kunnu avgerðir sambært §§ 35-37 ikki verða lagdar fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika. Skotið verður upp, at avgerðir sambært §§ 35-37 heldur ikki frameftir kunnu kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika, og at tað harafturat heldur ikki er heimild til at kæra avgerðir sambært § 44 a, stk. 3 og sambært § 44 b, stk. 1 og stk. 2. Avgerðir sambært § 44 a, stk. 3 snúgva seg um almannakunngering av avgerðum og avgerðir sambært § 44 b, stk. 1 snúgva seg um almannakunngering av, at ein kanning er sett í verk ella almannakunngering av úrslitinum av eini kanning.

Til nr. 99
Talan er um fylgibroytingar orsakað av broytingum, sum eru í § 1, nr. 82, 84 og 89 í uppskotinum.

Til nr. 100
Ásetingin er nýggj, og verður ásett sum stk. 4 í § 49. Galdandi stk. 4 verður hereftir § 49, stk. 5.

Ásetingin í § 49, stk. 4 í uppskotinum snýr seg um at leggja avgerðir sambært § 42, stk. 3 fyri dómstólarnar og um steðgandi virknað í tí sambandi.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 102 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 101
Ásetingin í galdandi § 49, stk. 4 verður nú § 49, stk. 5 og innihaldsligu broytingarnar í ásetingini eru fylgibroytingar orsakað av broytingum í § 1, nr. 82 og 84 í uppskotinum.

Til nr. 102
Uppskotið til nýggja áseting í § 49, stk. 6 snýr seg um at leggja avgerð hjá Grannskoðaranevndini um forboð sambært § 42 b, stk. 2 fyri dómstólarnar.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 104 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 103
Sambært ásetingini í § 49 a, ið er ein nýggj áseting, skulu avgerðir hjá Grannskoðaranevndini verða lagdar fyri rættin í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina. Tó kann rætturin í hendinga føri loyva, at avgerðir verða lagdar fyri rættin aftaná, at freistin er farin. Hetta er treytað av, at umsókn um hetta verður latin inn innan 6 mánaðir eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina. Verður loyvi givið, skal avgerðin verða løgd fyri rættin innan 4 vikur eftir, at loyvið er givið.

Sambært stk. 2 er ásetingin í stk. 1 ikki galdandi fyri avgerðir um frátøku av góðkenningini, sbrt. § 44, stk. 4 og 6, fyribils forboð mótvegis einum grannskoðara, sbrt. § 44, stk. 3, og

fyribils forboð móti einum limi í evstu leiðsluni ella Grannskoðanarnevndini í eini fyritøku av almennum áhuga, sbrt. § 44 b, stk. 2.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 105 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 104
Í § 51 eru reglur um revsing. Ásetingin í § 51, stk. 1 svarar í høvuðsheitum til galdandi áseting í § 51, stk. 1. Tó er ásetingin tillagað í mun til tær broytingar, sum eru í uppskotinum.

Sambært ásetingini kann brot á hesar reglur verða revsað – brot á § 5 um at misbrúka heitið, brot á § 9, stk. 1 um at nýta prógv fyri góðkenning sum grannskoðari, tá hetta er tikið frá ella frádømt viðkomandi, brot á § 11, stk. 1 og 2, 1. pkt. um grannskoðarar, sum hava bústað í einum øðrum landi og geva váttan í ósamsvari við reglurnar, brot á § 18 um skyldur hjá grannskoðara í fyritøku av almennum áhuga at leggja grannskoðanarprotokollina fyri nevndina ella eftirlitsráðið í fyritøkuni, brot á §§ 20-22 um skyldu grannskoðarans at fráboða fíggjarlig brotsverk, skylduna at gera arbeiðsskjøl, og óheftni grannskoðarans, brot á § 22 c um forboð móti, at ein grannskoðari, sum hevur undirskrivað grannskoðanarátekningina ella hevur verið knýttur at grannskoðanini, tekur við leiðandi starvi í viðkomandi fyritøku, áðrenn 1 ella 2 ár eru gingin – treytað av, um talan er um fyritøku av almennum áhuga, brot á § 24 um ásetan av samsýning, brot á § 29, stk. 1, 1. pkt., stk. 4 og 6 um treytrinar fyri at lata evstu leiðsluna útinna leiklutin hjá grannskoðanarnevndini og um at upplýsa um hetta í ársfrásøgnini.

Nágreinað verður, at hægri revsing enn sekt, kann bert verða áløgd, um hetta er ásett í aðrari lóggávu.

Sambært § 51, stk. 1, 2. pkt. verða brot á skyldur sambært í ES-fyriskipanini viðvíkjandi fyritøkum av almennum áhuga revsað á sama hátt, sum eftir 1. pkt.

Víst verður í síni heild til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 106 í broytingaruppskoti til revisorloven (LF 146/2015), sum verða at skilja samsvarandi.

Til nr. 105
Orðið “bót” verður broytt til “sekt”. Talan er ikki um nakra innihaldsliga broyting.

Til nr. 106
Talan er bert um eina broyting, har revsingin eftir galdandi lóg kann vera sekt, hefti ella fongsul í upp í 4 mánaðir, men frameftir kann verða sekt ella fongsul í upp í 4 mánaðir.

Til nr. 107
Ásetingin í § 51, stk. 7 er ein nýggj áseting, sum heimilar revsing við sekt fyri brot á § 8 a, stk. 4, nr. 2, § 42, stk. 3, ella § 42 b, stk. 2. Hægri revsing kann áleggjast, um hetta er ásett í aðrari lóggávu.

Ásetingin í § 51, stk. 8 er eisini ein nýgg áseting, har ásett verður, at fyrningarfreistin fyri brot á lógina ella reglur, ásettar við heimild í lógini, er 5 ár.

Sambært § 93, stk. 1, nr. 1 í revsilógini er fyrningarfreistin 2 ár, tá heimild ikki er fyri hægri revsing enn fongsul í 1 ár fyri brotið. Brot á lógina eru tí higartil vanliga fyrnað aftaná 2 ár.

Við ásetingini í § 51, stk. 8 verður fyrningarfreistin fyri brot á grannskoðaralógina ella reglur við heimild í lógini longd til 5 ár.

Til § 2
Í stk. 1 er ásett, nær lógin fær gildi. Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi tann 1. juli 2021.

Ávís undantøk verða tó gjørd í stk. 2 til hesa áseting um gildiskomu, og verða eisini skiftisreglur gjørdar í sambandi við gildiskomuna, sbr. stk. 3-8.

Í stk. 2 verður skotið upp, at nýggju krøvini til innanhýsis bygnaðin í grannskoðanarvirkjunum, heruppií um góðskustýringarskipanina og krøvini til at skipa eina innanhýsis skipan fyri fráboðan av brotum á grannskoðanarlóggávuna v.m. ikki kemur í gildi fyrr enn tann 1. januar 2022. Á tann hátt fáa grannskoðanarvirkini eina hóskandi freist til at gjøgnumganga verandi skipanir o.a., meta um tørvin á at gera broytingar og seta í verk tær neyðugu broytingarnar.

Í stk. 3 verður skotið upp, at krøvini sambært §§ 18 og 19 í galdandi grannskoðaralóg um at føra grannskoðanarprotokoll fara úr gildi fyri grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga fyri roknskaparár, sum byrjar tann 1. juli 2021 ella seinni. Fyri roknskaparár, sum byrgja innan hesa dagfesting, skulu krøvini sambært §§ 18 og 19 vera yvirhildin. Fyri roknskaparár hjá fyritøkum av almennum áhuga, sum byrja 1. juli 2021 ella seinni, verða krøvini í art. 11 í ES-fyriskipan nr. 537/2014/EU af 16. april 2014 galdandi.

Sambært stk. 4 eru nýggju krøvini til skjalprógv í sambandi við grannskoðan av samtøkum galdandi fyri grannskoðan av samtøkuroknskapum, sum byrjar 1. juli 2021 ella seinni. Fyri grannskoðan av samtøkuroknskapum, sum er í gongd, skal grannskoðarin sostatt ikki innheinta samtykki frá grannskoðarum í dótturfeløgum, sbr. uppskotið til § 21, stk. 2, eins og grannskoðarin ikki skal boða Skráseting Føroya frá, um viðkomandi ikki hevur atgongd til at gjøgnumganga arbeiðsskjølini hjá dótturfeløgunum. Um forðingar eru fyri, at grannskoðarin kann gjøgnumganga arbeiðsskjølini hjá grannskoðarum í dótturfeløgum, skal grannskoðarin eins og higartil taka hóskandi stig í samsvari við krøvini í altjóða grannskoðanarstandardinum ISA 600 viðvíkjandi grannskoðan av samtøkum.

Í stk. 5 verður skotið upp, at kravið um, at limir í grannskoðanarbólkinum samanumtikið skulu hava førleikar, ið eru viðkomandi fyri tann geiran, sum fyritøkan er í, hevur virknað frá fyrsta vanliga aðalfundinum, sum verður hildin aftaná tann 31. desember 2021. Á tann hátt fáa tær fyritøkurnar, sum hava tørv á at broyta samansetingina á grannskoðanarbólkinum, hóskandi tíð til at finna tann ella teir neyðugu limirnar til grannskoðanarbólkin, sum skulu til fyri at yvirhalda kravið.

Sambært stk. 6 er § 8 a, stk. 3 í uppskotinum, sbrt. broytingtini í § 1, nr. 14, ikki galdandi fyri váttanir, sum eru givnar innan 1. juli 2021. Fyri hesar váttanirnar eru higartil galdandi reglur galdandi.

Sambært stk. 7 kann Grannskoðaranevndin bert nýta nýggju dissiplineru sanktiónirnar, sum skotið verður upp at áseta í § 42, stk. 1, 2. pkt., § 42, stk. 2-4 og § 42, stk. 6, 2. pkt., viðvíkjandi brotum, sum eru framd eftir, at lógin er komin í gildi. Á tann hátt fáa nýggju sanktiónirnar ikki afturvirkandi gildi.

Í stk. 8 verður skotið upp, at ásetingin í § 51, stk. 8 um fyrning er galdandi fyri brot á lóggávuna, sum er framt, áðrenn lógin kemur í gildi uttan so, at málið, áðrenn lógin kemur í gildi, longu er fyrnað eftir higartil galdandi reglum.

Í stk. 9 er ásett, at grannskoðanarvirkir, sum grannskoða PIE-fyritøkur, skulu fyri roknskaparár, sum byrja áðrenn 1. juli 2021, almannakunngera eina árliga frágreiðing um gjøgnumskygni innan 3 mánaðir eftir, at roknskaparárið er endað.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, tann 2. mars 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur

Fylgiskjal 2: Forslag til lov om ændring af revisorloven og forskellige andre love - LF 2015/146.

Fylgiskjal 3: Betænkning af 12. maj 2016 over Forslag til lov om ændring af revisorloven og forskellige andre love - BTL 2015/146.

Fylgiskjal 4: Hoyringarnotat yvir innkomnar viðmerkingar

Fylgiskjal 5: Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Fylgiskjal 6: Januar, løggilt grannskoðanarvirki

Fylgiskjal 7: Numo, løggilt grannskoðanarvirki

Fylgiskjal 8: Spekt, løggilt grannskoðanarvirki

Fylgiskjal 9: Grannskoðaraeftirlitið

Fylgiskjal 10: Tryggingareftirlitið

Fylgiskjal 11: Eftirlønargrunnur FA’s

Fylgiskjal 12: Betri Trygging og Betri Pensjón

Fylgiskjal 13: Føroya Arbeiðsgevarafelag